LANDSGRANNSKOÐANIN

Fíggjarárið 2014

Ársfrágreiðing

latin
løgtingsgrannskoðarunum

sambært § 12 í Ll. nr. 25/1999
“um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.”

NOVEMBER 2015

Innihaldsyvirlit

0 INNGANGUR 7

0.1 LANDSROKNSKAPURIN 2014 7
0.2 GRANNSKOÐAN AV ROKNSKAPINUM 7
0.3 FRAMLØGA 9

1 UM FRÁVIK MILLUM JÁTTAN OG NÝTSLU 11

1.1 LØGMANSFYRISITINGIN 11
1.2 FÍGGJARMÁL 12
1.2.1 MEIRNÝTSLA/FRÁVIK 12
1.2.2 MINNINÝTSLA/FRÁVIK 13
1.2.3 MEIRINNTØKUR/FRÁVIK 15
1.2.4 MINNIINNTØKUR/FRÁVIK 16
1.3 FISKIVINNUMÁL 17
1.3.1 MEIRNÝTSLA/FRÁVIK 17
1.3.2 MINNINÝTSLA/FRÁVIK 17
1.4 VINNUMÁL 17
1.4.1 MEIRNÝTSLA/FRÁVIK 17
1.5 MENTAMÁL 18
1.5.1 MEIRNÝTSLA/FRÁVIK 18
1.5.2 MINNINÝTSLA/FRÁVIK 18
1.6 HEILSUMÁL 20
1.6.1 MEIRNÝTSLA/FRÁVIK 20
1.6.2 MINNINÝSTSLA/FRÁVIK 21
1.7 ALMANNAMÁL 24
1.7.1 MINNINÝTSLA/FRÁVIK 24
1.7.2 MEIRNÝTSLA/FRÁVIK 26
1.8 ÓBRÚKTAR LØGUJÁTTANIR 27

2 LØGMANSFYRISITINGIN 29

2.1 SENDISTOVA FØROYA TIL KEYPMANNAHAVNAR (LG 2014/202-0131) 29

3 FÍGGJARMÁL 31

3.1 LANDSROKNSKAPURIN IKKI FULLFÍGGJAÐUR (LG 2014/100-0001) 31
3.2 FÍGGJARSTØÐA (LG 2014/300-0000) 32
3.2.1 AVSTEMMAN AV FÍGGJARSTØÐUNI 32

3.2.2 HØVUÐSTØL 32
3.2.3 FÍGGJARLIGUR ÚTBÚNAÐUR (LG 2014/300-0102) 33
3.2.4 ÁOGN 37
3.2.5 GOYMSLUR 38
3.2.6 OGNIR OG ÚTBÚNAÐUR (LG 2014/300-0101) 38
3.2.7 TØKUR PENINGUR 39
3.2.8 SKULD 41
3.3 TÆNASTUMANNAEFTIRLØNIR (LG 2014/203-0181) 43
3.4 UMSITING AV SKATTI, AVGJØLDUM O.Ø. 43
3.4.1 MVG-EFTIRSTØÐUR (LG 2014/220-0522) 43
3.5 KERVISSKOÐAN 44
3.5.1 AVTALA UM KERVISSKOÐAN HJÁ TAKS 44
3.5.2 AVTALA UM KERVISSKOÐAN HJÁ GJALDSTOVUNI 46
3.5.3 AVTALA UM KERVISSKOÐAN HJÁ KT LANDSINS 46
3.6 FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ (LG 2014/203-0111) 47
3.7 REGLUR UM MATSTOVUR (LG 2014/203-0111) 48
3.8 ÓMAKSGJØLD (LG 2014/203-0151) 48
3.9 FÍGGING LANDSINS (LG 2014/203-0151) 49
3.9.1 LANDSKASSASKULD 49
3.9.2 PORTEFØLJUSKIPANIN OG PLASERINGAR AV GJALDFØRI 52
3.10 LANDSVERK (LG 2014/203-0381) 53

4 FISKIVINNUMÁL 55

4.1 BÚNAÐARSTOVAN (LG 2014/205-0332) 55
4.2 LANDBÚNAÐARSTUÐUL (LG 2014/205-0332) 56
4.3 FISKIVINNUROYNDIR (LG 2014/205-0343) 56
4.4 TINGLÝSINGARGJALD (LG 2014/220-0522) 56
4.5 AVGJALD AV FISKATILFEINGI (LG 2014/220-0522) 57

5 VINNUMÁL 59

5.1 KUNNGERÐIR O.A. TIL VINNUFELAGALÓGINA (LG 2014/206-0111) 59
5.2 UMSITING AV VINNUSJÚKUGRUNNINUM (LG 2014/206-0211) 60
5.3 RÚSDREKKASØLA LANDSINS (LG 2014/206-0373) 60
5.4 STUÐULSJÁTTANIR TIL ORKUMÁL (LG 2014/206-0374) 61
5.5 STRANDFARASKIP LANDSINS, LØGUJÁTTAN (LG 2014/206-0382) 61
5.5.1 SKÚVOYARFERJA 61
5.6 AKSTOVAN (LG 2014/206-0384) 62
5.7 BARSILSSKIPANIN (LG 2014/220-0521) 64

6 MENTAMÁL 65

6.1 MENTAMÁLARÁÐIÐ (LG 2014/207-0111) 65
6.2 NÁM (LG 2014/207-0231) 66
6.3 SKÚLATILBOÐ TIL UNG VIÐ BREKI (RÁSIN) (LG 2014/207-0232) 67
6.4 FISKIVINNUSKÚLIN (LG 2014/207-0233) 70
6.5 MUSIKKSKÚLASKIPANIN (LG 2014/207-0235) 71
6.6 FRÍTÍÐARUNDIRVÍSING (LG 2014/207-0235) 72

6.7 VINNUHÁSKÚLIN (LG 2014/0207-0236) 73
6.8 GRANSKINGARRÁÐ FØROYA (LG 2014/0207-0236) 73
6.9 SJÓNÁM (LG 2014/0207-0236) 73
6.10 FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA (LG 2014/207-0236) 75
6.11 SØVN LANDSINS (LG 2014/0207-0243) 76
6.12 KIRKJUGRUNNURIN (LG 2014/0207-0245) 77

7 HEILSUMÁL 79

7.1 PROFYLAKSIR (LG 2014/211-0201) 79

8 ALMANNAMÁL 81

8.1 ALMANNAVERKIÐ (LG 2014/212-0000) 81
8.2 SERLIGT BARNAÍSKOYTI TIL EINSAMALLAR UPPIHALDARAR (LG 2014/212-0213) 81
8.3 EINKJUBARNASTYRKUR (LG 2014/212-0213) 84
8.4 DAGPENINGUR VEGNA SJÚKU V.M. (LG 2014/212-0214) 87
8.5 SAMSÝNING FYRI AT ANSA ELDRI OG ÓHJÁLPNUM HEIMA (LG 2014/212-0216) 91
8.6 ELDRI OG BREKAÐ (LG 2014/212-0216) 94
8.7 VANLIG FORSORG (LG 2014/212-0217) 94
8.8 § 15 Í FORSORGARLÓGINI (LG 2014/212-0217) 95
8.9 ARBEIÐSFREMJANDI TILTØK (LG 2014/212-0217) 96
8.10 LØN, SETANIR O.A. Í NÆRVERKINUM (LG 2014/511-0000) 97

0 Inngangur

0.1 Landsroknskapurin 2014

Sambært § 45, stk. 1, í stýrisskipanarlógini og § 1, stk. 1, í løgtingslóg nr. 33 frá 23. mars 1994 “um landsins almenna roknskaparhald v.m.” skal Landsstýrið í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok leggja samlaða landsroknskapin fyri Løgtingið. Neyvari reglur um roknskaparhaldið eru ásettar í kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 “um roknskaparverk landsins o.t.”

Aðalráðini og teir stovnar, sum hoyra undir aðalráðini, skulu leggja fram ársroknskap, sum er gjørdur í Búskaparskipan landsins, og sum gevur eina rætta mynd av inntøkum og útreiðslum í fíggjarárinum og av ognum og skuld við fíggjarárslok.

Aðalráð og stovnar skulu leggja fram ein rættan roknskap – gjørdur í BSL.

Aðalráðini og stovnar teirra skulu eisini støðugt hava tað innanhýsis eftirlit, ið skal til, fyri at ársroknskapur kann verða gjørdur, sum gevur eina rættvísandi mynd uttan stórvegis skeivleikar.

Sambært § 10 í roknskaparkunngerðini verða roknskaparupplýsingar samsvarandi góðkendum ársroknskapum tiknar við í landsroknskapin, sum Gjaldstovan setir upp.

Gjaldstovan setir landsroknskapin upp.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum skal, áðrenn juni mánaður er liðin, leggja fyri Løgtingið samlaða landsroknskapin.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum skal leggja fram samlaðan landsroknskap.

Landsroknskapurin fyri fíggjarárið 2014 varð latin Løgtinginum 25. juni 2015.

0.2 Grannskoðan av roknskapinum

Yvirskipaðu reglurnar um grannskoðan av almennum roknskapum eru ásettar í § 45 í stýrisskipanarlógini. Neyvari reglur eru ásettar í løgtingslóg nr. 25 frá 21. apríl 1999 “um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.”

Endamálið við grannskoðanini

Endamálið við grannskoðanini.

Sambært grannskoðanarlógini er endamálið við grannskoðanini at ansa eftir,

- at allar inntøkur landsins eru settar í roknskapin,
- at ongin útreiðsla er goldin uttan við heimild í fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg,
- at roknskapurin er rættur, og at tær avgerðir, roknskapurin fevnir um, eru samsvarandi veittum játtanum, galdandi lógum og fyriskipanum, verandi avtalum og vanligum siði,
- at hóskandi er atborið fíggjarliga í sambandi við umsiting av ognum og viðvíkjandi rakstri av teimum stovnum og tí virksemi, roknskapurin fevnir um, og
- at roknskapar- og eftirlitsskipanir eru tryggar.

Landsgrannskoðanin

Ábyrgd grannskoðarans.

Landsgrannskoðanin er stovnur undir Løgtinginum og er óheftur í virki sínum. Landsgrannskoðanin skal grannskoða árliga landsroknskapin, t.e. samlaða roknskapin fyri landsumsitingina og allar landsstovnarnar[1].

Grannskoðanin skal fevna um fíggjarliga grannskoðan, løgfrøðiliga-kritiska grannskoðan og fyrisitingargrannskoðan. Harafturat skal grannskoðanin regluliga kanna, um roknskapar- og eftirlitsskipanir eru tryggar.

Landsgrannskoðanin ger sjálv av, hvussu grannskoðanin verður útint.

Grannskoðanin verður løgd soleiðis til rættis, at øki og stovnar verða grannskoðað við jøvnum millumbili. Landsgrannskoðanin fer út á stovnar og deildir at kanna t.d. roknskapar- og lønarviðurskifti ella at kanna mannagongdir fyri umsiting av lóggávu og játtanum. Aðrar uppgávur eru t.d. játtanareftirlit, gjøgnumgongd av fíggjarstøðu og avstemman.

Frágreiðingar umbidnar av løgtingsgrannskoðarunum

Løgtingsgrannskoðararnir kunnu áleggja Landsgrannskoðanini at gera frágreiðingar um viðurskifti, sum teir vilja hava lýst. Løgtingsgrannskoðararnir kunnu eisini áleggja Landsgrannskoðanini víðkaða fyrisitingargrannskoðan á ávísum økjum ella at gera tvørgangandi fyrisitingargrannskoðan, sum fevnir um fleiri játtanir, stovnar o.a.

Dømi um eina slíka frágreiðing er “Frágreiðing um byggiverkætlanir seinnu árini”, sum Landsgrannskoðanin lat løgtingsgrannskoðarunum í apríl 2013.

Privatir grannskoðarar

Hjá nøkrum landsstovnum og grunnum er tað við lóg, kunngerð ella viðtøkum ásett, at grannskoðanin skal verða útint av løggildum ella skrásettum grannskoðarum. Í øðrum førum verður grannskoðanin útint sambært avtalu ella siðvenju.

Grannskoðararnir lata løgtingsgrannskoðarunum frágreiðingar um úrslitini av grannskoðanunum. Seinnu árini hava løgtingsgrannskoðararnir gjørt ein samandrátt av frágreiðingunum frá privatu grannskoðarunum, sum er latin Løgtinginum saman við landsroknskapinum.

Viðmerkingar og fráboðanir frá landsstýrismonnum

Í § 12, stk. 1, í grannskoðanarlógini er ásett, at landsstýrismaðurin skal hava eina skrivliga fráboðan um úrslitið av grannskoðanini. Vanligt er, at stovnsleiðslan frammanundan fær høvi at gera sínar viðmerkingar til frágreiðingina. Tað er fyri at tryggja, at ongar misskiljingar eru, og at tey skriv, sum verða send landsstýrismanninum, eru so røtt sum gjørligt, og at allir partar fáa høvi at lýsa síni sjónarmið.

Landsstýrismaðurin skal hava frágreiðingar til viðmerkingar.

Í § 12, stk. 3, er ásett, at áðrenn frágreiðing um úrslitið av einari grannskoðan verður latin løgtingsgrannskoðarunum, skal hon verða løgd fyri viðkomandi landsstýrismann til viðmerkingar. Møguligar viðmerkingar og fráboðanir frá landsstýrismanninum um tiltøk og ætlanir, sum frágreiðingin hevur elvt til, skulu takast við í frágreiðingina til løgtingsgrannskoðararnar.

Frágreiðingin skal sendast landsstýrismanninum til viðmerkingar til tess at tryggja, at tað tilfar, sum verður latið løgtingsgrannskoðarunum, verður so objektivt rætt sum gjørligt, og at eisini landsstýrismaðurin fær høvi at lýsa síni sjónarmið.

[1] Tó ikki hjá teimum har tað í lóg, kunngerð, viðtøkum, siðvenju e.l. er ásett, at grannskoðanin verður útint av løggildum ella skrásettum grannskoðarum.

Niðanfyri er ein mynd av samskiftinum millum Landsgrannskoðanina og nevndu myndugleikar.



0.3 Framløga

Sambært § 12, stk. 2, í grannskoðanarlógini skal roknskapargrannskoðanin innan 10 mánaðir eftir fíggjarárslok lata løgtingsgrannskoðarunum frágreiðing um úrslitið av grannskoðanini.

Við hesum letur Landsgrannskoðanin løgtingsgrannskoðarunum ársfrágreiðing sína í sambandi við, at løgtingsgrannskoðararnir skulu leggja landsroknskapin 2014 fyri Løgtingið til samtyktar.

Frágreiðingin er løgd fyri tey landsstýrisfólk, sum nú umsita avvarðandi øki, til viðmerkingar. Møguligar viðmerkingar og fráboðanir frá landsstýrisfólkunum um tiltøk og ætlanir, frágreiðingin hevur elvt til, eru tiknar við.

Landsgrannskoðanin roknar grannskoðanina av landsroknskapinum 2014 sum lidna. Kortini kann Landsgrannskoðanin seinni fara at kanna mál og spurningar, sum viðvíkja bæði 2014 og eldri árum. Upplýsingar kunnu koma fram, sum elva til, at tey mál, sum eru umrødd í hesari frágreiðing, verða mett og viðgjørd av nýggjum.

Argir, 18. november 2015

Beinta Dam
landsgrannskoðari

1 Um frávik millum játtan og nýtslu

Sambært § 11, stk. 3, í grannskoðanarlógini skal hvør landsstýrismaður, í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok, greiða løgtingsgrannskoðarunum og Landsgrannskoðanini frá um frávik millum játtanartøl og roknskapartøl.

Í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok skal landsstýrismaðurin greiða frá um frávik.

Landsgrannskoðanin hevur gjøgnumgingið tilfarið fyri 2014 og hevur havt samskifti við avvarðandi landsstýrismenn og aðalráð um ymiskar spurningar.

Niðanfyri er frágreiðing um frávik millum játtan og nýtslu í fíggjarárinum 2014. Í frágreiðingini eru eisini viðmerkingar og frágreiðingar frá avvarðandi landsstýrismonnum um, hvørjar atvoldirnar eru til frávikini.

1.1 Løgmansfyrisitingin

Løgmansskrivstovan (rakstrarjáttan) 2.11.1.02

Játtaðar eru 41,2 mió.kr. Minninýtslan er 2,5 mió.kr. Talan er um eina høvuðskontu við fleiri undirkontum.

t.kr.

Undirkonta	Játtan	Roknskapur	Frávik
20. Vanligt virksemi	26.495	24.588	1.907
31. Sendistova Føroya til Bretlands og Írlands	2.612	2.733	-121
32. Sendistova Føroya til Danmarkar	3.310	3.609	-299
33. Sendistova Føroya til Evropasamveldið	2.558	2.609	-51
34. Sendistova Føroya til Íslands	2.024	2.381	-357
35. Felagsfyrisitingin í Tinganesi	1.425	1.891	-466
36. Sendistova Føroya til Russlands	2.000	476	1.524
50. Marknaðarføra Føroyar	800	407	393
Tilsamans	**41.224**	**38.694**	**2.530**

Sambært Løgmansskrivstovuni vórðu 7 mió.kr. játtaðar til gerðarættarmálini við ES í sambandi við handilstiltøk, sum samveldið hevði sett í verk mótvegis Føroyum í 2013. Við tað at semja fekst við ES miðskeiðis í 2014, varð játtanin til hetta endamál ikki nýtt fult út. Í eykajáttanarlógini fyri september 2014 varð játtanin lækkað 2,5 mió.kr. Hóast tað varð minninýtslan hjá Løgmansskrivstovuni góðar 1,9 mió.kr.

Ymsar útreiðslur (rakstrarútreiðslur) 2.14.1.01

Játtaðar eru 430 t.kr. á fleiri undirkontum. Minninýtslan er 200 t.kr.

t.kr.

Undirkonta	Játtan	Roknskapur	Frávik
20. Kunngerðarsavn og –blað	80	57	23
21. Lógarsavn	150	73	77
22. Dóms- og løgreglumál	150	50	100
26. Rættarhjálp Føroya	50	50	0
Tilsamans	**430**	**230**	**200**

Endurgjald til brotsverksoffur (lógarbundin játtan) 2.14.1.07
Meirnýtslan er 215 t.kr. 300 t.kr. eru játtaðar sum útreiðslur og 300 t.kr. sum inntøkur frá brotsmonnum. Ongin inntøka er.

1.2 Fíggjarmál

1.2.1 Meirnýtsla/frávik

Umvæling av almennum bygningum (løgujáttan) 3.11.1.56
Í fíggjarlógini eru játtaðar 25 mió.kr. Í eykajáttanarlógini fyri september 2014 varð játtanin lækkað 800 t.kr. Meirnýtslan er 311 t.kr. Landsstýrismaðurin hevur kunnað um, at tá ið talan er um gamlar bygningar, verður tíðum komið fram á ymisk viðurskifti, ið ikki tola at bíða, men mugu gerast, meðan arbeiðið er í gongd.

Minniinntøkan frá sølu av almennum bygningum gjørdist 3,5 mió.kr.

Almennir bygningar, søla (løgujáttan) 3.11.1.58
Játtaðar eru 9 mió.kr. í inntøku frá sølu av almennum bygningum. Minniinntøkan er 3.538 t.kr. Sambært landsstýrismanninum kom sølan í drag vegna ógreiða kunning um, hvørjar bygningar talan var um, tí onki stóð um tað í viðmerkingunum í fíggjarlógini.

Í september 2014 minti Fíggjarmálaráðið Landsverk á, at í mun til játtanina átti sølan at verða framd í 2014. Semja var um at royna at selja sethús, sum Landssjúkrahúsið hevði ræði á. Tað eydnaðist partvís, fýra sethús vórðu seld fyri 5,6 mió.kr. tilsamans.

Hagstova Føroya (rakstrarjáttan) 3.15.2.01
Í fíggjarlógini eru játtaðar 10,8 mió.kr. Meirnýtslan er 176 t.kr. Sambært landsstýrismanninum valdi Hagstovan at halda útreiðslur í 2014 fyri at gera Manntalsverkætlanina lidna, sjálvt um ongin játtan var til verkætlanina hetta árið. Ætlanin var at fíggja kostnaðin við sølu av hagtalsgreiningum og øðrum sertænastum, men sølan eydnaðist ikki sum ætlað. Fíggjarmálaráðið heldur ikki, at tað er ein nøktandi støða, og hevur samskift við Hagstovuna, sum í 2014 og 2015 hevur gjørt tillagingar í rakstrinum, ið minka lønarútreiðslurnar, soleiðis at játtanin í 2015 fer at halda.

Landsverk (rakstrarjáttan) 3.38.1.02
Játtaðar eru 60,1 mió.kr. Meirnýtslan er 236 t.kr. Talan er um eina høvuðskontu, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

Undirkonta	Játtan	Roknskapur	Frávik
20. Landsverksskrivstovan	8.000	8.123	-123
22. Byggi- og bygningsumsiting landsins	2.800	2.845	-45
30. Landsvegahald	43.070	42.557	513
35. Havnir	5.400	5.473	-73
38. Flogferðsla	830	828	2
40. Inntøkufíggjað virksemi	0	510	-510
Tilsamans	**60.100**	**60.336**	**-236**

Sambært landsstýrismanninum er meirnýtslan innan fyri tað, sum vanliga er óvissa við búsketti.

Rentur at gjalda (ógreinað játtan) 20.50.1.01
Í fíggjarlógini eru játtaðar 113 mió.kr. Meirnýtslan er 3,8 mió.kr.

Endurrindan av keyps-MVG (ógreinað játtan) 20.52.5.01
Í fíggjarlógini eru játtaðar 153 mió.kr. Meirnýtslan er 45,2 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum er játtanin tikin við undir “Inntøkum”, hóast játtanin er ein útreiðsla og er savnan av keyps-MVG av øllum útreiðslugreinum. Hann sigur, at orsøkin er, at tað er ein rættiliga greiður samanhangur og samsveiggj við játtanina

Metingin av keyps-MVG var ikki nóg neyv.

“Meirvirðisgjald”. Landsstýrismaðurin staðfestir, at metingin av endurrindan av keyps-MVG var ikki nóg neyv fyri 2014.

Sí eisini viðmerkingar frá Landsgrannskoðanini í brotinum 1.2.3.

1.2.2 Minninýtsla/frávik

Landsins ognir (rakstrarjáttan) 3.11.1.23

Í fíggjarlógini eru játtaðar 1.250 t.kr. í inntøkum. Játtanin er við eykajáttan í september 2014 lækkað 800 t.kr. Frávikið er 354 t.kr.

t.kr.

Undirkonta	Játtan	Roknskapur	Frávik
20. Oljugoymslur o.a.	-1.200	-1.200	0
21. Húsaleiga og íbúðargjald	-64	55	-119
22. Leiga av økjum, uppisitaraavgjald o.a.	14	16	-2
23. Yvirtiknar ognir	800	325	475
Tilsamans	**-450**	**-804**	**354**

Játtanin til undirkontu 21 er til at reka prestagarðin í Sandagerði, gamla Fiskivinnuskúlan í Vestmanna og bygningar í Akrabyrgi. Sambært landsstýrismanninum eru útreiðslurnar í høvuðsheitum til ravmagn og olju. Inntøkan er leiguinntøka frá prestagarðinum í Sandagerði umleið 20 t.kr. árliga.

Nýtslan á undirkontu 23 er til ognirnar, sum landið yvirtók frá Færøernes Kommando: Ognirnar á Sornfelli, tænastuhús í Tórshavn og bygningarnir í Mjørkadali. Tá ið landið yvirtók ognirnar, vórðu nakrar leigaðar út, tó ikki tænastuhúsini í Tórshavn. Leigumálini eru síðani flutt til landið, sum hevur roynt at leiga ein størri part av bygningunum í Mjørkadali út fyri at fáa raksturin at hvíla í sær sjálvum.

Nýggir landsvegir (løgujáttan) 3.38.1.07

Í fíggjarlógini 2014 er ein útreiðslujáttan 64,2 mió.kr. og ein inntøkujáttan 100 t.kr. Við fíggjarnevndarskjali 10. juli 2014 er játtanin lækkað 2,1 mió.kr. Við støðlingum frá 2013 var játtanin í 2014 tilsamans 84,3 mió.kr. Minninýtslan 11 mió.kr. er við átekning flutt til 2015.

Tær 62 mió.kr. til landsvegagerð 2014 vórðu játtaðar til 10 høvuðsendamál/verkætlanir. Landsstýrismaðurin hevur víst á, at Landsverk heldur seg sum meginreglu til tað, ið Løgtingið játtar til einstøku verkætlanirnar. Heimild er at flyta millum verkætlanirnar, tá ið játtað er á høvuðskontu. Eisini verða óbrúktar játtanir fluttar millum ár við átekning. Tað vísir seg altíð, at gongdin við nøkrum verkætlanum er øðrvísi enn játtað. Fyrireikingar eru ikki altíð lidnar, tá ið peningurin verður játtaður, tí verður peningurin ofta í fyrstu syftu brúktur til aðrar verkætlanir í fíggjarárinum, sum ganga betri og skjótari. Sambært landsstýrismanninum er tað eisini, sæð út frá einum samfelagsbúskaparligum og samfelagsligum sjónarhorni, besti háttur at brúka peningin, soleiðis at verkætlanirnar kunnu gerast lidnar uttan steðg, og nytta tískil skjótari fæst av løguni.

t.kr.

	Játtan 2014	Framflutt	Tilsamans	Brúkt	Meir-/ minninýtsla
Dagf. av brúm og tunlum	4.000	0	4.000	2.693	1.307
Veg. omanf. Skálafjørð	-2.100[2]	3.136	1.036	0	1.036
Innk.veg til Tórshavn	2.000	7.202	9.202	5.745	3.457
Trygdartiltøk o.a.	6.000	699	6.699	5.599	1.100
Vegagerð Kalsoy	3.800	-1.643	2.157	2.296	-139
Viðareiðistunnilin	37.500	6.130	43.630	43.657	-27
Í Oyrunum, Toftir	1.000	1.860	2.860	2.724	136
Valaknúkar/Gøtueiði	3.500	2.023	5.523	4.576	947
Ferðsluætlan Vágar	5.000	0	5.000	1.640	3.360
Íbind.við Sjógv í Kollafirði	0	1.705	1.705	1.743	-38
Signabøvegur	1.000	0	1.000	966	34
Veðurstøð Fámjinsv.	400	0	400	406	-6
Liðugtg. sm. verkætlanir	0	1.178	1.178	1.122	56
Søla, jørð til kommunur	-100	0	-100	0	-100
Tilsamans	**62.000**	**22.290**	**84.290**	**73.167**	**11.123**

Vegurin oman fyri Skálafjørð

Verkætlanin at gera ein umkoyringarveg um Skálafjørð varð boðin út fyri nøkrum árum síðani, men varð steðgað, tí hon vísti seg at gerast væl dýrari enn mett. Tøk játtan í 2014 er framflutt frá farnum fíggjarárum og verður partvíst brúkt til átrokandi verkætlanir.

Innkomuvegurin til Tórshavn

Játtanin varð brúkt til at gera brúgv um Klingruvegin. Arbeiðið byrjaði í mai/juni 2014. Tað bar ikki til at gera arbeiðið liðugt, áðrenn veturin kom. Arbeiðið heldur fram í 2015.

Trygdartiltøk

Játtanin varð brúkt til umleið 20 smærri verkætlanir. Arbeiðið við teimum flestu gekk sum ætlað.

Viðareiðistunnilin

Arbeiðið við farleiðini til Viðareiðis hevur gingið væl, og varð øll játtanin í 2014 brúkt í árinum.

Undir Valaknúkum, Undir Gøtueiði

Asfalteringin av vegnum varð útsett til 2015, og øll verkætlanin verður væntandi liðug í 2015.

Ferðsluætlan Vágar

Landsverk hevur í samstarvi við ávikavist Sørvágs kommunu og Vága kommunu gjørt eina ferðslutrygdarætlan. Arbeiðið at finna loysnir, hvussu best er at gera, at útvega jørð o.a., hevur tikið tíð.

[2] Lækking av játtan smbrt. fíggjarnevndarskjali

Havnir (løgujáttan) 3.38.1.14

Játtanin 2014 er 7,3 mió.kr. Saman við framfluttari játtan frá undanfarnum árum var játtanin 8,3 mió.kr. Minninýtslan er 2,3 mió.kr.

t.kr.

	Játtan 2014	Framflutt	Tilsamans	Brúkt	Meir-/ minninýtsla
Havnin í Svínoy	1.000	0	1.000	959	41
Smáábøtur	2.200	985	3.185	2.539	646
Havnin í Hvannasundi	2.000	0	2.000	722	1.278
Ruddað innsigling Skopun	2.100	0	2.100	1.741	359
Krambatangi				4	-4
Tilsamans	**7.300**	**985**	**8.285**	**5.965**	**2.320**

Smáábøtur

Útreiðslurnar til smáábøtur eru í høvuðsheitum farnar til at skifta anodur/fendarar út á Krambatanga. Harafturat eru ábøtur gjørdar á aðrar landshavnir.

Havnin í Hvannasundi

Ætlanin, at fáa stóran part av grótinum frá Viðareiðistunnilinum til havnaútbyggingina í Hvannasundi, kundi ikki lata seg gera í 2014, tí at tað í byrjanini vóru trupulleikar við vegagerðini til tunnilsinnslagið. Arbeiðið heldur fram í 2015.

Stuðul til infrakervið á útoyggj (stuðulsjáttan) 3.38.1.18

Í fíggjarlógini eru játtaðar 700 t.kr. Minninýtslan er 372 t.kr. Stuðul varð játtaður til 5 verkætlanir.

t.kr.

	Játtan	Brúkt	Meir-/minninýtsla
Asfaltering í Mykinesi	100	106	-6
Bilverja í Svínoy	50	50	0
Asfaltering í Svínoy	150	150	0
Ábøtur tangagarð í Mykinesi	100	22	78
Lending Trøllagjógv	300	0	300
Tilsamans	**700**	**328**	**372**

Lendingin í Trøllagjógv

Tær 300 t.kr. til ábøtur og leingjan av lendingini í Trøllagjógv í Hattarvík vórðu ikki nýttar vegna vánaligt veður farna vetur, og tá ið summarið kom, eydnaðist ikki at fáa nakran arbeiðstakara at átaka sær arbeiðið.

1.2.3 Meirinntøkur/frávik

Sambært landsstýrismanninum er meginreglan, at biðið verður ikki um eykajáttan fyri játtanirnar á § 20 ”Inntøkur”, heldur ikki útreiðslujáttanirnar. Landsstýrismaðurin vísir til eina munnliga avtalu millum fíggjarnevnd løgtingsins og landsstýrismannin í fíggjarmálum í 2002/2003 um ikki longur at taka við meirinntøkur, sum seinni hóast alt verða staðfestar í landsroknskapinum. Landsstýrismaðurin heldur, at sostatt má tað sama vera galdandi fyri minniinntøkur, meirútreiðslur og minniútreiðslur á § 20.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum heldur, tað er ikki neyðugt at biða um eykajáttan fyri játtanir á § 20.

Landsstýrismaðurin vísir eisini á, at umrødda avtala er viðgjørd í frágreiðing frá Fíggjarmálaráðnum til løgmann 27. apríl 2014, sum Fíggjarnevndin hevði biðið um í sambandi við viðgerðina av løgtingsmáli 68/2014: “Uppskot til samtyktar um grannskoðan av almennum roknskapum - Góðkenning av Landsroknskapinum fyri fíggjarárið 2013.”

Landsstýrismaðurin heldur, at talan sostatt í høvuðsheitum er um játtanir, ið eru heimildir at hava inntøkur bygdar á metingar, sum skulu vera so neyvar og veruleikakendar sum gjørligt. Metingarnar verða grundaðar á søguliga gongd, kend viðurskifti og metingar um búskapargongdina og gongdina í vinnugreinum.

Landsstýrismaðurin heldur, at játtanirnar eru heimildir at byggja á metingar.

Sum víst á í okkara frágreiðing í september 2014, er Landsgrannskoðanin ikki samd við landsstýrismanninum, tí vit duga ikki at síggja, hvar heimildin er fyri hesari tulking.

Landsgrannskoðanin dugir ikki at síggja heimild fyri hesari tulking.

Í uppskoti til samtyktar – Lm.nr. 68/2014 – hildu løgtingsgrannskoðararnir tað als ikki vera nøktandi, at landsstýrismaðurin nýtir eina meginreglu, sum eftir øllum at døma ikki hevur nakra heimild.

"Løgtingsgrannskoðararnir halda, at um frávik eru á játtanum á § 20, eigur sjálvsagt at verða biðið um eykajáttan."

Rentuinntøkur av innistandandi (ógreinað játtan) 20.50.2.01
Játtaðar eru 17 mió.kr. Meirinntøkurnar vóru 71,9 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum er orsøkin, at mett varð, at rentustøðið fór at hækka við samsvarandi kursbroyting, tað hendi tó ikki. Meðan rentuútreiðslurnar broyttu uppgerðarhátt í 2011, so verða rentuinntøkurnar framvegis nógv ávirkaðar av kurssveiggjum.

Vanligur landsskattur (ógreinað játtan) 20.52.1.01
Játtaðar eru 1.235 mió.kr. Meirinntøkan er 52,3 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum er orsøkin til meirinntøkuna størri vøkstur í búskapinum, enn mett varð í fíggjarlógini.

Meirvirðisgjald (ógreinað játtan) 20.52.2.01
Játtaðar eru 1.265 mió.kr. Meirinntøkan er 50,3 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum er orsøkin til meirinntøkuna størri vøkstur í búskapinum 2014, enn mett varð í fíggjarlógini.

Skattur av pensjónsinngjøldum (ógreinað játtan) 20.52.1.14
Játtaðar eru 252 mió.kr. Meirinntøkan er 14,4 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum er orsøkin til meirinntøkuna størri vøkstur í búskapinum, enn mett varð í fíggjarlógini.

Skrásetingargjald (ógreinað játtan) 20.52.2.19
Játtaðar eru 110 mió.kr. Meirinntøkan er 14,4 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum er orsøkin til meirinntøkuna størri búskaparvøkstur, enn mett varð í fíggjarlógini.

1.2.4 Minniinntøkur/frávik

Felagsskattur (ógreinað játtan) 20.52.1.07

Minniinntøkan av felagsskatti er 34,3 mió.kr.

Játtaðar eru 205 mió.kr. Minniinntøkan er 34,3 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum er høvuðsorsøkin lægri felagsskattur frá alivinnuni.

Tilfeingis/loyvisskattur (ógreinað játtan) 20.52.1.09

Minniinntøkan av tilfeingis/loyvisskatti er 11,2 mió.kr.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 63 mió.kr. Í eykajáttanarlógini fyri mars 2014 varð játtanin lækkað 45,5 mió.kr., til 17,5 mió.kr. Minniinntøkan er 11,2 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum er orsøkin ov nógv goldin tilfeingis/loyvisskattur sambært fyribilsuppgerð 2013, sum landskassin mátti rinda aftur við endaliga álíkning í 2014.

Útluting frá partafeløgum og grunnum (ógreinað játtan) 20.52.3.04
Í fíggjarlógini eru játtaðar 46,5 mió.kr. Í eykajáttanarlógini fyri mars 2014 varð játtanin hækkað 8,4 mió.kr. Minniinntøkan er 16,7 mió.kr. Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at orsøkin serstakliga er, at Realurin ikki hevur rindað útlutingina, hóast Realurin hevði avlop eftir skatt á 32,2 mió.kr. í roknskapinum 2013/2014, og hóast fleiri áheitanir frá Fíggjarmálaráðnum til stjórn Realsins um vantandi útlutingina. Fíggjarmálaráðið umhugsar, hvussu víðari skal farast fram í málinum.

1.3 Fiskivinnumál

1.3.1 Meirnýtsla/frávik

Náttúrufriðingarnevndir (rakstrarjáttan) 5.30.1.07

Í fíggjarlógini eru játtaðar 315 t.kr. Meirnýtslan er 38 t.kr. Landsstýrismaðurin hevur kunnað um, at tað kann vera torført at meta um tørvin á játtan, tá ið útreiðslurnar til náttúrufriðingarnevndir eru tongdar at, hvussu nógv mál verða løgd fyri nevndirnar, og hvussu nógvar fundir tær hava. Árini 2010 til 2014 hevur miðalnýtslan verið 340 t.kr. Meirnýtslan stavar frá, at nevndirnar hava havt fleiri fundir, enn tær fyrr hava havt í eitt miðalár.

Fiskivinnuráð og nevndir (rakstrarjáttan) 5.34.1.01

Í fíggjarlógini eru játtaðar 441 t.kr. Meirnýtslan er 60 t.kr. Sambært landsstýrismanninum verða útreiðslur til samráðingarráðið skrásettar á hesa høvuðskontuna, og møguliga er onkur rokning komin við, ið hoyrir til vanliga virksemið hjá ráðnum. Fiskimálaráðið hevur havt nógv virksemi á samráðingarøkinum í 2014, tí hava útreiðslurnar til samráðingarráðið verið høgar.

Fiskiveiðieftirlitið (rakstrarjáttan) 5.34.2.01

Játtaðar eru 29,2 mió.kr. Meirnýtslan er 516 t.kr. Sambært landsstýrismanninum er orsøkin til meirnýtsluna, at bøtur frá 2011 eru avskrivaðar.

1.3.2 Minninýtsla/frávik

Spilloljureinsing (stuðulsjáttan) 5.30.1.10

Í fíggjarlógini eru játtaðar 3,5 mió.kr. Minninýtslan er 745 t.kr. Sambært landsstýrismanninum er orsøkin til minninýtsluna, at rokningin fyri 4. ársfjórðing 2014 er bókað í 2015, og at tað tí kann roknast við meirnýtslu í 2015.

Lánsafturgjald (stuðulsjáttan) 5.30.3.01

Í fíggjarlógini eru játtaðar 3,9 mió.kr. í nettoinntøkum. Meirinntøkan er 242 t.kr. Sambært landsstýrismanninum vórðu ávísar kontur hjá Innlendismálaráðnum fluttar til Fiskimálaráðið at umsita. Tað gjørdi, at játtanin “Lánsafturgjald” í hesum skiftinum ikki varð stillað rætt fyri 2014. Tað er nú fingið í rættlag, soleiðis at inntøkujáttanin hækkar við umleið 100 t.kr. um árið komandi árini.

Træplanting (stuðulsjáttan) 5.33.2.05

Í fíggjarlógini eru játtaðar 250 t.kr. Minninýtslan er 88 t.kr. Sambært landsstýrismanninum er orsøkin til minninýtsluna, at stuðul, ið var játtaður í 2014, av misgáum varð bókaður í 2015. Tí kann roknast við einari tilsvarandi meirnýtslu í 2015.

Flutningsstuðul (lógarbundin játtan) 5.34.4.22

Í fíggjarlógini eru játtaðar 2,5 mió.kr. Í eykajáttanarlógini fyri september 2014 varð játtanin lækkað 600 t.kr. Minninýtslan er 764 t.kr. Sambært landsstýrismanninum stavar minninýtslan frá, at minni av botnfiski kemur upp á land, og tørvurin á flutningi er tískil minni.

1.4 Vinnumál

1.4.1 Meirnýtsla/frávik

Rúsdrekkasøla landsins (rakstrarjáttan) 6.37.3.01

Í fíggjarlógini er roknað við avlopi á 16,8 mió.kr. Avlopið varð 198 t.kr. lægri.

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at høvuðsorsøkin til minniavlopið er ein eyka lønarútreiðsla 500 t.kr., eftir at ein ósemja frá 2013 ímillum Fíggjarmálaráðið og fakfelag um tulking av sáttmála varð løgd fyri Fasta Gerðarrættin við tí úrsliti, at

starvsfólk fingu lønarhækking afturvirkandi. Avgerðin fall á sumri 2014, tá var ov seint at tillaga virksemið við virknaði fyri 2014. Eftir tað hevur leiðslan tillagað virksemið við at minka starvsfólkatalið og skipa leiðsluna av nýggjum. Meginparturin av eykaútreiðsluni er spardur inn aftur við m.a. at útseta viðlíkahald og førleikamenning til seinni játtanarár. Landsstýrismaðurin fekk ikki undirtøku fyri at lata Løgtinginum umbøn um eykajáttan at lækka avlopskravið.

Meirnýtslan á 10 mió.kr. í 2014 stavar í høvuðsheitum frá gomlum árum.

Strandfaraskip landsins (rakstrarjáttan) 6.38.2.01

Í fíggjarlógini eru játtaðar 141,6 mió.kr. Í eykajáttanarlógunum fyri september og desember 2014 varð játtanin hækkað við ávikavist 2,9 mió.kr. og 950 t.kr. Meirnýtslan er 10 mió.kr.

t.kr.

Undirkonta	Játtan	Roknskapur	Frávik
20. Landsfyritøka	145.425	145.686	-261
39. Óvanligt	0	9.894	-9.894
Tilsamans	**145.425**	**155.580**	**-10.155**

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at tá ið Gjaldstovan skuldi gera ársroknskapin fyri 2014 upp, varð komið eftir, at primopostarnir hjá Strandfaraskipum landsins ikki stemmaðu við upphæddirnar, sum vóru latnar Gjaldstovuni undanfarin ár.

Eftir at Gjaldstovan saman við Strandfaraskipum landsins og grannskoðaranum hevði kannað málið, vísti tað seg, at síðani 2007 høvdu tað verið tríggjar kontur, har rørslur vóru á, sum ikki høvdu verið innrapporteraðar til Gjaldstovuna. Talan var um bókingar í tíðarskeiðinum 2007 til 2013. Fyri 2007 3,2 mió.kr., 2008 4,4 mió.kr., 2012 1 mió.kr. og 2013 1,2 mió.kr. Á henda hátt er eitt hall arbeitt upp, sum ikki er útreiðsluført í landsroknskapinum. Samanlagt var talan um 9,9 mió.kr.

Strandfaraskip landsins og Gjaldstovan hava latið Vinnumálaráðnum eina frágreiðing um málið.

Semingsmannaskipanin (rakstrarjáttan) 6.39.1.01

Í fíggjarlógini eru játtaðar 300 t.kr. Meirnýtslan er 78 t.kr. Landsstýrismaðurin hevur víst á lógarkravdu skylduna hjá Semingsstovninum og kunnað um, at Semingsstovnurin í tveimum førum í desember fekk áheitanir at hjálpa til at fáa semju. Landsstýrismaðurin bað um undirtøku fyri at lata Fíggjarnevndini fíggjarnevndarskjal um meirjáttan ella lata Løgtinginum umbøn um eykajáttan, tí játtanin fór ikki at halda. Landsstýrismaðurin fekk ikki undirtøku.

1.5 Mentamál

1.5.1 Meirnýtsla/frávik

Leiklist (rakstrarjáttan) 7.24.2.06

Í fíggjarlógini eru játtaðar 5,5 mió.kr. Meirnýtslan er 66 t.kr. Sambært landsstýrismanninum er inntøka, sum hoyrir til 2014, av misgáum bókað í 2015.

1.5.2 Minninýtsla/frávik

Skúlabókagerð (rakstrarjáttan) 7.23.1.13

Í fíggjarlógini eru játtaðar 507 t.kr. Minninýtslan er 160 t.kr. Sambært landsstýrismanninum vórðu verkætlanir, ið ætlanin var at játta pening til, ikki lidnar í 2014.

Prótvøkur (rakstrarjáttan) 7.23.1.31

Í fíggjarlógini eru játtaðar 9,4 mió.kr. Minninýtslan er 177 t.kr. Sambært landsstýrismanninum er orsøkin, at rokningin úr Danmark fyri prótvøkuuppgávur gjørdist minni enn upprunaliga mett, og tí at tað vórðu gjørd færri royndarsett til nýggju miðnámsskúlaskipanina í 2014.

Miðnámsútbúgvingar (rakstrarjáttan) 7.23.3.05

Í fíggjarlógini eru játtaðar 203,1 mió.kr. Minninýtslan er 1,2 mió.kr.

t.kr.

Undirkonta	Játtan	Roknskapur	Frávik
20. Studentaskúlin og HF-skeiðið í Eysturoy	23.500	23.435	65
21. Føroya Studentaskúli og HF-skeið	58.950	58.773	177
22. Klaksvíkar HF-skeið	4.400	4.284	116
23. Miðnámsskúlin í Suðuroy	11.200	11.104	96
24. Føroya Handilsskúli	35.700	35.827	-127
25. Tekniski skúlin í Tórshavn	31.100	31.601	-501
26. Tekniski skúlin í Klaksvík	17.950	17.329	621
27. Fiskivinnuskúlin, vanligt virksemi	5.700	5.737	-37
28. Felags fyri miðnámsskúlar	9.389	8.579	810
30. Heilsuskúli Føroya	5.200	5.230	-30
40. Fiskivinnuskúlin, inntøkufíggjað virksemi	0	0	0
Tilsamans	**203.089**	**201.899**	**1.190**

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at minninýtslan 1,2 mió.kr. stavar serliga frá minni virksemi á felagsjáttanini fyri miðnámsskúlar, m.a. til langtíðarsjúku, verkligt pedagogikum og sernámsfrøðiligan stuðul.

Maritimir skúlar (rakstrarjáttan) 7.23.6.05

Í fíggjarlógini eru játtaðar 27,5 mió.kr. Minninýtslan er 1,2 mió.kr.

t.kr.

Undirkonta	Játtan	Roknskapur	Frávik
20. Vinnuháskúlin	20.685	21.830	-1.145
22. Sjónám (Klaksvíkar sjómansskúli)	3.700	3.396	304
23. Sjónám (Trygdarmiðstøðin og skeiðsvirksemi)	1.500	1.407	93
30. Føroya Brandskúli	1.600	1.254	346
40. Inntøkufíggjað virksemi	1	-1.590	1.591
Tilsamans	**27.486**	**26.296**	**1.190**

Sambært landsstýrismanninum stavar minninýtslan í høvuðsheitum frá størri inntøkum, enn roknað varð við. Vinnuháskúlin nýtti áleið 1,1 mió.kr. meira enn væntað, av tí at skúlin keypti simulaturútgerð. Meirnýtslan er fíggjað við avlopinum á undirkontu 40 “Inntøkufíggjað virksemi.” Sjónám (Klaksvíkar sjómansskúli) hevði eitt avlop á 304 t.kr., orsakað av at dekkaraútbúgvingin gjørdist nakað bíligari enn mett. Avlopið slakar 1,6 mió.kr. av inntøkufíggjaðum virksemi kemst í høvuðsheitum av, at óvanliga nógv luttóku á skeiðum sambært STCW-krøvum.

Lestrarstuðul (lógarbundin játtan) 7.23.7.04

Í fíggjarlógini eru játtaðar 123,9 mió.kr. Í eykajáttanarlógini fyri september 2014 varð játtanin lækkað 1,4 mió.kr. Minninýtslan er 2,3 mió.kr.

t.kr.

Undirkonta	Játtan	Roknskapur	Frávik
01. Stuðulsveitingar	111.977	109.836	2.141
03. Studningur til læruplass	10.484	10.286	198
04. Gjald fyri lærusáttmálar	-750	-789	39
05. Ferðaendurgjald til læruplass	767	819	-52
Tilsamans	**122.478**	**120.152**	**2.326**

Sambært landsstýrismanninum stavar minninýtslan frá, at útreiðslurnar til skúlagjøld fyri tey, ið lesa uttan fyri Norðurlond, gjørdust minni enn mett, tí talið av lesandi í ÚSUN-skipanini hevur verið lækkandi. Harafturat er nýtslan til lesandi á hægri útbúgvingum í Føroyum nakað lægri enn upprunaliga mett. Frávikini í endurgjaldi fyri lærusáttmálar eru grundað á, at tað er torført at siga, hvussu nógvir lærusáttmálar verða gjørdir á hvørjum ári.

Lestrarlán (stuðulsjáttan) 7.23.7.05
Í fíggjarlógini eru játtaðar 2,6 mió.kr. Í eykajáttanarlógini fyri september 2014 varð játtanin lækkað 800 t.kr. Minninýtslan er 1.784 t.kr. Sambært landsstýrismanninum gjørdist afturgjaldingin av lánum um 1 mió.kr. hægri og rentuinntøkurnar um 300 t.kr. hægri enn mett. Harumframt vórðu 300 t.kr. minni læntar út.

Søvn landsins (rakstrarjáttan) 7.24.3.03
Í fíggjarlógini eru játtaðar 25 mió.kr. Í eykajáttanarlóg apríl 2014-2 varð játtanin hækkað 700 t.kr. Minninýtslan er 753 t.kr. Sambært landsstýrismanninum stavar minninýtslan í høvuðsheitum frá játtanini til Koltursætlanina, sum vegna vantandi materiella heimildarlóg ikki varð brúkt.

Kringvarp Føroya (rakstrarjáttan) 7.24.4.06
Í fíggjarlógini eru játtaðar 900 t.kr. til at talgilda bandasavnið. Minninýtslan er 85 t.kr. og stavar sambært landsstýrismanninum frá, at verkætlanarleiðarin fyri talgilding av bandasavninum ikki byrjaði í starvinum fyrr enn í mars.

Føroysk sjómanskirkja (stuðulsjáttan) 7.24.5.02
Í fíggjarlógini eru játtaðar 100 t.kr. Minninýtslan er 560 t.kr. Sambært landsstýrismanninum flutti Føroyska Sjómanskirkjan óbrúktan stuðul aftur vegna minni virksemi.

1.6 Heilsumál

1.6.1 Meirnýtsla/frávik

Heilsutrygdarveitingar (rakstrarjáttan) 11.20.2.03

Meirnýtslan til heilsutrygdarveitingar er 2,3 mió.kr.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 148,4 mió.kr. Í eykajáttanarlógini fyri september 2014 varð játtanin hækkað 4,6 mió.kr. Meirnýtslan er 2,3 mió.kr. Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at útreiðslugongdin seinna hálvár var munandi øðrvísi enn mett. Talan er í flestu førum um lógarbundnar útreiðslur.

Útreiðslur til heilivág eru øktar við 7,4 mió.kr. í 2014 í mun til 2013. Høvuðsorsøkirnar eru, at útreiðslurnar til diabetis- og blóðtynnandi heilivág eru nógv øktar, og at nógvar merkjavørur komu undir reglurnar um resept, sum Heilsutrygd tí fær skyldu at endurrinda fyri. Útreiðslurnar til hjálparráð øktust frá 8,8 mió.kr. í 2013 til 10,8 mió.kr. í 2014. Serliga eru tað útreiðslurnar til hjálparráð í sambandi við diabetis, sum eru øktar.

Útreiðslurnar til læknahjálp eru lækkaðar frá 46,6 mió.kr. í 2013 til 45 mió.kr. í 2014. Heilsumálaráðið heldur, at orsøkin m.a. er, at Heilsutrygd hevur ment eina teldu-skipan til avrokning av kommunulæknahjálp. Ávíst eftirlit er bygt inn í skipanina, eins og Heilsutrygd hevur framt stakgreinaeftirlit hjá nøkrum kommunulæknum.

Í talvuni niðanfyri sæst býtið av útreiðslunum í 2013 og 2014:

t.kr.

Heiti	R 2013	R 2014	J 2014	Munur
Læknahjálp	46.600	45.006	43.043	-1.963
Endurgjald fyri brillur	1.227	1.164	1.281	117
Endurgjald fyri jarðarferðarhjálp	1.718	1.852	1.932	80
Endurgjald fyri flutningsútreiðslur	24	12	14	2
Serlæknahjálp	4.350	3.197	2.916	-281
Tannviðgerð	17.304	17.836	18.026	190
Fysiurgisk viðgerð	6.529	6.866	5.709	-1.157
Kiropraktor	144	137	107	-30
Ergoterapi	513	490	390	-100
Sálarfrøðingar	562	673	636	-37
Eftirbataheim	509	545	493	-52
Fótarøkt	2.369	2.703	2.619	-84
Hjálparráð	8.849	10.801	11.061	260
Heilivágur	56.181	62.958	64.076	1.118
Eftirútbúgving og gransking	983	1.010	682	-328
Tilsamans	**147.862**	**155.250**	**152.985**	**-2.265**

Landssjúkrahúsið (rakstrarjáttan) 11.20.3.04

Í fíggjarlógini eru játtaðar 397,6 mió.kr. Í eykajáttanarlógini fyri apríl 2014 varð játtanin hækkað við 0,9 mió.kr. Meirnýtslan er 4,1 mió.kr.

Landssjúkrahúsið hevði 4,1 mió.kr. meirnýtslu.

Sambært landsstýrismanninum er orsøkin til meirnýtsluna, at talið av kanningum innan rannsóknarstovu- og røntgenøkið og útreiðslurnar til serligan heilivág hava verið hægri, umframt at virksemi annars er økt. Harafturat varð psykiatriska búdeildin ikki riggað av sum ætlað, og tí kundi ætlaða sparingin ikki fremjast. Játtanin til Landssjúkrahúsið hevur verið tepur til verandi virksemi, og tað gjørdist ikki greitt fyrr enn seinast í árinum, at talan fór at verða um eina meirnýtslu.

Suðuroyar sjúkrahús (rakstrarjáttan) 11.20.3.15

Í fíggjarlógini eru játtaðar 53,8 mió.kr. Meirnýtslan er 343 t.kr. Sambært landsstýrismanninum er orsøkin til meirnýtsluna kostnaðarmikil heilivágur og meirútreiðslur til uttanhýsis rannsóknarstovukanningar. Hóast roynt varð at halda aftur í øðrum útreiðslum, ætlaðar til innbúgv, tól v.m., varð talan um meirnýtslu.

Serstakur sjúkrahúsheilivágur (rakstrarjáttan) 11.20.3.19

Í fíggjarlógini vórðu játtaðar 38 mió.kr. Í eykajáttanarlógini fyri september 2014 varð játtanin hækkað 2,5 mió.kr. Meirnýtslan er 953 t.kr. Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at við eykajáttanini í november vóru útlitini væl betri, enn endaliga nýtslan varð. Tó gjørdist desember 2014 dýrasti mánaði higartil. Orsøkin er serliga vøksturin í heilivági, umframt at útreiðslurnar til dialysu hava verið høgar.

1.6.2 Minninýstsla/frávik

KT-øki heilsuverksins (rakstrarjáttan) 11.11.1.55

Í fíggjarlógini eru játtaðar eru 7,3 mió.kr. Í eykajáttanarlógini fyri september 2014 varð játtanin hækkað 500 t.kr. Minninýtslan var 559 t.kr. Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at alneyðugt var at fáa 500 t.kr. í eykajáttan at endurnýggja trygdaravritsskipanina til Talgildu heilsuskipanina. Við grundarlagi í gongdini í 2013 vórðu fíggjarlig fyrivarni tikin fyri, at skipanin kundi fáa brúk fyri eins nógvum bráðfeingis tænastum frá uttanhýsis veitarum í 2014, um hon óvæntað gjørdist óvirkin, eins og hon gjørdist í 2013. Tað hendi tíbetur ikki. Ætlanin at dagføra skipanina er komin í drag, tí fellur ein partur av útreiðslunum í 2015. Harumframt hava starvsfólk verið í óløntum farloyvi.

Koppsetingar (lógarbundin játtan) 11.20.1.10

Í fíggjarlógini var játtanin 4,9 mió.kr. Í eykajáttanarlógini fyri september 2014 varð játtanin lækkað 1,3 mió.kr. Minninýtslan er 382 t.kr. Sambært landsstýrismanninum er tað tí, at færri taka av tilboðnum at lata seg koppseta enn undanfarin ár.

Heilsutrygd (rakstrarjáttan) 11.20.2.02

Í fíggjarlógini eru játtaðar 7,4 mió.kr. Minninýtslan er 297 t.kr. Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at avlopið stendst av, at skipanin er broytt soleiðis, at Landsapotekarin rindar kostnaðin av tilskotsnevndini og skrivaranum.

Kommunulæknaskipanin (rakstrarjáttan) 11.20.2.04

Í fíggjarlógini eru játtaðar 10,2 mió.kr. Minninýtslan er 516 t.kr. Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at orsøkin til minninýtsluna er m.a., at ein kommunulækni hevur verið í farloyvi í eitt tíðarskeið, og ein er givin á sumri 2014. Nakrar viðtalur hava ikki verið mannaðar við kommunulæknum í føstum starvi partar av árinum, størri upphædd fyri grundgjald er flutt til Kommunulæknaskipanina, og útreiðslurnar til bilaleigu hava verið lægri enn væntað. Harafturímóti er ein regulering útgoldin vegna vantandi eftirløn av frítíðarløn hjá viðtalustarvsfólkum 5 ár aftur í tíð.

Økisheilsuskipanin (rakstrarjáttan) 11.20.2.06

Ætlaða Økisheilsuskipanin varð seinkað.

Upprunaliga var játtanin 2,5 mió.kr. Í eykajáttanarlógini fyri september 2014 varð játtanin lækkað við einari mió.kr. Minninýtslan er 951 t.kr. Sambært landsstýrismanninum varð biðið um, at játtanin varð lækkað, tí arbeiðið at greina, hvussu skipanin skuldi virka, dróg út.

Apoteksverkið (rakstrarjáttan) 11.20.2.08

Játtaðar eru 4 mió.kr. í inntøkum í eykajáttanarlóg fyri september 2014. Upprunaliga var nettojáttanin 0 mió.kr. Avlopið varð 5,4 mió.kr. Minninýtslan er 1.417 t.kr. netto. Sambært landsstýrismanninum stendst tað av hægri umsetningi innan heilsutrygd, alivinnu og serstøkum sjúkrahúsheilivági.

Medicoteknisk tól (løgujáttan) 11.20.3.06

Í fíggjarlógini eru játtaðar 9 mió.kr. Minninýtslan er 971 t.kr. Sambært landsstýrismanninum eru dialysutól ikki keypt til Klaksvíkar sjúkrahús sum ætlað.

Landssjúkrahúsið, útbygging (løgujáttan) 11.20.3.08

Í 2014 eru játtaðar 25 mió.kr. 5,3 mió.kr. eru fluttar frá eldri árum. 18 mió.kr. eru fluttar til 2015. Sambært landsstýrismanninum hevur verið trupult at fáa gongd á prosjekteringina, tí varð ætlaða samsýningin til ráðgeving ikki nýtt. Eftir ætlan verður liðugt at grava út á sumri 2015, og spreinging/planering byrjar um ársskifti 2015/16. Stóra arbeiðið verður boðið út á vári 2016 og sett í verk á sumri 2016. Bygningurin skal eftir ætlan takast í nýtslu í februar 2019.

Serviðgerð uttanlands (rakstrarjáttan) 11.20.3.20

Játtaðar eru 143,3 mió.kr. Upprunaliga var játtanin 137,2 mió.kr. Í eykajáttanarlógini fyri apríl 2014 varð játtanin lækkað 900 t.kr. og síðani hækkað aftur við eykajáttanarlógini fyri august 2014 við 7 mió.kr. Minninýtslan er 6 mió.kr.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur hesar undirkontur:

t.kr.

Undirkonta		Játtan	Roknskapur	Frávik
20.	Vanligt virksemi			
	Útreiðslur	110.777	105.834	4.943
	Inntøkur	-8.200	-8.200	0
	Vanligt virksemi tilsamans	*102.577*	*97.634*	*4.943*
22.	Flutningur og uppihald	24.000	22.164	1.836
23.	Sjúklingahotellið Tórshavn			
	Útreiðslur	18.420	19.309	-889
	Inntøkur	-1.700	-1.921	221
	Sjúklingahotellið tilsamans	*16.720*	*17.388*	*-668*
Tilsamans		**143.297**	**137.186**	**6.111**

Undirkonta 20. Serviðgerð uttanlands – Vanligt virksemi

Sambært landsstýrismanninum stavar minninýtslan 4,9 mió.kr. frá, at færri sjúklingar vórðu sendir av landinum enn væntað, og talið av sjúklingaferðum og fylgjarum lækkaði. Ein týðandi orsøk var, at møguleiki hevur verið at gjørt fleiri skurðviðgerðir á Landssjúkrahúsinum, sum annars vórðu gjørdar uttanlands. Hesar heimtøkur vóru ikki millumroknaðar. Talan er um viðgerðir fyri umleið 2,5 mió.kr.

Tað er trupult at gera framrokningar og meta um nýtslu, tí stórur partur av rokningunum fyri uttanlandsviðgerð koma seint, harav fleiri rokningar koma eftir ársenda. Tískil er trupult at meta um endaligu nýtsluna í mun til játtanina. Í talvuni niðanfyri sæst, hvussu lutfalsliga stórur partur av rokningunum varð skrásettur í roknskapartíðarskeiði 13 og seinni:

Ár	2008	2009	2010	2011	2012	2013	2014
Pros. skrásett í tíðarsk. 13 og seinni	20%	15%	14%	17%	15%	30%	24%

Fíggjarliga ábyrgdin av játtanini til viðgerðir uttanlands varð á sumri 2013 flutt til sjúkrahúsini. Broytingin hevur við sær, at ávísingarrætturin og fíggjarliga ábyrgdin eru tættari hvør at øðrum. Játtanin til viðgerðir uttanlands er við fíggjarlógini 2015 løgd undir høvuðskontu 11.20.3.04 Landssjúkrahúsið.

Undirkonta 23 Serviðgerð uttanlands – Sjúklingahotellið Tórshavn

Meirnýtslan er 668 t.kr. Sambært landsstýrismanninum eru rakstrarútreiðslurnar til flutning, mat o.a. øktar, tí at talið av viðskiftafólkum er økt.

Sjúklingatrygging (lógarbundin játtan) 11.20.3.24

Í fíggjarlógini eru játtaðar 1 mió.kr. Minninýtslan er 509 t.kr. Kontan varð stovnað í 2012, og er skipanin lutfalsliga nýggj, tá ið hugsað verður um, at málsgongdin í sjúklingatryggingarmálum tíðum tekur nøkur ár. Tað er tí torført at meta um fíggjarligu nýtsluna. Um støði verður tikið í donskum tølum, roknar landsstýrismaðurin við, at í framtíðini verða um 5 mió.kr. um árið goldnar í endurgjaldi til sjúklingar.

Viðgerðarstovnurin Heilbrigdi (rakstrarjáttan) 11.20.4.02

Í fíggjarlógini eru játtaðar 5,7 mió.kr. Minninýtslan er 478 t.kr. Sambært landsstýrismanninum varð øll upphæddin til familjuviðgerð ikki brúkt, eins og endurgjald varð veitt fyri ein part av starvsfólkaútreiðslunum.

1.7 Almannamál

1.7.1 Minninýtsla/frávik

Almannamálaráðið (rakstrarjáttan) 12.11.1.26

Í fíggjarlógini eru játtaðar 13,9 mió.kr. Minninýtslan er 313 t.kr.

t.kr.

Undirkonta	Játtan	Roknskapur	Frávik
Vanligt virksemi	12.077	12.057	20
Ráð og nevndir	98	68	30
SSP-samstarv	380	350	30
Leigunevndin	235	193	42
Verkætlanir Almannamálaráðið	1.110	919	191
Tilsamans	**13.900**	**13.587**	**313**

Sambært landsstýrismanninum er minninýtslan í høvuðsheitum á undirkontu 27 “Verkætlanir”, 191 t.kr. Eitt av átøkunum snýr seg um viðgerðartilboð til børn, sum m.a. hava verið fyri kynsligum ágangi og øðrum harðskapi. Í september 2014 varð støða tikin til, at tilboðið skuldi verða framt í samstarvi millum Barnahúsið og Barnaverndarstovuna, og vórðu 200 t.kr. fluttar á kontu hjá Barnaverndarstovuni til endamálið við teirri treyt, at talan var um stuðul til rakstrarjáttanina, og kundi stuðulin ikki verða hægri enn útreiðslan, sum varð hildin í sambandi við átøkini í 2014.

Endalig uppgerð frá Barnaverndarstovuni vísti, at einans 46 t.kr. vórðu brúktar til endamálið, orsakað av at tað var so langt liðið út á fíggjarárið, tá ið tiltakið varð sett í verk.

Almannaverkið (rakstrarjáttan) 12.21.1.02

Í fíggjarlógini eru játtaðar 49,9 mió.kr. Minninýtslan er 638 t.kr. Sambært landsstýrismanninum stavar minninýtslan í høvuðsheitum frá, at inntøkufíggjað virksemi hevði eitt avlop á 625 t.kr.

KT- heildarskipan (rakstrarjáttan) 12.21.1.06

Í fíggjarlógini var ongin játtan til endamálið. Í eykajáttanarlógini fyri mars 2014 varð játtanin hækkað 1,6 mió.kr. í sambandi við, at seinkingar eru í verkætlanini. Minninýtslan er 1.860 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum vórðu um 2,4 mió.kr. støðlaðar í 2011, tí veitarin hevði boðað frá, at arbeiðið varð gjørt liðugt fyri hesa upphæddina. Seinni vísti tað seg, at arbeiðið einans partvíst varð latið Almannaverkinum, ímeðan ein partur varð latin og goldin í 2012 og 2013. Um 1,9 mió.kr. vórðu støðlaðar fyri arbeiði, sum ikki var gjørt. Upphæddin varð av misgáum ikki inntøkuført í 2013. Støðlaða upphæddin varð tí inntøkuført í 2014.

Barnapeningur veittur í forskoti (lógarbundin játtan) 12.21.3.04

Í fíggjarlógini eru játtaðar 1,9 mió.kr. Í eykajáttanarlógini fyri september 2014 varð játtanin lækkað 500 t.kr. Minninýtslan er 1.467 t.kr.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur tvær undirkontur:

t.kr.

Undirkonta	Játtan	Roknskapur	Frávik
Forskotsrindan	12.208	11.990	218
Innkrevjing av forskotsrindan av barnapeningi	-10.770	-12.019	1.249
Tilsamans	**1.438**	**-29**	**1.467**

Sambært Almannamálaráðnum er høvuðsorsøkin til frávikið, at tað gekst betur hjá TAKS at krevja inn í seinnu helvt av árinum, enn roknað var við.

Ættleiðingarstuðul (lógarbundin játtan) 12.21.3.13

Í fíggjarlógini eru játtaðar 975 t.kr. Í eykajáttanarlógini fyri september 2014 varð játtanin lækkað 425 t.kr. Minninýtslan er 200 t.kr. Sambært landsstýrismanninum er stuðul goldin 4 umsøkjarum í 2014. Orsøkin til minninýtsluna er langa bíðitíðin til ættleiðing. Um ársskiftið vóru um 25 mál í bíðistøðu.

Dagpeningaskipanin (lógarbundin játtan) 12.21.4.01

Í fíggjarlógini eru játtaðar 48 mió.kr. Í eykajáttanarlógini fyri september 2014 varð játtanin hækkað við 1 mió.kr. Minninýtslan er 2,1 mió.kr.

t.kr.

Undirkonta	Játtan	Roknskapur	Frávik
01. Løntakarar	50.155	48.089	2.066
02. Sjálvstøðug og húsarhaldsfólk	1.387	942	445
04. Gjald fyri læknaváttanir	969	923	46
09. Arbeiðsgevarans partur, dagpengar	-3.538	-3.141	-397
Tilsamans	**48.973**	**46.813**	**2.160**

Sambært landsstýrismanninum vóru útreiðslurnar til løntakarar seinastu mánaðirnar í árinum lægri, enn roknað var við. Samstundis vórðu endurgjøld fyri tryggingar hægri enn væntað.

Trivnaðartænastur (rakstrarjáttan) 12.21.6.09

Í fíggjarlógini eru játtaðar 239,7 mió.kr. Í eykajáttanarlógini fyri mars 2014 varð játtanin lækkað 1,6 mió.kr. Minninýtslan er 1,9 mió.kr., sum sambært landsstýrismanninum stavar frá undirkontu 21 “Virksemi uttanlands”, tí talan hevur verið um minni virksemi enn væntað.

t.kr.

Undirkonta	Játtan	Roknskapur	Frávik
20. Vanligt virksemi	218.264	218.395	-131
21. Virksemi uttanlands	19.831	17.778	2.053
Tilsamans	**238.095**	**236.173**	**1.922**

Bústovnar (løgujáttan) 12.21.6.02

Játtanin í fíggjarlógini var 32,3 mió.kr. Við eykajáttan var hon hækkað 1,4 mió.kr. Við teimum 37,4 mió.kr. frá árinum fyri vóru tilsamans 71,1 mió.kr. tøkar í 2014. 46,3 mió.kr. vórðu brúktar í árinum. Minninýtslan 24,8 mió.kr. er flutt til 2015.

Sambært landsstýrismanninum er óbrúkta játtanin til fimm verkætlanir, sum eru í gerð ella ikki eru endaliga uppgjørdar, t.e. Sambýli til sálarsjúk í Tórshavn, Stovnur í Eysturoynni til børn við fjølbreki, Sambýli til menningartarnað í Eysturoy, Sambýli til menningartarnað í Norðoyggjum og Virknis- og umlættingardepil í Sandoynni.

Fyritíðarpensjón (lógarbundin játtan) 12.21.8.05

Játtaðar eru 266 mió.kr. Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur. Minninýtslan á høvuðskontuni er 1.367 t.kr. Á undirkontu 01 “Hægsta fyritíðarpensjón” eru 5,3 mió.kr. meira brúktar, enn roknað varð við. Sambært landsstýrismanninum varð ikki søkt um eykajáttan, tí mett varð, at høvuðskontan fór at halda seg innan fyri fíggjarkarmin.

t.kr.

Undirkonta	Játtan	Roknskapur	Frávik
01. Hægsta fyritíðarpensjón	143.338	148.685	-5.347
02. Miðal fyritíðarpensjón	80.033	76.775	3.258
03. Lægsta fyritíðarpensjón	37.368	34.445	2.923
04. Avlamisveiting	3.873	3.657	216
05. Læknaváttanir	1.437	1.120	317
Tilsamans	**266.049**	**264.682**	**1.367**

Umsorganararbeiði (stuðulsjáttan) 12.21.8.08
Játtaðar eru 2,8 mió.kr. Minninýtslan er 78 t.kr. Sambært landsstýrismanninum vórðu 93 t.kr. í ikki útgoldnum stuðli í 2013 inntøkuførdar, tí er í veruleikanum talan um eina meirnýtslu 15 t.kr.

Stuðul til útoyggjamenning (stuðulsjáttan) 12.37.2.19
Í fíggjarlógini eru játtaðar 710 t.kr. Sambært landstýrismanninum er ikki útgoldin stuðul í 2014 umleið 111 t.kr. støðlaður, tí uppgerðir vanta frá móttakarunum. Síðani er komið fram, at ein partur av upphæddini ikki hevur verið brúktur til endamálið, og verður tí inntøkuførdur aftur í 2015. Tað bar ikki til at játta øðrum upphæddina, tí fráboðanin kom so seint.

1.7.2 Meirnýtsla/frávik

Lánsafturgjald (stuðulsjáttan) 12.11.2.07
Høvuðskontan er flutt frá § 15 Innlendismál í 2013. Alt lánið er goldið í 2013, tí er ongin inntøka í 2014.

Eldrarøkt (rakstrarjáttan) 12.21.6.04
Í fíggjarlógini eru játtaðar 355,2 mió.kr. Meirnýtslan er 2 mió.kr. Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at orsøkin til, at ikki varð søkt um eykajáttan, var, at Almannaverkið roknaði við, at rúm var í játtanini at avrokna alla eftirlønina, sum Landsgrannskoðanin í fleiri ár hevði gjørt vart við, at tímalønt starvsfólk høvdu tilgóðar. Seinast í árinum vísti tað seg, at ávís røktarheim, sum bóka í egnum bókhaldsskipanum, høvdu brúkt meira enn væntað, og er tað orsøkin til meirnýtsluna.

Ansingarsamsýning (lógarbundin játtan) 12.21.6.10
Upprunaliga var játtanin 12 mió.kr. Í eykajáttanarlógini fyri september 2014 varð játtanin lækkað 4 mió.kr. Meirnýtslan er 338 t.kr. Sambært landsstýrismanninum er høvuðsorsøkin til meirnýtsluna, at Almannaverkið hevur støðlað um 250 t.kr. í sambandi við møgulig krøv vegna mál, sum endalig støða ikki er tikin til, tá ið økið varð flutt til kommunurnar at umsita. Ein onnur orsøk er, at talið av teimum, sum fáa ansingarsamsýning, hevur verið støðugt minkandi, men seint í árinum hækkaði talið aftur.

Dugni – endurbúgving (rakstrarjáttan) 12.21.6.19
Í fíggjarlógini eru játtaðar 6 mió.kr. Meirnýtslan er 95 t.kr. Sambært landsstýrismanninum er høvuðsorsøkin til meirnýtsluna, at stjóraskifti var, og at rokningar, sum vórðu sendar til bókingar í september 2014, vórðu ikki bókaðar fyrr enn í februar 2015.

Vanlig forsorg (lógarbundin játtan) 12.21.7.01
Í fíggjarlógini var játtanin 123,6 mió.kr. Í eykajáttanarlógini fyri september 2014 varð játtanin hækkað 1 mió.kr. Meirnýtslan er 2,3 mió.kr.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

Undirkonta	Játtan	Roknskapur	Frávik
01. Fyribils hjálp § 9	29.829	31.134	-1.305
02. Varandi veiting § 13	910	813	97
03. Stakútreiðslur § 15	1.951	2.278	-327
04. Meirútreiðslur brekað barn § 17	12.475	12.434	41
05. Vard størv § 18	20.736	21.033	-297
06. Hjálparamboð v.m. § 18	22.941	22.745	196
07. Arbeiðsloysisforsorg § 9,2	30.093	31.228	-1.135
08. Trygdarskipanir § 16	1.905	1.385	520
09. Hoyritól	3.780	3.859	-79
Tilsamans	**124.620**	**126.909**	**-2.289**

01. Fyribilshjálp § 9
Í fíggjarlógini eru játtaðar 24,8 mió.kr. Við eykajáttan eru játtaðar tilsamans 29,8 mió.kr. Meirútreiðslan er 1,3 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum er høvuðsorsøkin til meirnýtsluna øktar útreiðslur vegna barnsburð og sjúku, og vóru útreiðslurnar í tíðarskeiðinum oktober til desember 2014 hægri, enn roknað varð við.

07. Arbeiðsloysisforsorg § 9,2
Í fíggjarlógini eru játtaðar 28,6 mió.kr. Saman við eykajáttan eru játtaðar 30,1 mió.kr. Meirnýtslan er 1,1 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum vóru útreiðslurnar seinna hálvár hægri enn mett. Hóast færri fáa veiting, ger samansetingin av móttakarum, at útreiðslurnar ikki eru lækkaðar.

Arbeiðsfremjandi tiltøk (lógarbundin játtan) 12.21.7.02
Í fíggjarlógini vóru játtaðar 28,5 mió.kr., sum við eykajáttanarlógini fyri september 2014 varð hækkað 8 mió.kr. Meirnýtslan er 4,4 mió.kr. Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at høvuðsorsøkin til meirnýtsluna er, at útreiðslurnar til m.a. útbúgving uttanlands, tillagað starv og yrkisútbúgving vóru hægri enn mett. Almannaverkið hevur greitt frá, at meirnýtslan skuldi helst verðið staðfest fyrr, grundað á ábendingarnar, sum bókingarnar í september og oktober 2014 vístu. Almannaverkið hevur tí broytt innanhýsis mannagongdirnar fyri at fyribyrgja, at slíkt endurtekur seg.

Hóast eykajáttan gjørdist meirnýtslan 4,4 mió.kr. til arbeiðsfremjandi tiltøk.

1.8 Óbrúktar løgujáttanir

Sambært § 13, stk. 2, í Ll. nr. 42/2009 “um landsins játtanarskipan” ber ikki til at flyta játtanir til seinni fíggjarár. Í § 22 er tó ásett, at hóast ásetingina í § 13 kann heimild verða givin við átekning at flyta óbrúktar løgujáttanir til seinni fíggjarár.

Niðanfyri er yvirlit yvir avlop á løgujáttanum, sum við heimild í C.átekningum eru fluttar til seinni ár:

Framflytingar við heimild í C.átekningum.

Høvuðskonta		2012	2013	2014
2.11.1.21	Umbygging í Tinganesi	43	-	-
3.11.1.56	Umvæling av almennum bygningum	10	-	-
3.38.1.07	Nýggir landsvegir	16.256	22.293	11.124
3.38.1.14	Havnir	340	985	-
5.34.3.06	Nýtt havrannsóknarskip	19.469	-	-
6.37.5.06	Granskingarlund	-	5.055	230
6.38.2.02	Strandfaraskip landsins (Nólsoyarskip)	-	2.513	3.513
6.38.2.02	Sandoyarskip	-	-	494
7.23.3.02	Studentaskúlin og HF-skeið í Eysturoy	-	10.249	10.746
7.23.3.07	Tekniski skúlin í Klaksvík	3.931	11.734	11.558
7.23.3.09	Skúladepil við Marknagil	75.875	64.866	13.853
7.24.2.09	Tjóðleikhús	4.999	4.846	4.727
7.24.3.15	Hvalastøðin við Áir	2.776	-	-
7.24.3.23	Kirkjubømúrurin	94	-	-
7.24.4.03	Kringvarp Føroya	-	9.361	8.328
7.24.6.13	Ítróttahøll á Sandoynni	15	-	-
11.20.2.09	Apoteksverkið	17.111	3.517	-
11.20.3.08	Landssjúkrahúsið, útbygging/viðlíkahald	42	5.253	18.046
11.20.3.11	Klaksvíkar Sjúkrahús	-	6.292	-
12.21.6.02	Bústovnar o.a.	29.107	37.431	24.763
Tilsamans		**170.068**	**184.395**	**107.382**

2 Løgmansfyrisitingin

2.1 Sendistova Føroya til Keypmannahavnar (LG 2014/202-0131)

Landsgrannskoðanin hevur í 2015 grannskoðað Sendistovuna til Keypmannahavnar.

Landsgrannskoðanin gjørdi vart við, at reglur vantaðu í roknskaparreglugerðini viðvíkjandi stovnskassa, inntøkum og visakorti.

Inntøkurnar fyri matsølu vóru munandi lækkaðar í 2014, tí Sendistovan hevði broytt mannagongd at skráseta søluna. Sambært Løgmansskrivstovuni er ikki talan um at selja frá matstovuni til starvsfólk, men heldur at stovnurin leggur út fyri mat, ið starvsfólk fáa frá aðrari matstovu, og sum starvsfólk gjalda ein part av.

Sendistovan er moms-skrásett hjá SKAT í Danmark, tí hon leigar partar av hølunum út. Sendistovan hevði ikki avroknað sølu-moms av leigu til fundarvirksemi o.a. Landsgrannskoðanin mælti til, at Sendistovan ger sjálvstøðugan roknskap fyri moms-skylduga virksemið sambært Kontuvegleiðingini hjá Gjaldstovuni og avroknar til SKAT.

Í november 2015 hevur Sendistovan boðað frá, at viðurskiftini viðvíkjandi meirvirðisgjaldinum eru fingin í rættlag.

Landsgrannskoðanin vísti á, at starvsfólk átti munandi fleiri tímar tilgóðar, enn roknskaparreglugerðin ásetir. Í november 2015 hevur Sendistovan kunnað um, at tímarnir verða avgreiddir í næstum.

3 Fíggjarmál

3.1 Landsroknskapurin ikki fullfíggjaður (LG 2014/100-0001)

Í dag fevnir landsroknskapurin um næstan allar landsstovnar og alment virksemi, sum landið varðar av. Somuleiðis er við gjaldføri v.m. hjá landinum.

Í 2013 setti Fíggjarmálaráðið við heimild í Ll. nr. 33/1994 “um landsins almenna roknskaparhald v.m.” í gildi K. nr. 95/2013 “um at lata inn roknskaparupplýsingar um alment virksemi til búskaparliga ráðlegging, stýring og eftirlit”.

Endamálið við kunngerðini var at fáa til vega upplýsingar um alment virksemi, sum ikki er við í fíggjarlógini, men sum er fevnt av almennu roknskaparlógini. Í kunngerðini eru nevnd nøkur dømi um virksemi, sum kunngerðin er galdandi fyri.

Í nógv ár hava Landsgrannskoðanin og løgtingsgrannskoðararnir annars gjørt vart við, at fleiri stovnar og grunnar eru ikki við í fíggjarlógini og í landsroknskapinum. Í tí sambandi hevur verið víst á nakrar grundleggjandi ivaspurningar, tá ið ræður um játtanar-, roknskapar- og grannskoðanarviðurskifti:

- um allar inntøkur landsins eru við í landsroknskapinum,
- um allar ognir og øll skuld er við í landsroknskapinum,
- um allir skattir/øll gjøld verða kravd inn sambært ásetingunum í stýrisskipanarlógini,
- um allar veitingar og umsitingarútreiðslur verða goldnar við heimild í fíggjarlógini, og
- um roknskapirnir hjá øllum stovnum og grunnum verða grannskoðaðir og lagdir fyri Løgtingið sambært galdandi lóggávu.

Seinastu árini hava skiftandi landsstýrismenn greitt frá um hesar stovnar og grunnar, uttan tó at komið er á mál við at greiða ivamálini.

Landsgrannskoðanin heldur, at tað er gott og týdningarmikið, at Fíggjarmálaráðið fær til vega upplýsingar um virksemið, sum er fevnt av kunngerðini.

Í fleiri førum er ásett í lógum, at inntøkur og útreiðslur hjá stovnum skulu ikki takast við í fíggjarlógina. Framvegis er virksemið hjá stovnunum og grunnunum ikki við í landsroknskapinum, og heldur ikki eru sjálvstøðugir roknskapir fyri virksemið teirra lagdir fyri Løgtingið.

Talan er um týðandi alment virksemi, sum ikki er við í landsroknskapinum, og sum heldur ikki verður lagt fyri Tingið. Í frágreiðing okkara frá mai 2014 “um leiklutin hjá landinum í partafeløgum, grunnum og øðrum virkiseindum” eru m.a. hesi viðurskifti nærri viðgjørd. Dømi um tílíkar almennar grunnar eru Føroya Realkreditstovnur og Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin, sum hava eginogn á einar 2 mia.kr.

Í oktober 2014 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Vinnuframagrunnurin, Granskingargrunnurin, Mentanargrunnurin og Trygdargrunnurin fyri avreiðingar og lønir bóka beinleiðis í Búskaparskipan landsins, og at teir eru tiknir við í fylgiskjali yvir eksternar grunnar í landsroknskapinum 2013.

Arbeitt verður framvegis við at fáa landsroknskapin fullfíggjaðan.

Í oktober 2015 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at tað framhaldandi verður arbeitt við, hvussu samlaði almenni roknskapurin skal setast upp. Tað eru framvegis avbjóðingar av at fáa Frítíðargrunnin at lata inn roknskapartøl. Gjaldstovan leggur upp til, at Frítíðargrunnurin bókar beinleiðis í Búskaparskipan landsins, og at krøvini frá arbeiðsgevarum verða kravd inn um TAKS skipanina. Enn er innlatingin av roknskapartølum frá Búnaðargrunninum og Bústøðum ikki komin heilt í rættlag.

Alment virksemi er fevnt av ymiskum almennum fyriskipanum og reglum, herundir at tað verður játtað í fíggjarlóg og er partur av landsroknskapinum ella sjálvstøðugum roknskapi, sum verður lagdur fyri Løgtingið.

Seinastu árini er alsamt meira virksemið hjá landinum lagt í virkiseindir, sum eru skildar frá landsfyrisitingini, t.d. í partafeløg. Sum víst á í frágreiðing okkara frá mai 2014, er talan um týðandi virksemi. Feskasta dømi er P/f Eystur- og Sandoyartunlar, sum skal gera tveir undirsjóartunlar komandi árini.

Flestu almennu reglurnar og fyriskipanirnar galda ikki almennu partafeløgini. Feløgini eru heldur ikki partur av fíggjarlóg ella roknskapum, sum verða lagdir fyri Løgtingið.

Tað ber tí til at siga, at landsroknskapurin í minni mun avspeglar veruliga virksemið, váðar o.a. hjá landinum, umframt at tílíkt virksemi í stóran mun ikki skal fylgja øðrum almennum reglum.

3.2 Fíggjarstøða (LG 2014/300-0000)

3.2.1 Avstemman av fíggjarstøðuni

Vit hava í stóran mun bygt okkara kanning av postum í fíggjarstøðuni 2014 á tey eftirlit og tær avstemmanir, ið Gjaldstovan støðugt fremur.

3.2.2 Høvuðstøl

Í talvuni niðanfyri eru samandráttir úr fíggjarstøðunum við árslok árini 2010 til 2014.

mió.kr.

	2010	2011	2012	2013	2014
OGN					
Kapitalinnskot	509	538	297	285	459
Virðisbrøv	1.239	1.336	1.386	1.470	1.480
Útlán	638	433	131	127	126
Áogn o.a.	575	515	591	496	544
Tøkur peningur	2.509	2.865	2.559	3.150	2.536
Ogn tilsamans	**5.470**	**5.687**	**4.964**	**5.528**	**5.145**
SKULD					
Skuld	4.954	5.599	5.416	6.113	5.750
Útjavningarkonta	516	88	-452	-585	-605
Skuld tilsamans	**5.470**	**5.687**	**4.964**	**5.528**	**5.145**

Fíggjarstøðan í landsroknskapinum er ein samandráttur av fíggjarstøðuni hjá øllum “vanligum” landsstovnum, sum eru við í fíggjarlógini. Harafturat eru nakrir postar, sum eru felags, t.d. størsti parturin av tøka peninginum og av skuldini. Fíggingargrunnurin frá 1992 er við undir “kapitalinnskot”, og partafeløg, sum landið eigur, eru tikin við undir “virðisbrøv”.

3.2.3 Fíggjarligur útbúnaður (LG 2014/300-0102)

Kapitalinnskot

t.kr.

	2012	2013	2014
Sambært roknskapinum	297.277	285.216	459.468

Kapitalinnskotið fevnir um Fíggingargrunnin frá 1992, sum eigur 33,4% av P/f BankNordik.

Í 2013 lækkaði kapitalognin 12,1 mió.kr., úr 297,3 mió.kr. í 285,2 mió.kr., og í 2014 hækkaði hon 174,3 mió.kr. til 459,5 mió.kr. Kapitalognin verður javnað hvørt ár, soleiðis at hon samsvarar við eginpeningin í roknskapinum hjá Fíggingargrunninum fyri roknskaparárið frammanundan. Sostatt verður ognin í landsroknskapinum javnað eitt ár afturút.

Av tí at roknskapurin hjá Fíggingargrunninum fyri farið roknskaparár ikki er tøkur fyrr enn eftir, at landsroknskapurin er liðugur, og fyri ikki at bóka eitt fyribils tal út frá einari meting, hevur Gjaldstovan valt at nýta tølini úr seinast lidna roknskapinum hjá Fíggingargrunninum, sí talvu niðanfyri:

t.kr.

Kapitalogn í landsfyritøkum	2012	2013	2014
Kapitalogn við ársbyrjan	538.234	297.277	285.216
Javning, kapitalognin samsvarar við eginognina í roknskapinum hjá Fíggingargrunninum	-240.957	-12.061	174.252
Kapitalogn við ársenda	**297.277**	**285.216**	**459.468**

Viðmerkjast kann, at eginpeningurin í Fíggingargrunninum við árslok 2014 var 381,8 mió.kr., t.v.s. 77,7 mió.kr. lægri enn við árslok 2013. Sambært ársfrásøgnini 2014 er høvuðsorsøkin til lækkingina, at virðið av partabrøvunum í P/f BankNordik, sum Fíggingargrunnurin eigur 33,4% av, er lækkað. Kursurin við árslok 2013 var 128, meðan hann var 104,5 við árslok 2014.

Í ársfrásøgnini hjá Fíggingargrunninum fyri 2013 var ognarparturin í P/f BankNordik bókaður til 427,8 mió.kr., sum svaraði til kursvirðið á partabrøvunum 31. desember 2013. Kursvirðið var 173,8 mió.kr. hægri enn við árslok 2012, tá ið kursvirðið var 254,0 mió.kr. Í ársfrágreiðingini greiðir leiðslan frá, at kursurin á partabrøvunum hjá P/f BankNordik hækkaði úr 76 við árslok 2012 í 128 við árslok 2013.

Landsgrannskoðanin hevur samanborið tølini í roknskapinum hjá Fíggingargrunninum frá 1992 við tølini í landsroknskapinum árini 2012 og 2013, umframt at vit hava eftirroknað ognarpartin í P/f BankNordik. Landsgrannskoðanin hevur onki at finnast at.

Í nógv ár hevur Løgtingið í uppskotum til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin mælt til at fáa greiði á hesum roknskaparposti, soleiðis at ikki bert Fíggingargrunnurin, men eisini aðrir grunnar o.l., sum landið eigur, verða skrásettir í landsroknskapinum, t.d. sum “Kapitalogn í landsfyritøkum”.

Í oktober 2013 kunnaði landsstýrismaðurin um, at hesir grunnar verða ikki tiknir við í landsroknskapin, men verða partur av samlaða almenna roknskapinum.

Í oktober 2014 og aftur í oktober 2015 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at arbeitt verður framvegis við spurninginum, hvussu samlaði almenni roknskapurin skal gerast upp. Gjaldstovan hevur kunnað um, at ætlanin er at taka Bústaðir, Búnaðargrunnin, Granskingargrunnin, Mentunargrunnin og Vinnuframagrunnin við í landsroknskapin sum kapitalinnskot, t.v.s. á sama hátt, sum Fíggingargrunnurin frá 1992 er tikin við.

Grunnarnir eru tiknir við sum einstakir postar í notuni, og somuleiðis verða roknskapirnir tiknir við undir partinum “Eksternir grunnar” í landsroknskapinum.

Virðisbrøv

t.kr.

	2012	2013	2014
Sambært roknskapinum	1.386.499	1.469.587	1.479.821

Frá 2012 til 2013 eru virðisbrøvini hækkað 83,1 mió.kr., og frá 2013 til 2014 eru tey hækkað 10,2 mió.kr. Høvuðsorsøkin til hækkingina 2013 til 2014 er, at tvey nýggj partafeløg eru stovnað: P/f Visit Faroe Islands við 0,5 mió.kr. og P/f Eystur- og Sandoyartunlar við 15 mió.kr. í partapeningi. Hinvegin er partapeningurin í P/f Virðisbrævamarknaði Føroya 7,1 mió.kr. (bókaða virðið) afturgoldin í 2014, tí felagið er niðurlagt.

Yvirlit yvir partabrøv, sum eru skrásett í landsroknskapinum:

t.kr.

Skrásett í landsroknskapinum	2012	2013	2014	Til skjals
P/f Vágatunnilin	160.300	160.300	160.300	Ja
P/f Norðoyatunnilin	235.000	235.000	235.000	Ja
P/f Føroya Tele	77.948	77.948	77.948	Ja
P/f Postverk Føroya	43.000	43.000	43.000	Ja
P/f Fiskaaling	17.375	17.375	17.375	Ja
P/f Føroya Lívstrygging	500	500	500	Ja
P/f Vága Floghavn	727.618	807.818	807.818	Ja
P/f Atlantic Airways	85.090	85.090	86.912	Ja *)
P/f Virðisbrævamarknaður Føroya	4.200	7.088	0	Ja
P/f Elektron	2.347	2.347	2.347	Ja
P/f Føroya Dátusavn	200	200	200	Ja
Sp/f Ítróttavedding	20	20	20	Nei
P/f Smyril Line	32.760	32.760	32.760	Ja
P/f Tjaldur	140	140	140	Nei
P/f Føroya Banki	1	1	1	Ja *)
P/f Visit Faroe Islands	-	-	500	Nei
P/f Eystur- og Sandoyartunlar	-	-	15.000	Nei
Partabrøv tilsamans	**1.386.499**	**1.469.587**	**1.479.821**	

*) Partabrøvini eru skrásett “elektroniskt” og tí pappírsleys. Útskrift er fingin til vega frá Værdi-papircentralen.

Í 9 feløgum eigur landið allan partapeningin:

t.kr.

Roknskapartøl 2014	Brutto vinningur	Ársúrslit	Samlað ogn	Egin-peningur
P/f Vágatunnilin	16.153	3.678	189.776	175.765
P/f Norðoyatunnilin	14.804	1.204	288.148	242.007
P/f Føroya Tele (samtak)	284.728	58.261	813.253	431.504
P/f Postverk Føroya (samtak)	57.279	3.246	152.650	27.310
P/f Fiskaaling	15.077	-5.529	31.609	9.624
P/f Føroya Lívstrygging (samtak)*)	237.289	4.765	1.862.241	136.965
P/f Vága Floghavn (samtak)	35.099	2.294	843.457	781.967
P/f Visit Faroe Islands	0	0	500	500
P/f Eystur- og Sandoyartunlar	-409	-771	19.991	14.229
Tilsamans	**660.020**	**67.148**	**4.201.625**	**1.819.871**

*)Tryggingargjøld fyri egna rokning tilsamans

Samlaða úrslitið hjá hesum feløgum var ein vinningur 67,1 mió.kr. eftir skatt, og samlaði eginpeningurin var 1.820 mió.kr. Í 2013 var samlaða úrslitið hjá somu feløgum ein vinningur 91,3 mió.kr. og eginpeningurin 1.710 mió.kr.

Viðmerkjast skal, at parturin hjá minnilutapartaeigarunum av eginpeninginum í Føroya Tele var 7,4 mió.kr. í 2014 (í dótturfeløgum hjá Føroya Tele), og parturin hjá minnilutapartaeigaranum í P/f Vága Floghavn var 1,7 mió.kr.

Í 2007 var 1/3 av Atlantic Airways einskilt, og partabrøvini skrásett á keypsskálunum, í Reykjavík sama ár og í Keypmannahavn í 2008. Politisk avgerð varð seinni tikin at tjóðartaka Atlantic Airways. Sambært leiðslufrágreiðingini 2014 hjá Atlantic Airways, varð felagið í hesum sambandi strikað av báðum keypsskálunum í juni 2014. Síðani varð semja gjørd um, at tað almenna fekk møguleika at keypa tey eftirverandi partabrøvini, ið felagið sjálvt ella Føroya Landsstýri ikki longur áttu. Við árslok 2014 áttu Atlantic Airways og Føroya Landsstýri samanlagt 99,2% av av partabrævaognini.

Samlað roknskapartøl hjá feløgum

Yvirlit yvir samlaðu roknskapartølini árini 2008 til 2014 fyri feløg, sum landið eigur allan partapeningin í, síggjast á talvuni niðanfyri:

Samlað roknskapartøl fyri feløg, sum landið eigur einsamalt.

t.kr.

Roknskapartøl samlað, landið eigur allan partapeningin	Brutto vinningur/søla	Ársúrslit	Samlað ogn	Eginpeningur
2008	925.524	-42.241	5.005.434	1.300.876
2009	695.048	-23.045	5.185.597	1.421.735
2010	714.585	27.672	5.983.268	1.524.940
2011	732.782	-268.123	7.241.118	2.201.249
2012	608.022	-513.502	3.730.656	1.631.006
2013	620.290	91.263	3.898.691	1.710.169
2014	660.020	67.148	4.201.625	1.819.871

Virðismeting

Gjaldstovan hevur sett reglur fyri, hvussu partabrøv eiga at verða goymd. Tá ið tey verða keypt, skulu tey verða latin Gjaldstovuni. Sama er galdandi fyri onnur virðisbrøv. Reglurnar viðgera ikki upp- og niðurskrivingar av partapeningi.

Í landsroknskapinum 2014 er partapeningurin skrásettur við keypsvirðinum. Talan er bæði um keyp til undirkurs, til yvirkurs og til útgávukurs. Skrásetti partapeningurin gevur sostatt onga ábending um ítøkiliga virðið á feløgunum.

Skrásetti partapeningurin gevur onga ábending um ítøkiliga virðið.

Niðanfyri sæst innara virðið sambært ársfrásagnunum fyri 2014 hjá 12 feløgum, samanborið við keypsvirðið:

t.kr.

	Keypsvirðið smbrt. landsroknskapinum	Innara virðið
P/f Vágatunnilin	160.300	175.765
P/f Norðoyatunnilin	235.000	242.007
P/f Vága Floghavn	807.818	781.967
P/f Føroya Tele	77.948	431.504
P/f Postverk Føroya	43.000	27.310
P/f Fiskaaling	17.376	9.624
P/f Føroya Lívstrygging	500	136.965
P/f Atlantic Airways	86.912	182.194
P/f Elektron	2.347	4.927
P/f Smyril Line	32.760	35.029
P/f Visit Faroe Islands	500	500
P/f Eystur- og Sandoyartunlar	15.000	14.229
Partabrøv, tilsamans	**1.479.461**	**2.042.321**

*)Parturin hjá minnilutapartaeigarum var 14,1 mió.kr.

Sum sæst í yvirlitinum, er keypsvirðið í nøkrum førum munandi lægri enn innara virðið. Sambært landsstýrismanninum hevur Gjaldstovan slept ætlanini at nýta innara virðið í landsroknskapinum, í øllum førum fyribils.

Í 2008 kannaði Landsgrannskoðanin, um partabrøvini, í teimum førum har “pappírs” partabrøv eru, vóru til skjals. Landsgrannskoðanin fekk goymsluyvirlit frá Værdipapircentralen, har partabrøvini bert eru elektroniskt skrásett. Síðani hevur Landsgrannskoðanin bert kannað broytingar í partabrævagoymsluni.

Vinningsbýti hjá partafeløgum, har landskassin er einasti partaeigari:

t.kr.

	2012	2013	2014
P/f Føroya Tele	9.000	30.000	30.000

Í 2014 fekk landskassin harafturat 8,1 mió.kr. útlutaðar í sambandi við, at P/f Virðisbrævamarknaður Føroya varð lagt niður.

Rentu- og avdráttarfrí útlán

t.kr.

	2012	2013	2014
Rentu- og avdráttarfrí lán, ársbyrjan	253.997	269.028	268.965
Tilgongd í árinum	17.218	0	3.500
Frágongd í árinum	-2.187	-63	-38
Rentu- og avdráttarfrí lán, ársenda	**269.028**	**268.965**	**272.427**
Sett av móti tapi	-269.028	-268.965	-272.427
Sambært roknskapinum	**0**	**0**	**0**

Talan er um lán til Framtaksgrunnin, lán til sjálvsognarstovnar og studningslán sambært Ll. nr. 34/1993, Ll. nr. 48/1964, Ll. nr. 42/1976, Ll. nr. 26/1997 og Ll. nr. 48/2009.

Í 2014 er frágongdin av rentu- og avdráttarfríum lánum 38 t.kr. Eitt nýtt studningslán er veitt í 2014, 3,5 mió.kr.

Í landsroknskapinum er kunnað um, at viðgerðin av rentu- og avdráttarfríum lánum er frá og við 2012 broytt soleiðis, at lánini, netto, verða tikin við í roknskapin við virðinum 0 kr. Orsøkin er, at talan er um treytað lán, sum bert skulu rindast aftur, um bygningar o.t., sum lán eru veitt til, verða brúkt til annað enn upprunaliga endamálið. Primofíggjarstøðan 2012 varð javnað við 254 mió.kr.

Útlán

t.kr.

	2012	2013	2014
Útlán, ársbyrjan	653.714	352.443	350.136
Tilgongd í árinum	16.629	14.883	18.464
Frágongd í árinum	-317.900	-17.190	-38.954
Útlán, ársenda (brutto)	**352.443**	**350.136**	**329.646**
Sett av ímóti tapi	-221.374	-222.853	-203.814
Sambært roknskapinum	**131.069**	**127.283**	**125.832**

Broytingarnar í útlánum stava í høvuðsheitum frá lestrarlánum.

Heitið útlán fevnir um veðhaldsútlegg, lestrarlán, ymisk vinnulán, serlán, kurslán og stuðulslán. Samlaðu útlánini eru lækkað 1,5 mió.kr. frá 2013 til 2014. Tilgongdin og frágongdin stava í høvuðsheitum frá, at nýggj lestrarlán eru veitt, og at lestrarlán eru goldin aftur.

Sett er av ímóti tapi. Virðini á veðhaldsútleggum, serlánum, kurslánum og stuðulslánum sambært roknskapinum eru sett til 0 kr. Avsetingin svarar í høvuðsheitum til útlán til privata vinnu, sum ikki frammanundan eru avskrivað ella løgd um til rentu- og avdráttarfrí útlán.

Landsgrannskoðanin hevur kannað nakrar stórar broytingar í útlánum í 2014 og hevur onki at finnast at.

3.2.4 Áogn

Skatta-, toll- o.t. skuldarar

t.kr.

	2012	2013	2014
Áogn landskassans	501.364	344.588	398.677
Sett av	-159.397	-134.289	-91.723
Sambært roknskapinum	**341.967**	**210.299**	**306.954**

Frá 2013 til 2014 eru skuldararnir øktir 96,7 mió.kr. netto. Størstu broytingarnar kunnu útgreinast soleiðis:

t.kr.

Broytingar 2013 – 2014	
Tollavgjøld	-16.082
Veiðigjald	-7.198
Skattur – "parkering"	-5.385
Meirvirðisgjald	-5.182
Skuldarumsiting - eftirgeving, gjaldsavtalur	7.178
Vanligur landsskattur	52.019
TAKS inngjøld	72.141

Tænastu-, vøru- og aðrir skuldarar

Talan er um tænastu- og vøruskuldarar hjá Apoteksverkinum, Landsverki, Kringvarpinum, Landssjúkrahúsunum og øðrum stovnum. "Aðrir skuldarar" eru m.a. ikki avroknað yvirskot frá danska Tjóðbankanum (føroyski parturin), endalig uppgerð av ríkisstuðli umframt aðrar inntøkur og endurgjøld, sum vanliga verða tíðaravmarkað fyri at geva eina rætta mynd av áognini. Eisini er talan um millumrokningar við landsstovnar, lønarútgjaldsskipanir, skipanir hjá TAKS, kommunum o.a.

Niðanfyri eru upphæddirnar útgreinaðar:

t.kr.

	2012	2013	2014
Apoteksverkið	20.256	27.679	22.706
Kringvarp Føroya	13.815	13.216	10.141
Avgjald á fiskatilfeingi	0	0	10.119
Kapitalvinningsskattur, tíðaravmarking	12.118	9.425	8.689
Niðurlaðing av Búnaðargrunninum	0	8.240	8.240
Landsverk, inntøkufíggjað virksemi	12.762	7.129	8.168
Landssjúkrahúsið	12.696	10.655	8.019
Víddargjøld	0	0	8.018
Ríkisstuðul – endurgjald	0	0	6.949
Jarðfeingi	3.444	29.123	0
Vága Floghavn, útbygging	0	20.200	0
Útgoldið yvirskot frá Landsbanka Føroya	15.131	0	0
Ymiskir skuldarar	89.638	95.893	80.491
Tilsamans, sambært roknskapinum	**179.860**	**221.560**	**171.540**

Broytingin frá 2013 til 2014 er ein nettolækking 50 mió.kr. Í høvuðsheitum stavar lækkingin frá, at áognin hjá Jarðfeingi er lækkað 29,1 mió.kr., umframt fleiri minni lækkingar. Hinvegin eru eisini nakrar hækkingar/nýggjar áognir.

Orsøkin til lækkingina av áognini hjá Jarðfeingi er ein bókingarfeilur í 2013, har ein ágóði 280 t.kr. av misgáum er bókaður sum 28.011 t.kr. Feilurin er rættaður í 2014.

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað tænastu-, vøru- og aðrar skuldarar fyri at sanna, at upphæddirnar eru rættar og rætt bókaðar. Vit høvdu onki at finnast at.

3.2.5 Goymslur

t.kr.

	2012	2013	2014
Sambært roknskapinum	68.988	64.305	65.008

Talan er um vørugoymslurnar hjá Rúsdrekkasølu landsins, Apoteksverkinum, Strandfaraskipum landsins, Námi (útgávuvirksemi), Landsverki, KT Landsins og Tekniska skúla í Klaksvík.

Netto er virðið á goymslunum hækkað 0,6 mió.kr. frá 2013 til 2014, men brutto eru nakrar forskjótingar.

Landsgrannskoðanin hevur samanborið bókaðu goymsluna í landsroknskapinum við goymslurnar í serstøku roknskapunum við árslok 2014 hjá Rúsdrekkasølu landsins, Strandfaraskipum landsins og inntøkufíggjaðum virksemi hjá Landsverki. Hinir stovnarnir gera ikki serstakan roknskap, ella roknskapirnir vóru ikki tøkir. Bókaða goymsluvirðið í landsroknskapinum stemmaði við roknskapirnar hjá stovnunum, sum vit hava fingið roknskap frá.

3.2.6 Ognir og útbúnaður (LG 2014/300-0101)

Bert fáir stovnar hava yvirlit yvir ognir og útbúnað.

Sambært § 20 í roknskaparkunngerðini skal yvirlit yvir ognir og útbúnað vera á øllum stovnum. Sambært rundskrivi frá Fíggjarmálaráðnum 1. februar 2001 “um roknskaparreglugerðir” skulu allir stovnar hava yvirlit yvir innbúgv, maskinur, bøkur og annan virðismiklan útbúnað við støði í roknskaparskjølum, og skulu yvirlitini m.a. fevna um slag, útveganarvirði, livitíð, og hvar ognin er. Vit hava fleiri ferðir vístá, at bert fáir stovnar hava dagførd yvirlit.

Í sambandi við vitjanir á stovnum í 2014 staðfestu vit aftur, at enn eru fleiri stovnar, sum ikki hava dagførd yvirlit yvir ognir og útbúnað.

Í oktober 2012 kunnaði landsstýrismaðurin í fíggjarmálum um, at framvegis er ætlanin, at Fíggjarmálaráðið saman við Gjaldstovuni skal fremja málrættað átøk fyri at fáa stovnar landsins at hava dagførd ognaryvirlit. Sum liður í hesum var ætlanin at lækka smálutakravið til ognaryvirlit. Tí varð lagt upp til, at § 20, stk. 2, í roknskaparkunngerðini verður strikað og stk. 3 broytt samsvarandi. Sambært stk. 2 skulu stovnarnir hava eitt yvirlit yvir útbúnað o.t., hvørs keypsvirði er minni enn 75 t.kr. Í yvirlitinum skal eisini vera útbúnaður, sum er á stovninum, men sum onnur enn stovnurin eiga.

Í oktober 2013 segði landsstýrismaðurin, at eftir ætlan skuldu roknskaparkunngerðin frá 2007 og roknskaparrundskrivið frá 2001 dagførast seinni í árinum, og tá skuldi spurningurin verða viðgjørdur.

Í oktober 2015 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at arbeitt verður framvegis við at dagføra roknskaparkunngerðina og roknskaparrundskrivið. Fíggjarmálaráðið er saman við Gjaldstovuni farið undir at gjøgnumganga uppskotið. Ætlandi er arbeiðið liðugt innan árslok 2015.

Landsgrannskoðanin kann enn eina ferð staðfesta, at reglurnar um at skráseta ognir og útbúnað, sum komu í gildi í 2001, verða ikki hildnar, og at reglurnar enn eru óbroyttar.

3.2.7 Tøkur peningur

Gjaldføri landsins verður umsitið av Gjaldstovuni.

Tøkur peningur fatar um gjaldføri landsins. Sambært § 3, stk. 1, í Ll. nr. 140/2012 "um landsins gjaldføris- og skuldarfyrisiting" verður gjaldføri landsins umsitið av Gjaldstovuni eftir ásetingum frá Gjaldstovuráðnum. Endamálið við umsitingini er, at:

- landið altíð hevur neyðugt gjaldføri tøkt, soleiðis at tað kann rinda sínar skyldur,
- landsins gjaldføri verður fyrisitið væl við atliti at tryggleika, herundir at samváðin millum landsins gjaldføri og føroyska búskapin verður sum minst, og
- landsins gjaldføri verður rentað til marknaðarkor.

Sambært § 3, stk. 2 og 3, fevnir gjaldføri landsins um alt gjaldførið hjá allari landsumsitingini, øllum landsstovnum v.m. Gjaldførið verður roknað sum landsins kassapeningur, innistandandi í peningastovnum, ótrektir kredittir í peningastovnum og óveðsettar virðisbrævaognir.

Í fíggjarstøðuni er tøkur peningur býttur í tveir bólkar:

1. Virðisbrøv o.til., og
2. Bankakontur, girokontur og kassapeningur.

Virðisbrøv o.t.

Ll. nr. 57/1978 "um Landsbanka Føroya" varð við Ll. nr. 138/2012 sett úr gildi. Landsbanki Føroya varð tikin av við virknaði frá 1. apríl 2013, og umsitingin av gjaldføri og skuld landsins flutt til Gjaldstovuna.

Innistandandi í Landsbanka Føroya nevnist nú Virðisbrøv o.til.

Sambært landsroknskapinum 2014 (síðu 262) var tann parturin av tøka peninginum, sum Landsbanki Føroya áður hevði sett í stuttfreistað virðisbrøv, flokkaður sum "Innistandandi í Landsbanka Føroya". Posturin nevnist nú "Virðisbrøv o.til."

t.kr.

	2012	2013	2014
Sambært roknskapinum	2.174.713	2.456.124	2.014.750

Fígging landsins, sum er deild undir Gjaldstovuni, hevur dagligu umsitingina av plaseringini av gjaldførinum hjá landinum um hendi. Plaseringin byggir á ein íløguinstruks frá Gjaldstovuráðnum, har ásetingar, eru um, m.a. hvussu nógv kann plaserast í ávís sløg av virðisbrøvum.

Uttanhýsis grannskoðanarvirkið, sum Landsgrannskoðanin hevur útveitt henda partin av grannskoðanini til, hevur m.a. kannað, um plaseringarnar av gjaldførinum eru sambært íløgureglunum í Ll. nr. 140/2012, og eisini um tær eru sambært íløguinstruksinum. Grannskoðarin hevur onki at finnast at. Sí eisini brot um grannskoðan av Fígging landsins.

Banka- og girokontur og kassapeningur

t.kr.

	2012	2013	2014
Sambært roknskapinum	384.228	693.854	521.734

Banka- og girokontur

Roknskaparposturin vísir ikki, hvussu nógv "landið" tilsamans hevur standandi á banka- og girokontum. Fleiri landsstovnar og -grunnar við leysum tilknýti til fíggjarlóg ella landsroknskap hava nógvan pening standandi í virðisbrøvum og á peningastovnskontum, sum ikki eru við í landsroknskapinum.

Í 2014 kann upphæddin greinast sundur í tær banka- og girokontur, sum Gjaldstovan umsitur, og tann partin av banka- og girokontum, sum aðrir stovnar umsita. Gjaldstovan umsitur 393 mió.kr., ella um 75% av samlaðu upphæddini.

Landsgrannskoðanin hevur kannað:

1. Um kontuavrit fra peningastovnum stemma við Búskaparskipan landsins.
2. Um peningur í fremmandum gjaldoyra er tikin við í roknskapin við røttum virði.
3. Um saldur av plaseringum hjá Fígging landsins eru rætt skrásettar í landsroknskapinum og Búskaparskipan landsins.
4. Um Fígging landsins liggur inni við ov nógvum gjaldføri.
5. Um reglurnar um minsta gjaldføri eru hildnar.

Ad. 4) Fígging landsins hevur gjørt innanhýsis reglugerð um, hvussu nógvur tøkur peningur kann standa í føroyskum peningastovnum í hvørjum peningastovni sær og samanlagt. Við árslok 2014 stóð í meira lagi av peningi í BankNordik, Norðoya Sparikassa og Suðuroyar Sparikassa í mun til reglugerðina. Fígging landsins hevur kunnað um, at gjaldførið í peningastovnunum í 2015 hevur verið í tráð við reglugerðina.

Ad. 5) Sambært § 4 í Ll. nr. 140/2012 verður álagt landsstýrismanninum í fíggjarmálum at fyriskipa, at landsins gjaldføri sambært § 3, stk. 2-3, í minsta lagi samsvarar við 15% av bruttotjóðarúrtøkuni í undanfarna ári. Gjaldstovuráðið skal í august mánaða áseta minsta gjaldføri. Fígging landsins hevur upplýst, at av tí at bruttotjóðarúrtøkan fyri undanfarna ár ikki altíð er gjørd upp, tá ið Gjaldstovuráðið skal áseta minstagjaldføri, verður seinasta uppgjørda talið brúkt, eisini um talan er um fyribils tal.

Talvan niðanfyri vísir gongdina 2012 til 2014:

t.kr.

	2012	2013	2014
Sambært roknskapinum	2.174.713	3.149.977	2.536.484
Harav minstagjaldføri	1.800.000	1.975.000	2.025.000
Munur ml. gjaldføri og minstagjaldføri	**374.713**	**1.174.977**	**511.484**

Gjaldførið við árslok 2013 og 2014 kann ikki samanberast beinleiðis við 2012, tí reglurnar fyri, hvat verður roknað við í gjaldførið, vórðu broyttar 1. apríl 2013, tá ið Ll. nr. 31/1995 “um landskassans innlán og lán í Landsbankanum” varð sett úr gildi, og Ll. nr. 140/2012 sett í gildi. Fyri 1. apríl 2013 skuldi landskassin sambært Ll. nr. 31/1995 hava í minsta lagi 15% av bruttotjóðarúrtøkuni standandi í Landsbankanum, meðan § 3, stk. 2-3, í Ll. nr. 140/2012 ásetir, at gjaldførið fevnir um alt gjaldførið hjá allari landsumsitingini, øllum landsstovnum v.m., og sum er trygt og lætt tøkt, umframt trygg, lætt sølubær og óveðsett virðisbrøv. Sambært Fígging landsins kemur allur tøki peningurin sambært fíggjarstøðuni undir hesar treytir og verður tí roknaður sum gjaldføri hjá landskassanum.

Landsgrannskoðanin hevði ikki aðrar viðmerkingar til gjøgnumgongdina enn tær, sum eru til pkt. 4 og 5.

Kassapeningur

Landsgrannskoðanin hevur gjørt fleiri kassaeftirlit í 2014, har vit hava stemmað kassapeningin av við kassauppgerðir, Búskaparskipan landsins v.m. Hava stovnarnir peningastovnskontur, verða tær stemmaðar av við kontuavrit frá peningastovnum og Búskaparskipan landsins. Eisini kanna vit konturnar fyri óvanligar bókingar í eitt ávíst tíðarskeið. Kassaeftirlitini eru umrødd undir hvørjum stovni sær.

3.2.8 Skuld

Innanlandsskuld, langfreistað

t.kr.

	2012	2013	2014
Sambært roknskapinum	4.254.431	4.820.091	4.417.294

Við árslok 2014 var talan um 5 lánsbrævarøðir:

- Ein lánsbrævarød (FO-LB 150611), áljóðandi 880 mió.kr., sum fellur til gjaldingar 11. juni 2015.
- Ein lánsbrævarød (FO-LB 160622), áljóðandi 1.350 mió.kr., sum fellur til gjaldingar 22. juni 2016.
- Ein lánsbrævarød (FO-LB 170627), áljóðandi 1.000 mió.kr., sum fellur til gjaldingar 27. juni 2017.
- Ein lánsbrævarød (FO-LB 180610), áljóðandi 40 mió.kr., sum verður niðurgoldin fram til 10. juni 2018.
- Ein lánsbrævarød (FO-LB 190620), áljóðandi 1.100 mió.kr., sum fellur til gjaldingar 20. juni 2019.

Við árslok 2014 var samlaða áljóðandi skuldin 4.370 mió.kr.

Fíggjarmálaráðið hevur í 2011 broytt meginreglurnar fyri, hvussu lánsbrøv og broytingar í kursvirðum verða viðgjørd í landsroknskapinum soleiðis, at skuldin ikki sum áður verður tikin við til marknaðarvirði. Í staðin fyri er farið yvir at nýta amortiseringsmeginregluna. Lánsbrøv verða tikin við í fíggjarstøðuna við áljóðandi virði, og møguligir kursmunir, sum koma í sambandi við útgávuna, verða avskrivaðir liniert yvir ætlaðu afturgjaldstíðina. Verður partur av lánsbrævarød keyptur aftur fyri tíð, verður útgávukursmunurin, sum hoyrir til henda partin, avskrivaður í afturgjaldsárinum. Endamálið við broytingini er, at rentuútreiðslur landskassans, har kursmunir eisini verða bókaðir, ikki skulu verða merktar av teimum sveiggjum, sum leypandi broytingar í kursvirðunum hava við sær.

Gjaldstovan selur meginpartin av brævalánunum uttanlands, og óvist er, hvør "keyparin" er. Heitið á roknskaparpostinum, "Innanlandsskuld, langfreistað", er tí helst ikki so beinrakið.

Nevnast kann, at Fígging landsins, vegna landskassan, hevur tikið eitt nýtt lánsbrævalán 1.045 mió.kr. (FO-LB 200611) í juni 2015. Hinvegin hevur Fígging landsins goldið 880 mió.kr. av FO-LB 150611 og 9,1 mió.kr. av FO-LB 180610 aftur í juni 2015. Sí annars brot um grannskoðan av Fígging landsins, har grannskoðan av m.a. landskassaskuldini verður umrødd.

Uttanlandsskuld, langfreistað

t.kr.

	2012	2013	2014
Sambært roknskapinum	500.000	500.000	500.000

Upphæddin er eitt lán, 500 mió.kr., ið stavar frá avtaluni 10. juni 1998 ímillum donsku stjórnina og Landsstýrið. Sambært avtaluni er lánið rentu- og avdráttarfrítt við teimum treytum, sum standa í lánsavtaluni: "Afviklingen af lånet aftales i takt med eventuelle indtægter fra fremtidig råstofudvinding. Dog afskrives gælden efter 20 år, såfremt der ikke på det tidspunkt er startet udvinding af råstoffer."

Partur av langfreistaðu skuldini, ið fellur til gjaldingar í komandi ári

t.kr.

	2012	2013	2014
Sambært roknskapinum	1.008.800	1.483.000	889.500

Sambært Fígging landsins vóru veruligu afturgjøldini:

- Eftir skránni fullu 8,8 mió.kr. av FO-LB 180610 til gjaldingar í juni 2013. Harafturat vórðu 425 mió.kr. av FO-LB 140407 goldnar fyri tíð, eisini í juni 2013. Tilsamans vórðu 433,8 mió.kr. goldnar í 2013. Í landsroknskapinum stóðu 1.008,8 mió.kr. at falla til gjaldingar í 2013.
- Eftir skránni fullu 1.225 mió.kr. av FO-LB 140407 í apríl 2014 og 9,1 mió.kr. vórðu goldnar av FO-LB 180610. Í apríl 2014 vórðu harafturat 248 mió.kr. av FO-LB 150611 goldnar fyri tíð. Tilsamans vórðu 1.482,1 mió.kr. goldnar í 2014.

Sambært Búskaparskipan landsins eru 880 mió.kr. av FO-LB 150611 goldnar í juni 2015 umframt 9,5 mió.kr. av FO-LB 180610. Tilsamans eru 889,5 mió.kr. goldnar fram til oktober 2015.

Stuttfreistað skuld (onnur skuld)

t.kr.

	2012	2013	2014
Sambært roknskapinum	662.145	793.173	832.744

Talan er í høvuðsheitum um vanligar kreditorar, millumrokningar við kommunur, tíðaravmarkingar og skuld, sum eru greidd til útgjaldingar frá ymiskum skipanum. Skrásettu upphæddirnar í landsroknskapinum samsvara við sundurgreiningar, sum liggja aftanfyri.

Ein bókingarfeilur viðvíkjandi eini áogn hjá Jarðfeingi hevur tað avleiðing, at stuttfreistaða skuldin eisini er 28 mió.kr. ov stór við árslok 2013, sí brotið "Tænastu-, vøru- og aðrir skuldarar". Feilurin er rættaður í 2014.

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað stuttfreistaða skuld, um upphæddirnar eru rættar, og um tær eru bókaðar rætt. Onki var at finnast at.

Útjavningarkonta (LG 2014/300-0203)

t.kr.

	2012	2013	2014
Salda 1. januar	85.679	-458.681	-585.037
RLÚ-úrslit	-31.197	-237.592	-249.514
Ymiskar broytingar	-506.455	111.236	229.621
Salda 31. desember	**-451.973**	**-585.037**	**-604.930**

Saldan á útjavningarkontuni við ársbyrjan 2013 samsvarar ikki við salduna við árslok 2012. Munurin er 6,7 mió.kr. Orsøkin er, at Gjaldstovan hevur gjørt ymiskar javningar til roknskapin fyri 2013 í mun til 2012.

"Ymiskar broytingar" fevnir um broytingar í fíggjarstøðuni, sum ikki verða førdar yvir raksturin. Talan er m.a. um tøkniligar munir, sum standast av broytingum í roknskaparmeginreglum, rættingum av skeivum bókingum, sum viðvíkja undanfarnum árum, avtøkum av grunnum, úrslitum hjá internum grunnum, broytingum í avsetingum, mótbókingum til útlánsroknskap og mótbókingum til kapitalinnskot.

Útjavningarkontan líkist ikki "kontu fyri eginpening" í einum privatum virki. Ognirnar í landsroknskapinum verða virðismettar øðrvísi, og materiell støðisogn, t.d. bygningar, skip og vegir, verða ikki virðisásett í roknskapinum. Útjavningarkontan hevur tí so at siga bert eitt tøkniligt endamál.

3.3 Tænastumannaeftirløn (LG 2014/203-0181)

Í oktober 2014 kunnaði landsstýrismaðurin um, at í arbeiðinum at gera skylduna fyri tænastumannaeftirløn upp, savnaði Gjaldstovan seg fyrst um at gera skylduna upp mótvegis tænastumonnum. At gera upp eftirlønarskylduna mótvegis landsstýris- og løgtingsfólkum varð síðsti parturin av arbeiðinum. Tilfarið var savnað og liðugt skrásett, og aktuarur fór í næstum at fáa tilfarið, soleiðis at hesin parturin av eftirlønarskylduni varð gjørdur upp. Ætlandi skuldi arbeiðið verða liðugt innan árslok 2014.

Nettoskylda landskassans til eftirløn er mett til 3,4 mia.kr.

Á síðu 224 í landsroknskapinum 2014 undir "Pensjónsskyldur (eftirlønarskyldur) landskassans" stendur soleiðis: *"Landskassin hevur skyldu at rinda teimum eftirløn, sum hava verið tænastumenn, løgmenn, landsstýrismenn ella løgtingsmenn. Somuleiðis hevur landskassin partvísa/fulla eftirlønarskyldu fyri lærarar í fólkaskúlanum, á Sernámsdeplinum, í Adventistaskúlanum, teknisku skúlunum, handilsskúlunum, Føroya læraraskúla og pedagogum á forsorgarstovnum, umframt á øðrum økjum, sum landið hevur yvirtikið frá dønum.*

Gjaldstovan hevur seinastu árini skrásett tænastumannaskyldurnar og fingið ein aktuar at meta um, hvat tað hevði kostað, hevði landið keypt seg leyst frá skylduni nú. Úrslitið er, at nettoskylda landskassans er umleið 3,4 mia.kr.

Tá ið skyldan er roknað, er roknað við einari rentu á 1%. Tað er rentan, sum aktuarurin hevur mett at vera mest sannlíka í løtuni. Rentan er roknað sum munurin millum tað avkastið, sum eitt lívstryggingarfelag hevði kunnað fingið burturúr og mettu lønarhækkanina í tíðarskeiðnum. Rentustøðið, sum roknað verður við, ávirkar upphæddina ógvuliga nógv.

Í talinum er skyldan mótvegis løgtingsmonnum íroknað. Fyri løgtingsmenn og landsstýrismenn er talan um umleið 320 mió.kr."

3.4 Umsiting av skatti, avgjøldum o.ø.

3.4.1 MVG-eftirstøður (LG 2014/220-0522)

MVG-eftirstøða er MVG-skuld, ið er fallin til gjaldingar og flutt í innheintingarskipanina. Rentur eru íroknaðar MVG-eftirstøðuni. Landsgrannskoðanin hevur í seinastu frágreiðingunum lýst MVG-eftirstøðurnar.

Samlaðu MVG-eftirstøðurnar settar í mun til MVG-inntøkurnar

Fyri at lýsa gongdina í MVG-eftirstøðunum í mun til inntøkur landskassans av MVG hava vit samanborið tær við samlaðu MVG-inntøkurnar árini 2006 til 2014. Eftirstøðurnar eru lýstar bæði sum eftirstøður við árslok og sum miðal eftirstøður í árinum. Inntøkurnar eru nettoinntøkur av meirvirðisgjaldi, t.e. MVG av innflutningi og av sølu í Føroyum frádrigið keyps-MVG.

t.kr.

Ár	Inntøkur	Eftirstøður (árslok)	Eftirstøður (miðal árið)	Eftirstøður í mun til inntøkur árslok (miðal)
2006	1.148.828	70.855	60.228	6,2% (5,2%)
2007	1.297.848	60.225	60.575	4,6% (4,7%)
2008	1.240.192	72.955	61.255	5,9% (4,9%)
2009	1.149.699	91.128	78.506	7,9% (6,8%)
2010	1.182.288	112.518	102.496	9,5% (8,7%)
2011	1.173.212	119.379	112.437	10,2% (9,6%)
2012	1.209.980	117.423	108.998	9,7% (9,0%)
2013	1.165.112	89.580	99.800	7,7% (8,6%)
2014	1.315.312	89.272	76.625	6,8% (5,8%)

Árini 2006 til 2014 eru eftirstøðurnar øktar úr 70,9 mió.kr. í 89,3 mió.kr. Í 2011, tá ið eftirstøðan var størst, var hon 119,4 mió.kr.

Tølini vísa, at árini 2006 til 2008 vóru eftirstøðurnar millum 4,6% og 6,2% av samlaðu inntøkunum, men í 2009 byrjaðu tær at vaksa í mun til inntøkurnar, og vóru størst í 2011, tá ið tær vóru 10,2% av samlaðu inntøkunum. Í 2014 lækkaði eftirstøðan til 6,8% av inntøkunum.

Avskrivingar av MVG-skuld

10,9 mió.kr. vórðu avskrivaðar í 2014.

Árini 2006 til 2014 hevur TAKS avskrivað 118 mió.kr. av MVG-skuld:

t.kr.

	Avskriving
2006	5.096
2007	8.707
2008	5.527
2009	7.652
2010	14.214
2011	19.385
2012	17.372
2013	29.136
2014	10.937
Tilsamans	**118.026**

Møguleikarnir hjá TAKS at avskriva MVG-skuld eru bert til staðar, um skuldarin hevur fingið játtaða skuldarumlegging, fingið skuldarsanering, ella um felag er strikað úr partafelagsskránni.

TAKS fekk í Ll. nr. 49/2012 “um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald” (innkrevjing av MVG-skuld), víðkaðar heimildir at krevja skuld inn. Millum annað fekk TAKS heimild at krevja trygd frá verandi virkjum, ið ikki hildu krøvini um stytt avgjaldstíðarskeið ella ikki rættstundis høvdu rindað avgjøld og skyldaðu meira enn 25.000 kr. Eisini fekk TAKS heimild til at taka MVG-skrásetingina frá virkjum, um tey skyldaðu landinum MVG, umframt heimild at krevja skuldina inn við at halda aftur í A-inntøku hjá teimum gjaldsskyldugu.

3.5 Kervisskoðan

3.5.1 Avtala um kervisskoðan hjá TAKS

Í mai 2004 góðkendu TAKS, Elektron, grannskoðarin hjá Elektron og innanhýsis kervisskoðarin á Elektron avtaluna um kervisskoðan av skipanunum hjá TAKS, sum eru á Elektron.

Átekningar eru treytaðar av, at mannagongdir og skipanir hjá TAKS eru tryggar.

Avtalan fevnir um tann partin av teldukervinum, sum Elektron hevur ábyrgdina av, men ikki tann partin, sum er hjá TAKS, so sum brúkaraumsiting, mannagongdir og annað, ið er neyðugt fyri at hava ein tryggan og munagóðan rakstur. Átekningar frá kervisskoðaranum og grannskoðaranum hjá Elektron eru tí treytaðar av, at mannagongdir og skipanir hjá TAKS annars eru tryggar.

Frágreiðingar um kervisskoðan

Fyri árið 2014 hevur TAKS útflýggjað Landsgrannskoðanini avrit av trimum frágreiðingum. Tær eru:

- Årsrapport fra Systemrevisionen 2014.
- ISAE 3402-erklæring om de generelle IT-kontroller på Elektron for året 2014 i relation til TAKS.
- Revisionsrapport, generelle IT-kontroller 2014.

Hóast tað í avtaluni um kervisskoðan stendur, at kervisskoðarin árliga skal skoða eina ávísa brúkaraskipan, er ongin slík skoðan gjørd síðan 2004.

Fyri árið 2004 varð serfrágreiðing gjørd um "Revision af innkrevjingarskipanini 2004". Fyri árið 2003 varð serfrágreiðing gjørd um "Revision af eToll, 2003".

Tá ið vit lesa frágreiðingarnar frá kervisskoðaranum, skulu vit m.a. hava í huga:

- at frágreiðingarnar snúgva seg bert um tann partin av KT kervinum hjá TAKS, sum verður umsitin av Elektron; ikki um partin, sum TAKS sjálvt hevur beinleiðis ábyrgdina av,
- at allar niðurstøðurnar hjá kervisskoðaranum eru treytaðar av, at arbeiðsgongdir og eftirlit á TAKS eru nøktandi,
- at tær serskipanir, sum higartil eru skoðaðar, eTollur og innkrevjingarskipanin, eru millum tær nýggjastu skipanirnar, og millum tær tryggastu og frægast skjalfestu. Høvdu aðrar og eldri skipanir verið kannaðar, høvdu tað upp á seg helst verið fleiri viðmerkingar, og
- at skattaskipanin, sum er tann elsta og týdningarmesta skipanin hjá TAKS, sum er á Elektron, er ikki skoðað.

Um viðurskifti eru, sum ikki eru nøktandi, gevur kervisskoðarin ítøkilig tilmæli.

Við árslok 2014 hevði kervisskoðanin á Elektron tilsamans 7 óloyst tilmæli. Av teimum høvdu tvey høga raðfesting, tvey miðal raðfesting og trý høvdu lága raðfesting. Kervisskoðanin hevði onki nýtt tilmæli í 2014, meðan fýra vóru avgreidd.

Talvan niðanfyri vísir gongdina í óavgreiddum tilmælum frá kervisskoðanini árini 2010 til 2014:

Óavgreidd tilmæli (árslok)	**2010**	**2011**	**2012**	**2013**	**2014**
Høg raðfesting	3	3	2	2	2
Miðal raðfesting	9	5	4	6	2
Lág raðfesting	9	6	4	3	3
Tilsamans	**21**	**14**	**10**	**11**	**7**
Av hesum eldri enn eitt ár	20	14	9	8	7

Eitt av tilmælunum, sum hevur høga raðfesting, og sum kervisskoðarin hevur havt síðani 2000, er skjalfestingin av skattaskipanini.

Kervisskoðarin er ikki nøgdur við, at so mong gomul tilmæli eru óavgreidd.

Kervisskoðarin er ónøgdur við, at gomul tilmæli eru óavgreidd.

Niðurstøðan hjá kervisskoðaranum er m.a., at hesir manglar og veikleikar eru:

> *"Ved systemrevisionens gennemgang af udvalgte forhold indenfor de generelle IT-kontroller er det fortsat fundet, at den foreliggende systemdokumentation til flere væsentlige systemer er mangelfuld, og eksisterende systemdokumentation vedligeholdes ikke i nødvendigt omfang. Det skal dog hertil bemærkes, at TAKS har arbejdet aktivt med forholdet det forløbne år. Endvidere har gennemgangen igen vist, at den foreliggende samarbejdsaftale mellem TAKS og Elektron stadig ikke lever op til alle kravene i sikkerhedsbekendtgørelsen under persondataloven. Forholdene er tidligere rapporteret, og der forefindes åbentstående revisionsanbefalinger på disse.*
>
> *Systemrevisionen finder ikke ovennævnte forhold betryggende."*

Kervisskoðarin er ikki tryggur við støðuna.

Kervisskoðarin sigur eisini, at grannskoðanin vísti, at trygdin og týðandi eftirlit framvegis eru á einum nøktandi støði á nógvum týðandi økjum, og at tað í 2014 var arbeitt við betringum. Nýggir veikleikar eru ikki staðfestir. Burtursæð frá nevndu

veikleikum og manglum heldur kervisskoðarin, at tað er skipað fyri einum nøktandi trygdar- og eftirlitsstøði á Elektron um skipanir og dátur, sum TAKS nýtir.

Í oktober 2012 greiddi landsstýrismaðurin frá, at TAKS í 2012 miðvíst hevði arbeitt við at bøta um manglarnar, sum kervisgrannskoðarin hevði gjørt vart við viðvíkjandi kervisskjalfesting og kervisgrannskoðan. Manglar, sum í nøkrum førum høvdu verið viðmerktir síðani 2004. TAKS hevði í samstarvi við Elektron gjørt ein skjalfestingarleist, sum skuldi tryggja neyðugu dygdina av kervisskjalfesting í 2012.

Í oktober 2015 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at TAKS áhaldandi arbeiðir við at loysa grannskoðanartilmælini, og síðani árslok 2013 eru 5 tilmæli við miðal raðfesting loyst. Ein ætlan/raðfesting er gjørd fyri at skjalfesta skipanirnar. Arbeitt verður støðugt við at skjalfesta eftir tí nýggja skjalfestingarleistinum, til komið er á mál. Fleiri skipanir eru liðugt skjalfestar. Mett verður, at ein triðingur av arbeiðinum er gjørt, og væntast skal, at tað tekur 2-3 ár afturat, áðrenn allar skipanirnar eru skjalfestar. Viðvíkjandi innaneftirlitinum á TAKS sigur landsstýrismaðurin, at TAKS hevur ment eina talgilda kekklistaskipan, ið er eitt amboð til innaneftirlit av afturvendandi arbeiðsuppgávum.

Landsstýrismaðurin kunnar eisini um, at TAKS og Elektron fyrr í ár hava gjørt avtalu um umlegging til nýggjan tøkniligan grundvøll. Umleggingin varð mett at verða liðug 1. november 2015, men verður helst ikki liðug fyrr enn um ársskiftið. Í hesum sambandi verður nýggj samstarvsavtala um rakstur og menning gjørd við Elektron.

3.5.2 Avtala um kervisskoðan hjá Gjaldstovuni

Í sambandi við at Gjaldstovan hevur útveitt KT-skipanirnar til Elektron, er ein rakstrar- og viðlíkahaldsavtala (SLA) gjørd millum partarnar. Í tí sambandi varð í 2009 ein avtala um grannskoðan gjørd millum Gjaldstovuna, Elektron og innanhýsis kervisskoðanina á Elektron, sum m.a. ásetir, at ein gjøgnumgongd verður gjørd av generellu KT-kontrollunum hvørt ár. Grannskoðanin av KT-kontrollunum á Elektron tekur støði í rakstrar- og viðlíkahaldsavtaluni millum Elektron og Gjaldstovuna frá 2012.

Kervisskoðarin á Elektron hevur fyri árið 2014 gjørt tríggjar frágreiðingar um KT-viðurskiftini millum Gjaldstovuna og Elektron:

- Ársrapport fra Systemrevisionen 2014,
- ISAE 3402-erklæring om de generelle IT-kontroller på Elektron for året 2014 i relation til SLA med Gjaldstovan, og
- Systemrevisionsrapport, generelle IT-kontroller 2014.

Úrslitið av kervisskoðanini er, at fimm manglar ella veikleikar vórðu staðfestir. Kervisskoðarin heldur, at fýra av tilmælunum hava miðal raðfesting, og eitt hevur lága raðfesting. Onki nýtt tilmæli var 2014, og trý tilmæli eru avgreidd. Fimm tilmæli eru eldri enn eitt ár.

Hóast manglar, er trygdar- og eftirlitsstøðið um skipanir og dátur nøktandi.

Hóast manglarnar, er niðurstøðan hjá kervisskoðaranum, at sum heild er eitt nøktandi trygdar- og eftirlitsstøði um skipanir og dátur hjá Gjaldstovuni.

3.5.3 Avtala um kervisskoðan hjá KT Landsins

Kervisskoðarin á Elektron hevur í 2014 grannskoðað generellu KT-kontrollarnar í sambandi við, at Elektron veitir tænastur til KT Landsins og kundar tess. Kervisskoðarin hevur eisini grannskoðað KT-kontrollarnar v.m. í sambandi við KT-tænastur, sum P/f Formula veitir KT Landsins. Grannskoðanin er framd sambært SLA avtalum millum partarnar.

P/f Elektron

Kervisskoðarin á Elektron hevur fyri árið 2014 gjørt tríggjar frágreiðingar um KT-viðurskiftini millum KT Landsins og Elektron:

- Årsrapport fra Systemrevisionen, Systemrevisionsarbejdet for KTL på Elektron i 2014,
- ISAE 3402-erklæring om de generelle IT-kontroller på Elektron for året 2014 i relation til SLA med KTL, og
- Systemrevisionsrapport, generelle IT-kontroller 2014 på Elektron.

Úrslitið av kervisskoðanini er, at tveir manglar ella veikleikar vórðu staðfestir, annar við miðal raðfesting og hin við lágari raðfesting. Síðani 2013 eru komið eitt nýtt tilmæli, og fimm tilmæli eru avgreidd. Eitt tilmæli er eldri enn eitt ár.

Tá sæð verður burtur frá omanfyri nevndu manglum og veikleikum, heldur kervisskoðarin, at yvirhøvur er eitt nøktandi trygdar- og eftirlitsstøði skipað við atliti at skipanum og dátum, sum viðvíkja KT Landsins. Kervisskoðarin heldur eisini, at Elektron hevur hildið krøvini í SLA avtaluni í tíðarskeiðnum.

Viðvíkjandi generellum kontrollum er trygdar- og eftirlitsstøðið nøktandi.

P/f Formula

Kervisskoðarin á Elektron hevur fyri árið 2014 gjørt tríggjar frágreiðingar um KT-viðurskiftini millum KT Landsins og P/f Formula:

- Årsrapport fra Systemrevisionen, Systemrevisionsarbejdet for KTL hos Formula i 2014,
- ISAE 3402-erklæring om de generelle IT-kontroller hos Formula for året 2014 i relation til SLA med KTL, og
- Systemrevisionsrapport, generelle IT-kontroller 2014 hos Formula.

Úrslitið av kervisskoðanini er, at 19 manglar ella veikleikar vórðu staðfestir, tríggir við høgari raðfesting, 10 við miðal raðfesting og 6 við lágari raðfesting. Síðani 2013 er onki nýtt tilmæli, meðan 10 tilmælir eru avgreidd í 2014.

Kervisskoðarin sigur m.a.:

> *"Revisionen viste, at Formula har arbejdet med at forbedre sikkerheden på flere væsentlige områder i 2014 og har formået at reducere antallet af udestående revisionsanbefalinger med en tredjedel, hvorved flere væsentlige revisionsanbefalinger er bortfaldet.*
>
> *Ved revisionen er der dog fortsat påvist væsentlige svagheder på en række områder, hvor kontrolmålene i ISO-standarden og sikkerhedskravene i den foreliggende SLA ikke kan betragtes som opfyldt på tilfredsstillende vis."*

Munandi veikleikar eru á fleiri økjum.

Samanumtikið er niðurstøðan hjá kervisskoðaranum, at tað burtursæð frá ávísum viðurskiftum er sett í verk og hildið eitt nøktandi trygdar- og eftirlitsstøði á ymisku økjunum innan generellu eftirlitunum hjá P/f Formula viðvíkjandi KT Landsins.

3.6 Fíggjarmálaráðið (LG 2014/203-0111)

Í frágreiðing okkara til løgtingsgrannskoðararnar í oktober 2012 eru ávís viðurskifti hjá Fíggjarmálaráðnum umrødd.

Roknskaparviðurskifti o.a.

Fíggjarmálaráðið hevði eina roknskaparreglugerð frá 2001, sum ikki var dagførd. Sambært Fíggjarmálaráðnum arbeiddu tey við at dagføra hana.

Roknskaparreglugerð og ognaryvirlit eru ikki dagførd.

Fíggjarmálaráðið hevði onki yvirlit yvir sínar ognir sambært roknskaparkunngerðini og vegleiðingini frá Gjaldstovuni. Sambært Fíggjarmálaráðnum arbeiddu tey við at gera eitt ognaryvirlit.

Í oktober 2013 greiddi landsstýrismaðurin frá, at Gjaldstovan arbeiddi við at dagføra roknskaparrundskrivið og roknskaparkunngerðina, her ímillum at bloyta upp krøvini til ognaryvirlit. Fíggjarmálaráðið ætlaði at gera nýggja roknskaparreglugerð og ognaryvirlit, tá ið hesar dagføringar eru gjørdar.

Í oktober 2015 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at ætlandi verður arbeiðið við at dagføra roknskaparkunngerðina og roknskaparrundskrivið liðugt innan árslok (2015).

3.7 Reglur um matstovur (LG 2014/203-0111)

Í frágreiðing okkara til løgtingsgrannskoðararnar februar 2006 umrøddu vit ymiskar starvsfólkaútreiðslur, m.a. um stovnar og aðalráð rindaðu ískoyti til rakstur av matstovu. Fýra stovnar, herímillum Fíggjarmálaráðið, svaraðu tá, at stovnurin rindaði ískoyti til rakstur av matstovu.

Enn eru ongar reglur gjørdar um matstovuvirksemi.

Í 2010 staðfestu vit, at ongar reglur vóru gjørdar um matstovuvirksemi. Í januar 2010 greiddi Løgmansskrivstovan frá, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum umsat økið. Løgmansskrivstovan heitti í 2010 og 2011 á Fíggjarmálaráðið um at skipa so fyri, at dagførdar reglur vórðu gjørdar fyri matstovuvirksemi.

Í oktober 2013 umrøddi Landsgrannskoðanin aftur málið og staðfesti, at reglurnar vóru ikki gjørdar.

Í mai 2015 hevur Landsgrannskoðanin spurt landsstýrismannin, hvat síðani er hent. Vit hava ikki fingið svar.

3.8 Ómaksgjøld (LG 2014/203-0151)

Ivi um heimild at krevja ómaksgjøld.

Í apríl 2015 spurdi Landsgrannskoðanin, hvørja heimild TAKS hevði at áseta ómaksgjøldini, sum eru umrødd í Rundskrivi nr. 1/2014. Landsgrannskoðanin spurdi eisini, hvar innheintingar- og pantiheimildirnar fyri ómaksgjøldini eru ásettar.

TAKS svaraði, at heimildin at áseta gjøldini var at finna í rættarpraksis um ásetan av ómaksgjøldum. TAKS vísti á, at rættarpraksis ásetir, at ómaksgjøld í trongari merking ikki eru fevnd av hugtakinum “skattur” í § 43 í grundlógini og § 41 í løgtingslóg um stýrisskipan Føroya og tí kunnu áleggjast uttan at hava heimild í lóg. TAKS vísti til hægstarættardóm U1993.757H (sonevnda Gebyrmálið) og U1983.871H (Vedrørende hjemmelsgrundlaget for kommunes opkrævning af beløb til dækning af barns deltagelse i skoletur.)

TAKS hevur ikki nakra siðvenju at leggja gjøld á uttan við lóg ella heimild í lóg. Øll onnur gjøld hava verið lýst í kunngerðum ella í lóg, t.d. kunngerð nr. 14 frá 3. mars 2010 “um tænastugjøld uttan fyri avgreiðslutíð” og kunngerð nr. 39 frá 23. apríl 2010 “um tænastugjøld í samband við tolling og umtolling”.

Landsgrannskoðanin er samd við TAKS, at ómaksgjøld o.t. ikki eru “skattir”, sum kunnu tulkast at vera fevndur av ávikavist § 43 í grundlógini ella § 41 í stýriskipanarlógini, og at tað merkir, at ómaksgjaldið sjálvt ikki nýtist at vera ásett beinleiðis í einari lóg. Um gjaldið ikki er ein skattur, kann heimildin at krevja tað latast (delegerast) til fyrisitingina at áseta fyrisitingarliga. Tað krevur tó, at fyrisitingin fær ta heimildina í lóg - ella í serligum førum siðvenju.

Samanumtikið heldur Landsgrannskoðanin, at tað tykist ov ógreitt, hvussu TAKS kemur til ta niðurstøðu, at stovnurin av sínum eintingum kann áleggja ómaksgjøld fyri ikki at nýta Vinnugluggan. Landsgrannskoðanin vísti á, at:

- tað ikki er ásett í lóg, at vinnukundar skulu brúka Vinnugluggan,
- tað ikki er siðvenja hjá stovninum at áleggja ómaksgjøld á brúkarar,
- talan er um "revsing" ella gjald fyri ikki at nýta skipanina, og at
- talan er ikki um eina sjálvbodna skipan (uttan gjald).

Landsgrannskoðanin bað um viðmerkingar frá Fíggjarmálaráðnum.

Ongin pantiheimild.

Í oktober 2015 svarar landsstýriskvinnan ikki beinleiðis, men sigur, at hon ætlar at leggja uppskot fyri Løgtingið um at gera broyting í meirvirðisgjaldslógini soleiðis, at fyritøkur fáa álagt at nýta Vinnugluggan hjá TAKS í sambandi við at lata inn MVG-uppgerðir og til at gjalda MVG.

Landsgrannskoðanin spurdi eisini Fíggjarmálaráðið, hvar innheintingar- og pantiheimildirnar eru ásettar fyri ómaksgjøldini. Í august 2015 svaraði landsstýrismaðurin, at vegna vantandi pantiheimild, pantar TAKS ikki longur fyri tílík gjøld.

3.9 Fígging landsins (LG 2014/203-0151)

Í frágreiðing okkara til løgtingsgrannskoðararnar oktober 2014 varð Fígging landsins umrødd. Stovnurin hevur m.a. til uppgávu at umsita gjaldførið og skuldina hjá landinum.

Lógargrundarlagið undir virkisøkinum hjá Fígging landsins er Ll. nr. 140/2012. Sambært § 1 verða landsins gjaldføris- og skuldarviðurskifti fyrisitin av Gjaldstovuni eftir ásetingum frá Gjaldstovuráðnum, og sambært § 2, stk. 1, er Gjaldstovuráðið ovasti myndugleiki fyri virkseminum.

Landsgrannskoðanin grannskoðar Gjaldstovuna, herundir eisini Fígging landsins. Í sambandi við grannskoðan av Fígging landsins fyri fíggjarárið 2014 hava vit við heimild í § 9, stk. 3, í grannskoðanarlógini valt at útveita ein part av grannskoðanini til løggilt grannskoðanarvirki. Avtalað er, at Landsgrannskoðanin kannar landskassaskuldina, meðan grannskoðanarvirkið kannar porteføljuskipanina og plaseringar av gjaldføri.

Landsgrannskoðanin hevur eisini kannað tøkan pening, sum Fígging landsins umsitur ein part av. Greitt verður frá tí í serstøkum broti undir fíggjarstøðuni.

3.9.1 Landskassaskuld

Heimild at læna

Sambært § 42 í Ll. nr. 103/1994 "um stýrisskipan Føroya" kann lán ella borgan, ið skuldbindur løgting, landsstýri ella stovnar undir landinum, ikki verða tikið uttan við heimild í lóg. Sambært § 1 í Ll. nr. 116/1991 "um lántøku til landskassan og umlegging av landskassalánum" verður landsstýrinum heimilað landskassans vegna at taka lán til at rinda avdráttir av lánum, til afturrindan av lánum og til framskundaða afturrindan av lánum í Føroyum og uttan fyri Føroyar.

Landsgrannskoðanin hevur kannað lániheimildirnar fyri árini 2011 til 2014. Vit hava onki at finnast at.

Lánini í tráð við prospektið

Í sambandi við lántøku ger Gjaldstovan kunningartilfar til íleggjarar og onnur, nevnt prospekt. Í prospektinum er m.a. kunning um búskaparviðurskifti, upplýsingar um

útgevaran av lánsbrøvunum og upplýsingar um lánsbrøvini, so sum samlaða upphædd, rentu, kurs, leypitíð og fondskotu.

Landsgrannskoðanin hevur kannað, um lánini, sum vóru virkin við árslok 2014, eru í tráð við prospektini. Vit hava onki at finnast at.

Avstemman av brævalánum

Vit samanhildu lánsupphæddirnar við uttanhýsis tilfar, ið var tøkt í sambandi við avrokning av lánunum, tá ið tey vórðu stovnað og við restsalduna við árslok 2014. Vit hava einki at finnast at.

Skráseting av brævalánum í landsroknskapinum

Í landsroknskapinum, notu nr. 7, eru lánini skrásett við áljóðandi virði umframt tíðaravmarkaðari rentu og kursmuni í sambandi við emission. Samlaða bókaða virðið við árslok 2014 er 4.417 mió.kr. í mun til 4.820 mió.kr. árið fyri.

t.kr./%

Nr.	Heiti	Restskuld við árslok 2014	Tíðargreinað renta	Dagur	Roknað renta %	Ásett renta %
3013	FO-LB 180610	40.075	840	10-06	3,750	3,750
3017	FO-LB 160622	1.350.000	22.310	22-06	3,142	Var.
3018	FO-LB 150611	880.000	7.341	11-06	1,500	1,500
3019	FO-LB 170627	1.000.000	8.966	27-06	1,750	1,750
3020	FO-LB 190620	1.100.000	10.231	20-06	1,750	1,750
Tilsamans		**4.370.075**	**49.688**			

Í talvuni hava vit eftirroknað tíðargreinaðu rentuna av hvørjum láni sær í mun til restskuldina við árslok 2014. Vit hava onki at finnast at.

Vit hava somuleiðis funnið kursmunin við emission fyri hvørt lánið og eftirroknað, hvat virðið av kursmuninum fyri hvørt lánið skuldi verið við árslok 2014. Sambært roknskaparmeginreglunum í landsroknskapinum verður sjálvur kursmunurin og ikki aðrar útreiðslur, t.d. sølukostnaður av brævalánunum avskrivaður yvir lánstíðina. Í talvuni niðanfyri er ein samanbering við tað, sum er bókað í Búskaparskipan landsins.

t.kr.

Nr.	Láns-upphædd	Kursmunur	Ára-mál	Ár eftir	Árlig amortis.	Roknað restvirði	Bókað restvirði
3013	750.000	-8.400	12,55	3,44	-669	-1.282	-123
3017	1.350.000	0	5,01	1,48	0	0	-797
3018	1.128.000	2.301	3,00	0,44	767	266	-55
3019	1.000.000	-270	4,00	2,49	-67	-168	-167
3020	1.100.000	-1.551	5,22	4,47	-297	-1.328	-1.328
Tils.	**5.328.000**	**-7.920**			**-266**	**-2.512**	**-2.470**

Árliga amortiseringin er roknað út frá, um lánini verða avdrigin sum ætlað. Í roknaða restvirðinum hava vit tikið hædd fyri, um lánini eru avdrigin skjótari enn ætlað. Vit hava onga viðmerking viðvíkjandi lánunum nr. 3019 og 3020.

Lán nr. 3013

Lánið er eitt annuitetsbrævalán, tó eru einar 333 mió.kr. goldnar meira niður enn ætlað í 2009 til 2012. Verður parturin av kursmuninum, sum stavar frá meiravdráttinum, drigin frá, átti restvirðið av kursmuninum við árslok 2014 at verið umleið 1.282 t.kr. Sostatt eru 1.159 t.kr. ov nógv útreiðsluførdar av kursmuninum til og við 2014. Frá og við 2013 er avdrátturin minkaður til áleið 9 mió.kr. um árið.

Lán nr. 3017

Lánið varð stovnað við variablari rentu og hevði ongan kursmun í sambandi við emission. Tó eru 2,4 mió.kr. bókaðar inn sum kursmunur í 2011 og síðani amorti-

seraðar. Fígging landsins hevur greitt frá, at talan er um sølukostnað, sum verður avskrivaður yvir lánstíðina.

Lán nr. 3018

Lánið hevði 2,3 mió.kr. í kursvinningi við stovnan í 2012. Sama ár eru 2,6 mió.kr. bókaðar øvugan veg, og munur síðani amortiseraður. Fígging landsins hevur greitt frá, at talan er um sølukostnað og annan kostnað, sum verður avskrivaður yvir lánstíðina.

Skráseting av rentum v.m. í landsroknskapinum

Sambært landsroknskapinum vóru rentuútreiðslurnar 116,8 mió.kr. í 2014 í mun til 136,9 mió.kr. árið fyri. Upphæddirnar svara til tað, sum er bókað á stovnsnr. 126201 "Rentur at gjalda":

t.kr.

StRk.útgr.	Heiti	2013	2014
5730.1000	Rentur av innanlandsskuld, ið eru goldnar – rentur	125.183	129.691
5730.2000	Rentur av innanlandsskuld, ið eru goldnar – ómaksgjøld	2.000	2.200
5731.0000	Munur – tíðaravmarkað renta og goldin renta (innanlands)	-871	-20.130
5770.0000	Kursmunir, ið eru goldnir (staðfestir)	8.887	3.050
5771.0000	Ikki staðfestir kursmunir av restskuld	601	1.014
5790.0000	Aðrar rentuútreiðslur	1.112	997
Tilsamans		**136.912**	**116.822**

Í talvuni niðanfyri eru goldnar og tíðargreinaðar rentur fyri 2014 býttar á lánini. Vit hava roknað, hvat samlaða rentuupphæddin fyri hvørt lánið er í mun til eina miðalsaldu á láninum í 2014. Roknaða rentan er samanborin við ásettu rentuna á hvørjum láni.

t.kr./%

Nr.	Miðalsalda 2014	Goldnar rentur	Tíðargr. rentur	Rentur tilsamans	Roknað renta %	Ásett renta %
3013	44.640	1.845	-191	1.654	3,705	3,750
3016	1.225.000	38.281	-28.108	10.173	3,125	3,125
3017	1.350.000	51.649	7	51.656	3,826	Var.
3018	1.004.000	16.196	-2.069	14.127	1,407	1,500
3019	1.000.000	17.500	0	17.500	1,750	1,750
3020	1.100.000	4.219	10.232	14.451	1,750	1,750
Tils.	**5.723.640**	**129.691**	**-20.130**	**109.561**		

Rentan av láni nr. 3016 er roknað í mun til, at lánið var útgoldið 7. apríl 2014. Rentan av láni nr. 3020 er roknað í mun til, at lánið er stovnað 1. apríl 2014.

Eins og undanfarna ár er rentan av láni nr. 3017 út við 52 mió.kr., svarandi til góð 3,8%. Tað er nakað hægri enn fast rentaðu lánini, sum eru tikin seinastu árini. Sambært prospektinum skuldi rentan á láninum upprunaliga svara til CIBOR 3 mánaðir umframt 0,75% meirrentu. Lánið er frá 2011 og skal rindast aftur í 2016.

Vit hava gjøgnumgingið bókaðar upphæddir av ómaksgjøldum, staðfestum kursmuni o.ø. Vit hava onki at finnast at.

Amortiseringin í árinum er 1.014 t.kr. Viðvíkjandi lánunum nr. 3013, 3017 og 3018 hava vit víst á, at amortiseringin er ikki rætt í mun til upplýstu roknskaparmeginreglurnar og hevur tí ávirkan á roknskapartølini tey einstøku árini.

Amortiseringin fyri eldru lánini er ikki í tráð við upplýstu meginreglurnar.

Samanumtikið um brævalánini

Sambært roknskaparmeginreglunum í landsroknskapinum 2014 verður einans kursmunurin amortiseraður yvir lánstíðina. Amortiseringin viðvíkjandi lánum nr. 3013, 3017 og 3018 er tí ikki rætt og hevur tískil ávirkan á roknskapartølini einstøku árini.

Í seinastu frágreiðingini vísti Landsgrannskoðanin á, at tað er óheppið, at sami framferðarháttur ikki er nýttur fyri øll brævalánini. Vit mæltu til, at øll brævalánini verða viðgjørd sambært upplýstum roknskaparmeginreglum framyvir. Roknskapurin fyri 2014 er ikki rættaður í mun til tilmælið.

Fígging landsins hevur greitt frá, at talan er ikki um stórar upphæddir í mun til lánini, og at møguligar rættingar fara um útjavningarkontuna og tí ikki síggjast aftur í rakstrinum. Fígging landsins hevur tó tikið tilmælið til eftirtektar og fer at nýta ásettu roknskaparmeginreglur fyri nýggj lán.

3.9.2 Porteføljuskipanin og plaseringar av gjaldføri

Partur av grannskoðanini er útveittur.

Sum nevnt, hevur Landsgrannskoðanin útveitt ein part av grannskoðanini. Grannskoðaravirkið hevur grannskoðað hesi øki:

Porteføljuskipanin:
Grannskoðarin hevur útvegað og mett um grannskoðaraváttan, um skipanina, og hevur kannað:

- um øll trygdartiltøk verða hildin (innritan, funktiónsskilnaður, trygdaravrit o.s.fr.),
- um skipanin roknar rætt (goymslu, kursvinnging/tap, rentur o.s.fr.),
- um útskriftir eru rættar og álítandi,
- um transaktiónsslóðin millum porteføljuskipanina og Búskaparskipan landsins er í lagi, og
- um samsvar er millum porteføljuskipanina og Búskaparskipan landsins.

Plaseringar av gjaldføri:
Grannskoðarin hevur kannað:

- um Gjaldstovan hevur nøktandi og dagførdar skrivligar mannagongdir um, hvar hon plaserar gjaldførið,
- um mannagongdirnar verða hildnar,
- um plaseringarnar av gjaldførinum eru sambært Ll. nr. 140/2012,
- um plaseringarnar av gjaldførinum eru í tráð við instruksin frá Gjaldstovuráðnum,
- um Fígging landsins heldur seg til roknskaparinstruksin við Fíggjarmálaráðið viðvíkjandi plaseringum av gjaldføri, og
- um starvsfólk, ið gera íløgur, hava heimild, og um tey halda seg til hana.

Niðurstøðan er, at týðandi eftirlit eru nøktandi.

Niðurstøðan hjá grannskoðaranum er, at:

- kontrollirnir, sum eru knýttir at nevndu kontrollmálum, í øllum týðandi lutum kunnu metast at vera nøktandi og hava verið nøktandi í tíðarskeiðnum 1. januar til 31. desember 2014, og at
- teir testaðu kontrollirnir, sum vóru neyðugir fyri at geva høga vissu fyri, at kontrollmálini blivu rokkin í øllum týðandi lutum, hava virkað í tíðarskeiðnum 1. januar til 31. desember 2014.

Grannskoðarin hevur hesar ískoytisupplýsingar:

Fíggjarmálaráðið hevur enn ikki góðkent roknskaparinstruksin.

"Vit hava undir okkara arbeiði staðfest, at roknskaparinstruksurin við Fíggjarmálaráðið, sum m.a. umfatar ásetingar um plaseringar av gjaldføri, fyriliggur sum uppskot, men ikki er endaliga samtyktur."

Grannskoðarin vísir á, at transaktiónsslóðin millum porteføljeskipanina og Búskaparskipan landsins er ikki optimal, tí at tað ikki ber til at finna allar skrásetingar av einari bóking í Búskaparskipan landsins, men neyðugt er at fara víðari til porteføljuskipanina, um skrásetingar av eini transaktión skulu finnast fram.

3.10 Landsverk (LG 2014/203-0381)

Landsgrannskoðanin hevur kannað lønir hjá Landsverki við atliti at flytingum av lønum frá rakstri hjá stovninum til løgur.

Í fíggjarlógunum er ongin upphædd játtað til lønir á løguni. Í talvuni niðanfyri síggjast lønir sum Landsverk hevur bókað á rakstrarjáttanir og løgujáttanir.

Lønir fluttar á løgur.

t.kr.

Játtanarslag	2009	2010	2011	2012	2013	2014
Rakstrarjáttan	53.065	53.845	51.995	45.545	46.988	51.960
Løgujáttan	188	0	0	7.894	10.484	11.104
Tilsamans	**53.253**	**53.845**	**51.995**	**53.439**	**57.472**	**63.064**

Landsverk hevur greitt frá, at *"fyri at hava størsta gjøgnumskygni á verkætlanunum og kunna vísa, hvat verkætlanirnar kosta, so bóka vit allar útreiðslur út á løgurnar, sum eru tengdar at løguni. Tí bóka vit lønarpartin út á verkætlanirnar til hesar løgur. Tað er umráðandi, at vit halda greiðan skilnað millum lønirnar til rakstur og løgur".*

Landsgrannskoðanin skilir áskoðanina hjá Landsverki um at halda skil á, hvussu nógv verkætlanir kosta, og at stovnurin hevur tørv á at gera roknskap fyri hvørja løgu, men er tó ikki samd í, at tað skal gerast við at flyta lønarútreiðslur og annan rakstrarkostnað frá rakstrarjáttanini hjá stovninum til løgujáttanirnar, ið stovnurin hevur ræðisrætt á.

Sambært § 3, stk. 1, í játtanarlógini skal fíggjarlógin fevna um allar inntøkur og útreiðslur, og sambært stk. 2 skal fíggjarlógin verða ætlað eftir somu meginreglum, sum eru galdandi fyri gerð og uppsetingini av landsroknskapinum.

Játtanin skal vera ætlað eftir somu meginreglum sum landsroknskapurin.

Landsgrannskoðanin hevur áður í sínum frágreiðingum til løgtingsgrannskoðararnar víst á, at tað er ikki rætt at tvinna umsitingar-/fyrisitingarútreiðslur hjá einum stovni saman við øðrum játtanum, ið stovnurin umsitur.

Landsgrannskoðanin heldur, at roknskapurin er ikki nóg gjøgnumskygdur, tá ið ein stovnur pilkar út nakrar av sínum útreiðslum og spjaðir tær út á aðrar játtanir, ið stovnurin hevur ræði á. Ein slík mannagongd kann vera við til at fjala hækkandi fyrisitingarútreiðslur.

Gjøgnumskygni minkar, tá ið útreiðslur verða spjaddar á aðrar játtanir.

Um so er, at lønar- og umsitingarútreiðslur hjá Landsverki skulu rindast av løgujáttanum, heldur Landsgrannskoðanin, at tað átti at verðið gjørt øðrvísi. Tá ið flutt verður ímillum høvuðskontur, ber til at gera tað umvegis høvuðsslag 7, t.v.s. standardkontur 71 og 76. Í vegleiðingini til høvuðsslag 7 verður m.a. sagt, at *"hóast talan er um, at pengarnir eru játtaðir aðrastaðni, enn teir verða brúktir, so er ikki talan um at flyta játtan millum høvuðskontur. Henda konta skal bert verða nýtt, um grundarlagið undir bókingini er ein uppgerð, sum fevnir yvir beinleiðis og realar mótveitingar, sum t.d. lønir og keyp av vørum og tænastum."*

Mannagongdin hjá Landsverki í sambandi við lønarútreiðslurnar forðar fyri gjøgnumskygni og ger tað nærum ógjørligt hjá játtandi myndugleikanum at halda skil á, hvussu stórar lønarútreiðslurnar hjá stovninum eru. Harafturat verður tað upp aftur verri, tá ið stovnurin broytir mannagongdirnar uttan at boða frá tí í roknskapinum.

Landsgrannskoðanin heldur, at mannagongdin við at minka lønarútreiðslurnar hjá Landsverki ger, at roknskapirnir eru ikki rættir.

Mannagongdin ger, at roknskapurin ikki er rættur.

Í juni 2015 hevur Fíggjarmálaráðið greitt frá, at ráðið er samt við Landsgrannskoðanini um, at markamótið millum vanliga virksemið hjá Landsverki og løguverkætlanirnar skal vera greitt tilskilað. Eisini ásannar Fíggjarmálaráðið, at

gjøgnumskygni í roknskapinum er ikki nóg gott, serstakliga tí at lønarútreiðslur verða bókaðar út á løgur.

Sambært Fíggjarmálaráðnum hevur Landsverk upplýst, at *"játtanin til undirkontuna Byggi- og bygningsumsiting er til grundrakstur, sum er innanhýsis menning, at umsita leigumál, at taka sær av keypi og sølu av ognum, byggifrøðilig ráðgeving til stjórnarráðini, sum ásett í rættarreglum innan bygging, umframt húsaskoðan. Hetta svarar væl til upprunaligu uppgávurnar hjá Byggi- og bygningsumsitingini."*

Løgujáttanir til bygningar nógv øktar.

Fíggjarmálaráðið vísir á, at Landsverk í 2014 hevði ræðisrætt til løgujáttanir á 290 mió.kr., harav 195,3 mió.kr. vóru til landsins bygningar, samanborið við ávikavist 143,7 og 53,6 mió.kr. í 2013 og 2012 til bygningar. Ráðið hevur eisini kunnað um, at Landsverk kann ikki røkja uppgávuna sum byggiharri og hava verkætlanarleiðslu, um útreiðslur hjá stovninum ikki verða bókaðar út á løguverkætlanirnar, og at tað er neyðugt fyri at kunna samanbera verkætlanarkostnað.

Fíggjarmálaráðið hevur ikki tikið støðu til, hvussu flyting av lønum skal viðgerast.

Sambært Fíggjarmálaráðnum fer ráðið saman við Landsverki og Gjaldstovuni at viðgera møguleikan at flyta lønar- og aðrar rakstrarútreiðslur ímillum rakstur og løgur við at gera "innanhýsis flytingar millum almennar myndugleikar".

4 Fiskivinnumál

4.1 Búnaðarstovan (LG 2014/205-0332)

Í 2014/2015 grannskoðaðu vit Búnaðarstovuna og játtanina “Stuðul til stráfóður”. Endamálið var m.a. at kanna innanhýsis mannagongdir og innaneftirlit hjá stovninum.

KT-trygd

Búnaðarstovan hevur avtalu við KT Landsins og er fevnd av teirra reglum um kunningartøkni. Leiðslan hevur gjørt ávegis váðameting í februar 2012, sum fatar um journalskipan, skjala- og ílegugoymslur, umframt maskinur, amboð og bygningar. Stovnurin hevur ikki serligar reglur um trygdarpolitikk. Landsgrannskoðanin mælti til at gera skrivligar reglur um trygdarpolitikk.

Roknskaparviðurskifti

Fleiri manglar vóru viðvíkjandi sølu umvegis kassan. Kiloprísur og vekt sæst ikki altíð á skjølunum. Inntøkuskjøl verða nýtt, har dagfesting, nøgd, prísur ella navn á móttakara ikki síggjast. Partur av søluni er bókaður eftir flytingum í peningastovni.

Søla lýkur ikki bókhaldskrøv.

Landsgrannskoðanin mælti Búnaðarstovuni til m.a. at gera mannagongdir viðvíkjandi persónsskilnaði millum bókhald og kassa, at avgreiða allar rokningar umvegis Gjaldstovuna og at flyta inntøkurnar av sølu beinleiðis í landskassan.

Ikki skilnaður ímillum bókhald og kassa.

Fiskimálaráðið tekur undir við tilmælinum frá Landsgrannskoðanini.

Búnaðarstovan hevði 400 t.kr. í fíggjarstøðuni, ið stavaðu frá endurgjaldi fyri seyðahús, ið varð tikið niður, tá ið nýggjur vegur varð gjørdur. Í 2013 vórðu 233 t.kr. av støðlaðu upphæddini nýttar til at umvæla tvey seyðahús og at gera nýggja rætt.

Landsstýrismaðurin er samdur við Búnaðarstovuna um at nýta endurgjaldið til viðlíkahald, og hann heldur, at tað er í tráð við játtanarreglurnar.

Búnaðarstovan hevur árini 2012 til 2014 nýtt millum 30 og 40 t.kr. um árið til jólaborðhald, útferðir, kjøtsmakking v.m. til tey 9 starvsfólkini. Spurdur, um nýtslan er hóskandi í mun til virksemi stovnsins, og um skynsom fíggjarlig atlit eru tikin, hevur landsstýrismaðurin í juli 2015 svarað, at Fiskimálaráðið hevur ikki felags politikk á økinum, men letur tað upp til stovnsleiðslurnar at skipa sín starvsfólkapolitikk.

Lønir

Landsgrannskoðanin kannaði nakrar lønir. Vit høvdu onki at finnast at útgoldnu lønunum, men mæltu til, at øll starvsfólk fáa setanarskriv, og at meginreglurnar um +/- tímar verða hildnar. Eisini vístu vit á, at tá ið seyður verður latin sum løn fyri røkt og fjallgongu, er tað ikki at rokna sum skattskyldug veiting sambært skattalógini. Tó er seyður, ið er latin sum samsýning fyri fletting, at rokna sum skattskyldug inntøka.

Stuðulsverkætlanir
Vit mæltu til, at formligt loyvi verður útvegað til virksemið, ið verður fíggjað av øðrum, og at tað verður sett á sjálvstøðuga undirkontu[3] í landsroknskapinum soleiðis, at tað sæst í sundurgreiningini í fíggjarlógini og í landsroknskapinum, hvussu virksemið hjá stovninum er sett saman.

Fiskimálaráðið tekur undir við Landsgrannskoðanini.

Bygningar
Í 2013 vórðu 5,1 mió.kr. av innistandandi hjá Búnaðargrunninum markaðar til Búnaðarstovuna til ábøtur á bygningarnar í Kollafirði.

Í juli 2015 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at enn er ikki greitt, hvat skal gerast við bygningarnar, og tí er peningurin ikki nýttur.

4.2 Landbúnaðarstuðul (LG 2014/205-0332)

Við stakroyndum kannaði Landsgrannskoðanin útgjald av stráfóðurstuðli. Vit høvdu onki at finnast at.

4.3 Fiskivinnuroyndir (LG 2014/205-0343)

Í seinastu frágreiðingini umrøddu vit kanning av 6 verkætlanum hjá Fiskivinnuroyndum. Verkætlanirnar fyri 2011 eru endaðar, og peningurin goldin út.

Í november 2015 hevur Fiskimálaráðið kunnað um, at endaligu frágreiðingarnar sum væntaðu fyri tær báðar verkætlanirnar 2012 eru komnar.

Verkætlanirnar, vit kannaðu fyri 2013, høvdu fingið ávikavist 600 t.kr. og 615 t.kr. fyri 2013 og 2014. Verkætlanirnar eru endaðar, og peningurin goldin út.

4.4 Tinglýsingargjald (LG 2014/220-0522)

Landsgrannskoðanin hevur í 2015 grannskoðað tinglýsingargjøld, sum eru á høvuðskontu 20.52.2.30 (ógreinað játtað). Játtanar- og inntøkutøl seinastu fimm árini:

t.kr.

Slag	2010	2011	2012	2013	2014
Ognarheimildarskjøl føst ogn	6.890	6.958	6.318	6.462	7.393
Veðbrøv føst ogn	12.133	9.469	9.108	8.664	8.661
Veðbrøv leysafæ	1.740	2.747	2.268	2.198	2.721
Átekningar	1.481	1.148	1.223	1.284	1.087
Úttøkur	260	190	220	159	159
Annað	-13	-18	-30	-84	-66
Roknskapur tilsamans	22.491	20.494	19.107	18.683	19.955
Fíggjarlóg	20.000	23.000	20.000	20.000	18.000
Minni-/meirinntøka (-/+)	**2.491**	**-2.506**	**-893**	**-1.317**	**1.955**

Tinglýsingargjaldið er 1.000 kr. + ½ prosent av keypsprísi av fastari ogn og av veðtryggjaðu upphæddini, tá ið rættarveð verður tinglýst. Umhvørvisstovan hevur ikki ásett reglur fyri meting av virðinum av ognum, ið skulu tinglýsast. Tað hevur týdning, tá ið talan er um gávur ella arv, ið skulu tinglýsast.

[3] Sí K. nr. 84/2011 “um rakstrarjáttan”

Í juli 2015 hevur Fiskimálaráðið boðað frá, at ráðið ætlar at fáa greiði á, hvussu føst skipan kann setast í verk fyri at meta um ogn, ið ikki verður seld á fría marknaðinum.

Kunningartøkni

Landsgrannskoðanin heldur, at tað er ikki nøktandi, at bert ein persónur kennir til og serviserar kassaskipanina, og mælti Umhvørvisstovuni til at umhugsa tiltøk, sum kunnu minka um vandan av at vera bundin at einum persóni at servisera skipanina. Eisini varð mælt til at gera formligar mannagongdir, hvussu farast skal fram, um skipanin ikki virkar í styttri ella longri tíð.

KT-skipan sárbær við einum sum serviserar.

Í juli 2015 hevur Fiskimálaráðið kunnað um, at ráðið er greitt yvir, at trupulleikar eru við ávísum KT-skipanum hjá Umhvørvisstovuni. Fiskimálaráðið vónar, at verkætlanin Talgildu Føroyar fer at varpa ljós á, hvat best er at gera. Eisini er neyðugt at tillaga og endurskoða mannagongdirnar viðvíkjandi KT-skipanunum.

Fiskimálaráðið hevur eisini boðað frá, at Umhvørvisstovan fer at dagføra roknskaparreglugerðina soleiðis, at mannagongdirnar verða betri skjalfestar.

4.5 Avgjald av fiskatilfeingi (LG 2014/220-0522)

Landsgrannskoðanin hevur í 2015 kannað reglurnar fyri innkrevjing av avgjaldinum á fiskatilfeingi, roknskaparviðurskiftini og eftirstøður v.m., sum Vørn umsitur.

Avgjøldini eru á hvørjum ári ásett sambært lóg. Kilogjald er fyri norðhavssild og makrel, mált í rundari vekt, undantikið hjá eigarum av fiskiførum á føroysku landleiðunum sambært § 28, stk. 1, í Løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap.

Roknskaparreglur

Vørn hevði ikki ásett mannagongdir um inntøkur, ið verða álíknaðar/tilskrivaðar sambært lóg e.t., umframt skrivligar mannagondir um eftirlit við skuldarakontum, sum ásett er í rundskrivi frá Fíggjarmálaráðnum frá 2001 um roknskaparreglugerðir.

Í november 2015 hevur Fiskimálaráðið kunnað um, at Vørn hevur sett reglur í roknskaparreglugerðina um avgjald av fiskatilfeingi.

Renturokning

Í lógunum um avgjøld av fiskatilfeingi er ásett, at renta skal roknast av ov seint goldnum upphæddum.

Vørn roknar ikki rentu og heldur seg ikki hava ábyrgd av tí, men vísti til, at tað var Gjaldstovan, ið skuldi rokna rentuna.

Landsgrannskoðanin helt tað ikki vera nøktandi, at lógarásettar reglur um renturokning ikki verða fylgdar, og mælti leiðsluni til at finna eina loysn, soleiðis at kravið um renturokning varð fylgt.

Vørn roknar ikki rentur av áogn.

Í november 2015 hevur Fiskimálaráðið greitt frá, at “Sambært lógini skal tann sum krevur inn rokna rentu av eftirstøðuni. Sambært avtalu millum Vørn og TAKS er tað TAKS, sum skal krevja inn eftirstøðurnar. Fiskimálaráðið hevur onga orsøk til at halda, at TAKS ikki heldur lógina.”

Sambært Fiskimálaráðnum sendir Vørn krøvini til TAKS til innheintingar í teirri trúgv, at krøvini (íroknað rentur og kostnaðir annars) verða kravd inn eftir galdandi reglum. Tá ið tað stendur í lógini, at TAKS skal heinta rentur inn, og TAKS ikki hevur heitt á Vørn um at heinta inn, má tað skiljast, sum at TAKS hevur accepterað at áseta

renturnar og eftirfylgjandi at heinta tær inn. Hendan acceptin kann skiljast sum ein avtala.

Landsgrannskoðanin kann staðfesta, at § 7, stk. 4, í Ll. nr. 154/2013 ásetir[4], at renta skal roknast við 1% fyri hvønn byrjaðan mánaða eftir at gjaldsfreistin á 10 dagar er farin. Vørn hevur ikki roknað rentu av teimum krøvum, ið eru goldin ov seint, men ikki send TAKS til innheintingar, og TAKS hevur heldur ikki roknað rentu av krøvunum, ið TAKS hevur kravt inn. Rentan av krøvunum, ið TAKS heintaði inn í 2014 átti at verið góðar 160 t.kr.

Avskrivingar

Í 2014 hevur Vørn avskrivað upphæddir hjá reiðaríum, ið eru farin á heysin: 3,9 mió.kr. á § 20 fyri avgjald á fiskatilfeingi og 0,7 mió.kr. á § 5 fyri avgjald at landa uttanlands.

Landsgrannskoðanin hevur víst á, at upphæddirnar eru ikki rættar. Avskrivingin á § 20 skuldi verið 3,5 mió.kr., meðan avskrivingin á § 5 skuldi verið 1,1 mió.kr. Skrásetingin er tí ikki í tráð við játtanarreglurnar um, at avskrivingin skal vera á somu grein, sum inntøkan varð skrásett.

Í november 2015 hevur Fiskimálaráðið kunnað um, at mistøk eru hend viðvíkjandi avskrivingunum.

[4] Fyri 2013 var ásetingin í § 5, stk. 4, í Ll. nr. 73/2012.

5 Vinnumál

5.1 Kunngerðir o.a. til vinnufelagalógina (LG 2014/206-0111)

Nýggja vinnufelagalógin, Ll. nr. 73/2011 “um parta- og smápartafeløg” sum kom í gildi 1. januar 2012, tók av gomlu lógirnar um parta- og smápartafeløg, anordning nr. 1356/2007 og nr. 1111/2007. Nýggja lógin fekk gildi við teimum undantøkum, sum heimilað eru í K. nr. 18/2012 “um skiftisreglur í sambandi við ígildiskomu av vinnufelagslógini”.

Nýggjar kunngerðir ikki lýstar.

Við nýggju lógini eru kunngerðir, fyriskipanir, loyvir, góðkenningar v.m. sambært gomlu lógini framvegis galdandi, til tær verða broyttar, afturkallaðar, fara úr gildi ella verða strikaðar eftir ásetingunum í nýggju lógini. Gomlu kunngerðirnar eru frá 2007 og 2009 og eru:

- K. nr. 87/2009 “um gjøld Skráseting Føroya fyri parta- og smápartafeløg”,
- K. nr. 86/2009 “um gjøld fyri útflýggjan av upplýsingum og skjølum frá Skráseting Føroya”,
- Bkg. nr. 1388/2007 “om medarbejderes valg af bestyrelsesmedlemmer i aktieselskaber og anpartsselskaber m.v.”,
- Bkg. nr. 1387/2007 “om medarbejderes valg af bestyrelsesmedlemmer i moderselskaber, der er aktieselskaber og anpartsselskaber m.v.”,
- Bkg. nr. 1383/2007 “om selskabers forpligtelser ved registrering af børsnoterede konvertible gældsbreve i Værdipapircentralen”,
- Bkg. nr. 1382/2007 “om anmeldelse, registrering og offentliggørelse m.v. hos den færøske registreringsmyndighed” og
- Bkg. nr. 1380/2007 “om tilbudsgivers indløsningspligt og indløsningsret ved et overtagelsestilbud”.

Í nýggju vinnufelagalógini fekk landsstýrismaðurin fleiri heimildir at áseta nærri reglur, herundir um reglurnar fyri partafeløg og serligu reglurnar fyri landspartafeløg í vinnufelagalógini og ársroknskaparlógini skulu galda landspartafeløg. Landspartafelag er sambært § 5, nr. 26, í lógini eitt partafelag, har landið hevur sama tilknýti, sum móðurfelag hevur til dótturfelag.

Í álitinum til Lm. nr. 42/2010 segði Vinnunevndin, at hon hevði fingið váttan frá Vinnumálaráðnum um, at kunngerðirnar til vinnufelagalógina komu í gildi saman við lógini.

Føroysk vegleiðing alstóran týdning.

Í álitinum mælti Vinnunevndin til, at ein føroysk vegleiðing varð gjørd til lógina. Nevndin helt tað vera umráðandi at gera eina greiða vegleiðing til eina so týðandi lóggávu, sum ávirkar øll parta- og smápartafeløg, soleiðis at lætt og ómakaleyst var hjá øllum at skilja galdandi reglur. Vinnunevndin helt, at ein vegleiðing hevði lætt um hjá komandi íverksetarum.

Í desember 2014 spurdi Landsgrannskoðanin Vinnumálaráðið, hvussu gekst við arbeiðinum at gera nýggjar kunngerðir, og um nøkur vegleiðing var orðað.

Vinnumálaráðið svaraði, at tey vóru í holt við at leggja seinastu hond á hesar kunngerðir:

- "Um fráboðan, skráseting, avgreiðslugjald og almannakunngering v.m. hjá Skráseting Føroyar (Fráboðanarkunngerðin)",
- "Um treytir hjá kapitalfeløgum í sambandi við skráseting av umbýtiligum skuldarbrøvum í einari virðisbrævamiðstøð",
- "Um lán til útlendsk móðurfeløg",
- "Um fráboðan um týðandi kapitalpostar",
- "Um útloysingarskildu", og
- "Um starvsfólkaumboð í parta- og smápartafeløgum".

Ætlanin var, at kunngerðirnar skuldu koma í gildi stutt eftir ársskiftið 2014/15. Nú fýra ár eru liðin, síðani lógin varð samtykt, er bert kunngerðin "um skiftisskipanir" lýst.

Eftir svarinum frá Vinnumálaráðnum at døma varð ikki arbeitt við einari kunngerð, sum setir serligu reglurnar um landspartafeløg í gildi.

Í svarinum til Landsgrannskoðanina, hvørt vegleiðing er gjørd til vinnufelagalógina, vísti Vinnumálaráðið á, at fyrimyndin til nýggju lógina er danska selskabsloven. Erhvervsstyrelsen hevur gjørt 32 ymiskar vegleiðingar til donsku lógina; harav nakrar heilt drúgvar. Vinnumálaráðið hevur tikið spurningin um at gera vegleiðingar til vinnufelagalógina upp við Skráseting Føroya.

Uppskot til kunngerðir eru send til hoyringar.

Í november 2015 hevur Uttanríkis- og Vinnumálaráðið boðað frá, at uppskot til nýggjar kunngerðir eru gjørd og send Skráseting Føroya til viðmerkingar. Skráseting Føroya raðfestir fráboðanarkunngerðina soleiðis, at hon kann koma í gildi fyrst í komandi ári. Skráseting Føroya miðar eisini eftir, at hinar kunngerðirnar kunnu koma í gildi skjótast gjørligt, tó hevur kunngerðin um starvsfólkaumboðan prioritet.

Kunngerðin um fráboðan um týðandi kapitalpostar verður ikki sett í gildi, fyrr enn KT-skipanin hjá Skráseting Føroya er ment til endamálið.

Ein embætisbólkur viðvíkjandi eigarapolitikki landsins er í holt við at gera uppskot um kunngerð um at seta reglurnar í vinnufelagalógini og ársroknskaparlógini fyri landspartafelag í gildi.

5.2 Umsiting av vinnusjúkugrunninum (LG 2014/206-0211)

Í frágreiðing okkara í oktober 2012 umrøddu vit grannskoðan av umsitingini av Vinnusjúkugrunninum. Sambært § 78, stk. 7, í Ll. nr. 67/2009 "um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða" kann nevndin fyri Vinnusjúkugrunnin leggja dagligu umsitingina til ein annan almennan stovn. Nevndin hevur lagt dagligu umsitingina av grunninum til TAKS.

Í sambandi við at nýggj nevnd og nýggjur formaður vórðu vald, varð roknskapar-reglugerðin endurskoðað. Sambært Vinnumálaráðnum hevur stjórin á TAKS góðkent roknskaparreglugerðina í september 2014.

5.3 Rúsdrekkasøla landsins (LG 2014/206-0373)

Seinasta árið hevur Landsgrannskoðanin verið á ófráboðaðum kassa- og goymslueftirlitum á nøkrum deildum hjá Rúsdrekkasølu landsins. Vit stemmaðu dagligu sølurnar av við bókhaldið og peningastovnskonturnar og stemmaðu goymslurnar á sølustøðunum av við goymsluyvirlitið í høvuðsbókhaldinum. Um

ársskiftið gjørdu vit eftirlitsteljingar av goymsluni hjá Rúsdrekkasøluni. Onki var at finnast at.

5.4 Stuðulsjáttanir til orkumál (LG 2014/206-0374)

Í frágreiðing okkara í oktober 2013 greiddu vit frá grannskoðanini av stuðulsjáttanum til orkumál. Vinnumálaráðið hevði sum meginreglu nýtt "Reglugerð fyri stuðul til alternativar orkuverkætlanir", sum ásetir, hvussu stuðulin verður játtaður, og hvør kann søkja.

Í oktober 2013 hevði Vinnumálaráðið ikki fingið verkætlanarroknskapir fyri 2012 frá stuðulsmóttakarunum, hóast ráðið hevði rykt eftir teimum.

Í juli 2015 hevur Vinnumálaráðið boðað frá, at seinasti stuðulsmóttakarin hevur latið ráðnum ársfrásøgn fyri 2012, og at játtanin 350 t.kr. er útgoldin móti skjalprógvi fyri útreiðslur.

Ársfrásøgn 2012 er latin ráðnum.

5.5 Strandfaraskip landsins, løgujáttan (LG 2014/206-0382)

Í oktober 2014 vístu vit á, at Strandfaraskip landsins hevði skrásett smærri umvælingar bæði á høvuðskontu 6.38.2.02, ið er ein løgujáttan, og á høvuðskontu 6.38.2.01, ið er ein rakstrarjáttan.

Landsgrannskoðanin ivaðist í, um smærri umvælingar áttu at verða játtaðar sum løgujáttan, og um tað var í tráð við reglurnar í K. nr. 83/2011 "um løgujáttan". Landsgrannskoðanin helt, at tað kann forða fyri gjøgnumskygni í roknskapinum, at umvælingarnar verða skrásettar á fleiri høvuðskontur.

Í oktober 2014 vísti Vinnumálaráðið á, at sambært § 1 í K. nr. 83/2011 verður løgujáttan brúkt í sambandi við bygging, ognan ella avhending av bygningum, løgum, skipum o.ø. og til stór viðlíkahaldsarbeiði sambært § 22, stk. 1, í játtanarlógini.

Vinnumálaráðið skilti ivamálið hjá Landsgrannskoðanini, men vísti á, at tað er ikki gjørd nøkur allýsing av, hvat meinast við hugtakið "stór viðlíkahaldsarbeiði". Vinnumálaráðið helt tað tí vera upp til avvarðandi landstýrismann at meta um, og í síðsta enda upp til landsstýrismannin í fíggjarmálum, sum hevur evstu ábyrgd av fíggjarlógini, og sum leggur fíggjarlógaruppskotið fram vegna landsstýrið, at meta um, hvussu "stór viðlíkahaldsarbeiði" skulu allýsast.

"Stór viðlíkahaldsarbeiði" ikki allýst.

Í juli 2015 hevur Vinnumálaráðið boðað frá, at ráðið hevur ikki tikið spurningin upp við Fíggjarmálaráðið, hvørt játtanirnar eru rætt flokkaðar. Ráðið vísti á, at tá ið játtanir verða settar upp, er tað eftir boðum frá ella í samráði við Fíggjarmálaráðið, og vanliga flokkar Fíggjarmálaráðið játtanir sum rakstrar-, stuðuls- ella løgujáttan. Gevur Fíggjarmálaráðið boð um, at flokkingarnar skulu broytast, fer Vinnumálaráðið sjálvsagt at taka tað til eftirtektar.

5.5.1 Skúvoyarferja

Landsgrannskoðanin spurdi Vinnumálaráðið, um ráðið helt, at játtanin fyri 2014 til nýggju Skúvoyarferjuna fór at halda. Vinnumálaráðið svaraði, at nýggja Skúvoyarferjan var liðugt umvæld, uppstigað og sett í sigling, og at løgujáttanin sá út til at halda.

Í juli 2015 hevur Vinnumálaráðið kunnað um, at samlaða játtanin til Skúvoyarferjuna var 7,6 mió.kr., og at sambært Búskaparskipan landsins hevur ferjan kostað tilsamans 7.954 t.kr.

5.6 Akstovan (LG 2014/206-0384)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá Akstovuni. Endamálið var m.a. at kanna innanhýsis mannagongdir og innaneftirlit hjá stovninum.

Sambært § 64 í Ll. nr. 14/1988 "um ferðslu" skal Akstovan stíla fyri koyriroyndum, gera akfarstøkniligar kanningar og veita øðrum myndugleikum atstøðu við viðgerð av ferðslumálum. Landsstýrið kann eisini leggja aðrar virkistættir undir Akstovuna.

Akstovan umsitur vektgjøld av motorakførum sambært Ll. nr. 38/1982 og avgjøld við skráseting av akførum sambært Ll. nr. 33/2008. Ein røð av kunngerðum um ferðslu, vektgjøld og skráseting av akførum eru eisini at taka atlit at.

Roknskaparviðurskifti

Játtanin til Akstovuna er nettojáttan. Virksemið verður fíggjað við tænastugjøldum sambært ferðslulógini, sum eru fyri m.a. sýn, nummarspjøldur og koyriroyndir.

Roknskapartøl 2010 til 2014:

t.kr.

St.kt.	Heiti	2010	2011	2012	2013	2014
11	Lønir v.m.	7.063	6.478	6.354	6.705	7.143
14	Keyp av vørum og tænas.	3.639	3.711	3.619	3.983	4.127
15	Keyp av útbúnaði, netto	55	96	277	242	612
16	Leiga, viðlíkahald, skattur	537	358	541	835	869
21	Søla vørur og tænastur	-108	-115	-143	-144	-154
62	Kravd gjøld, bøtur o.a.	-11.447	-11.534	-11.800	-12.480	-12.940
	Annað	-7	-1	-17	-13	-24
	Tilsamans	**-268**	**-1.007**	**-1.169**	**-872**	**-367**
	Játtan	**-713**	**-1.250**	**-1.250**	**-825**	**-325**
	Meir-/minniinntøka	**-445**	**-243**	**-81**	**47**	**42**

Í 2010 til 2014 skuldi avlopið sambært játtanini vera ímillum 1.250 t.kr. og 325 t.kr. Akstovan rakk ikki játtaða avlopinum í 2010 til 2012. Krøvini til avlop vórðu lækkað í 2013 og 2014, og tá vórðu avlopini størri enn játtanirnar. Í 2015 er nettojáttanin avlop á 325 t.kr.

Roknskaparreglugerð og avrikssáttmáli

Avrikini umrødd hvønn ársfjórðing við ráðið.

Roknskaparreglugerðin hjá stovninum er góðkend av Innlendismálaráðnum og Fíggjarmálaráðnum í 2008. Síðani 2011 hevur Akstovan á hvørjum ári gjørt avrikssáttmála við viðkomandi aðalráð. Stjórin ger stuttorðað statusnotat í juni og uppgerð yvir framd avrik við árslok. Hvønn ársfjórðing verða avrikini umrødd millum stovnin og aðalráðið.

Roknskapargóðkenning

Akstovan váttar mánaðarligu roknskapirnar umvegis Roknskapargóðkenningarskipanina. Okkara kanning vísir, at roknskapirnir eru góðkendir rættstundis.

Kassaeftirlit

Landsgrannskoðanin hevur gjørt ófráboðað kassaeftirlit á Akstovuni. Samsvar var millum upptalda peningin, salduna í BSL og kassauppgerðina. Vit samanbóru saldurnar í peningastovnunum við mánaðarenda við saldurnar í BSL. Onki var at finnast at.

Tinglýsing og veðhavaralýsingar

Akstovan leggur út fyri tinglýsingargjøld og gjøld fyri veðhavaralýsingar fyri viðskiftafólk og krevur tey eftirfylgjandi innaftur.

Spurd, hvussu stovnurin tryggjar sær, at hann fær peningin afturgoldnan frá viðskiftafólkunum, svaraði leiðslan, at tey krevja gjøldini inn frá skrásettu eigarunum, tá ið akfør verða skrásett.

Í 2014 var munur á 7 t.kr. ímillum tað, sum Akstovan hevði lagt út í 2014, og tað, sum var kravt inn. Akstovan hevði ikki nakra ítøkiliga frágreiðing til munin, annað enn at talan møguliga var um tíðaravmarking millum ár.

Landsgrannskoðanin mælti Akstovuni til at stemma av ímillum tað, sum er lagt út, og tað, sum verður kravt inn.

Ognaryvirlit
Akstovan hevur dagført ognaryvirlit.

Lønir
Sambært Akstovuni halda tey seg til galdandi sáttmálar, starvsfólkahondbókina og til reglurnar fyri uppgerð av tænastuferðum. Vit kannaðu fýra lønarmál og høvdu onki at finnast at.

Í 2007 kunnaði Akstovan um, at tey nýttu ikki klokkuskipan, men at tey skrásettu arbeiðstíð, frítíð, avspáking og sjúku manuelt. Sama mannagongdin verður nýtt enn. Stjórin heldur ikki, at tørvur er á klokkuskipan, tí starvsfólk (sýnsfólk, próvdómarar o.o.) noyðast at vera til arbeiðis, av tí at avtalur fyri dagin eru gjørdar við viðskiftafólk frammanundan. Stovnurin hevur reglur og mannagongdir um meir-/minnitímar hjá starvsfólkum.

KT-viðurskifti
Teldurnar hava samband við alnetið gjøgnum Landsnet, og Akstovan luttekur eisini í trygdarpakkanum hjá KT Landsins. Akstovan hevur nakrar fakskipanir, har stovnurin sjálvur skipar trygdartiltøkini, m.a. koyrikortsskrá, akfarsskrá, veg-skattaskrá, sýnsskrá og kassaskipan.

Akstovan luttekur í trygdarpakkanum.

Fleiri stovnar og myndugleikar hava atgongd til ávísar skráir hjá Akstovuni, m.a. løgreglan, undirsjóartunlarnir, Vága Floghavn, TAKS, Gjaldstovan og tryggingarfeløgini. Onkrir hava fulla atgongd at spyrja, meðan aðrir bert hava atgongd til ávísar upplýsingar.

Akstovan tekur trygdaravrit dagliga og hevur lýst mannagongdirnar í trygdarhondbókini. Skipanin er sett upp soleiðis, at ambætararnir verða speglaðir. Speglambætarin stendur í sama rúmi sum høvuðsambætarin. Rúmið er ikki brandtrygt.

Landsgrannskoðanin mælti til, at trygdaravrit verður goymt trygt og á øðrum staði enn á Akstovuni. Stjórin ætlar at flyta speglambætaran til hølini hjá Akstovuni í Klaksvík áðrenn ársskiftið 2015/2016.

Sambært stjóranum hevur Akstovan roynt at endurskapa dátur frá trygdaravritum, eisini verða trygdaravrit tikin av dátum og av stýrisskipan.

Fakskipanirnar eru mentar av einum uttanhýsis forritara, men eru ogn hjá Akstovuni. Í 2002 gjørdi Akstovan tænastusáttmála við forritaran, har hann bant seg til at veita Akstovuni ávísar KT-tænastur, so sum ráðgeving, systemumsiting, dátugrunnaumsiting, menning og annað, sum tørvur er á viðvíkjandi fakskipanunum. Akstovan hevur javnan fund við forritaran um KT-viðurskifti á stovninum.

Landsgrannskoðanin mælti til, at KT-fundir og KT-hendingar verða skjalfest og váttað av stjóranum. Sambært stjóranum verður tað gjørt framyvir.

Akstovan hevur ikki “change management” mannagongdir. Sambært stjóranum hevur forritarin skjalfest skipanirnar, og er skjalfestingin tøk hjá Akstovuni.

KT-skipan sárbær við einum sum serviserar.

Landsgrannskoðanin heldur, at skipanirnar hjá Akstovuni eru sera týdningarmiklar fyri samfelagið, og at tað tí er óheppið, at stovnurin er bundin at *einum* persóni, sum kennir til skipanirnar, mennir tær og heldur tær viðlíka.

Landsgrannskoðanin mælti Akstovuni til at tryggja sær, at skipanirnar eisini kunnu koyra trygt, um forritaranum berst frá. Stjórin heldur, at ongin trupulleiki er at koyra skipanirnar trygt, um forritaranum berst frá, tí útgerðin er av sama slag, sum aðrir stovnar brúka.

Journalskipan

Akstovan fer at talgilda øll skjøl, sum liggja í saksmappum.

Akstovan nýtir journalskipan til fyrisitingarligt samskifti. Samskiftið um skráseting av akførum, sýn og um koyrikort verður ikki skrásett í journalskipanini, men ávikavist í bilskránni, sýnsskránni og koyrikortsskránni, og skjølini verða goymd í fysiskum arkivum, har hvørt akfar/persónur hevur sína saksmappu.

Leiðslan ætlar sum frálíður at talgilda øll skjølini, sum í dag eru í saksmappum, og skráseta tey í nýggju journalskipanini, samstundis sum tey fysisku skjølini fella burtur. Nýggj mál verða skrásett so hvørt.

Persónsviðkvæmar upplýsingar um t.d. heilsu og ávísar upplýsingar frá løgregluni verða goymdar í koyrikortsskránni. Sambært stjóranum eru tað bert heimilað starvsfólk, ið málsviðgera tey málini, sum hava atgongd.

5.7 Barsilsskipanin (LG 2014/220-0521)

Sambært § 20 í Ll. nr. 48/2001 ”um barsilsskipan” kunnu persónar, sum hava aðra inntøku av vinnu enn A-inntøku, tekna eina trygging. Sambært § 1 í K. nr. 59/2002 er gjaldið fyri tryggingina 500 kr. um árið fyri hvønn tryggjaðan.

Gjaldið fyri sjálv-bodnatrygging er ongantíð dagført.

Gjaldið fyri sjálvbodna trygging hevur frá fyrstan tíð verið 500 kr. árliga og varð ásett eftir einari meting. 500 kr. er lutfalsliga lítil upphædd í mun tey 0,62% av A-inntøkuni, sum løntakarar gjalda, og hóast tað hava sjálvbodnu tryggingartakararnir sama rætt at fáa pening úr skipanini sum A-skattgjaldarar.

Í juli 2013 kunnaði landsstýrismaðurin í vinnumálum um, at gjaldið á 500 kr. um árið varð ásett eftir einari meting, har árliga miðalinntøkan varð sett at vera 200 t.kr. Við einum tryggingargjaldi 0,25% svarar tað til 500 kr. um árið. Vinnumálaráðið ásannaði, at 500 kr. árliga fyri at vera partur av einari slíkari skipan helst var í lægra lagi, og boðaði frá, at ráðið fór at heita á umsitingina um at gera tilmæli um eitt hóskandi gjald.

Í apríl 2015 hevur Vinnumálaráðið í svari til Løgmansskrivstovuna boðað frá, at ráðið hevði arbeitt við at endurskoða gjaldið og fór í næstum at gera uppskot til broyting av gjaldinum, soleiðis at tað fór at verða í samsvari við tær lønarhækkingar, sum hava verið síðan 2002.

Barsilsskipanin er síðani løgd til Samferðslumálaráðið at umsita.

Landsgrannskoðanin hevur spurt Samferðslumálaráðið, hvussu røkist fyri broytingini, og nær ráðið væntar at seta broytingina í gildi.

6 Mentamál

6.1 Mentamálaráðið (LG 2014/207-0111)

Landsgrannskoðanin hevur í september 2015 grannskoðað fyrisitingina í Mentamálaráðnum og Prótvtøkum.

Mentamálaráðið fyrisitur málsøkini útbúgving, gransking og mentan. Prófstovan er eind í Mentamálaráðnum, ið hevur ábyrgd av at leggja til rættis og fremja skrivligar og munnligar prótvtøkur í fólkaskúlanum, miðnámsútbúgvingunum og maritimu útbúgvingunum. Prófstovan leggur eisini til rættis og fremur landsroyndir á hvørjum ári í 4. og 6. flokki og PISA-kanning triðja hvørt ár.

Stýringarmeginreglur um mál og nádd úrslit

Mentamálaráðið hevur ongar stýringarmeginreglur um mál og nádd úrslit, sum ásett í K. nr. 22/2007 “um roknskaparverk landsins o.t.” Aðalstjórin greiddi frá, at ráðið ætlar at gera mál- og avrikssáttmála. Ráðið førir yvirlit yvir málini, sum stovnurin umsitur og arbeiðir við, og á regluligum leiðslufundum verða tey gjøgnumgingin.

KT-trygd

Mentamálaráðið hevur gjørt váðameting. Skipanirnar eru á Landsnet og eru umfataðar av nýtslu- og trygdarreglunum hjá KT Landsins.

Í juni 2015 hevur grannskoðanarvirki kannað, hvussu Mentamálaráðið heldur krøvini til eftirlitspunktini í trygdarpakkanum frá KT Landsins. Grannskoðanarvirkið vísir m.a. á, at einasta “reyða” økið í váðametingini var “Prófstovan”, og KT Landsins arbeiðir við loysa tað.

Roknskaparviðurskifti o.a.

Roknskaparreglugerðin er dagførd í mars 2015. Ráðið hevur dagført ognaryvirlit, sum vísir hvar ognirnar eru, men vísir ikki prísin/virðið á ognunum.

Mentamálaráðið hevur gjaldkort, sum verður brúkt til at keypa á netinum. Ráðið hevur ongan kassa ella peningastovnskontu.

Lønir

Við støði í lønarútgjaldingum í november 2014 kannaði Landsgrannskoðanin, um lønirnar hjá fimm starvsfólkum vóru rættar. Vit samanhildu setanarskriv, prógv o.a. við galdandi lønarsáttmálar.

Í tveimum málum vóru ikki øll skjøl tøk, so sum prógv o.a., men aðrar upplýsingar í málinum gera, at vit halda lønirnar vera rættar.

Stórar flexsaldur vóru.

Í oktober 2014 fekk eitt starvsfólk løn fyri 750 yvirtímar og hevði tá 368,5 tímar tilgóðar. Í november 2015 eigur starvsfólkið 682 tímar tilgóðar. Landsgrannskoðanin heldur, at tað er alt ov nógv at eiga so nógvar tímar tilgóðar, og er tað heldur ikki í tráð við reglurnar hjá ráðnum. Sambært innanhýsis mannagongdum hjá Mentamálaráðnum kunnu starvsfólk hava flexsaldur +30/-30 tímar.

Í november 2015 hevur Mentamálaráðið greitt frá, at nógv yvirtíð er í prøvtøkutíðini, ið roynt verður at avspáka í slakari tíðum. Leiðslan ætlar at minka um tímatalið, starvsfólk eiga tilgóðar og fer seinni í ár at taka støðu til, hvussu nógv skal gjaldast út.

Vit kannaðu lønina hjá einum tímalønntum prøvdómara, sum í november 2014 fekk samsýning fyri prøvdøming til tríggjar prøvtøkur, harav tvær vóru í juni 2014. Tímasatsurin var 324,72 kr., og er tað sambært YF3 á lønartalvuni millum Yrkisfelagið Miðnám og Fíggjarmálaráðið.

Triðja samsýningin, sum er goldin í november 2014, er fyri prøvtøku hjá SIT-næmingum 20. desember 2012, og var tímasatsurin 249,53 kr. Sambært Mentamálaráðnum er tímasatsurin ásettur eftir lønartalvuni hjá Føroya Lærarafelag til læraralærd uttanífrá. Tann satsurin hevur verið nýttur í nógv ár á Prøvstovuni.

6.2 Nám (LG 2014/207-0231)

Í seinastu frágreiðing umrøddu vit grannskoðan av Námi.

Undirvísingaramboð

Ll. nr. 53/2014 “um at útvega undirvísingarmiðlar o.a.” er sett í gildi í mai 2014. Samstundis fór lógin frá 2005 úr gildi. Í september 2014 kunnaði landsstýrismaðurin um, at reglur eru ikki gjørdar um virksemið hjá stovninum og um stuðulsveitingina sambært ásetingunum í § 3 í lógini.

Nýggjar reglur eru ikki gjørdar um virksemið hjá stovninum.

Í august 2015 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at arbeitt verður við kunngerðini sambært § 3, stk. 4, um stuðul at gera undirvísingarmiðlar, men at arbeiðið við kunngerðini um virksemið hjá stovninum sambært § 3, stk. 2, er ikki byrjað.

KT trygd

Nám hevði ikki gjørt váðameting, sum ásett í rundskrivi frá Vinnumálaráðnum. Stovnurin hevði heldur ikki skrivligar reglur um trygdartiltøk, men fylgir reglunum hjá KT Landsins fyri tær skipaninir, sum eru í Landsneti.

Í august 2015 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Nám hevur arbeitt saman við KT Landsins við váðameting av dátugoymslu og trygd. Dátugoymslan er nú flokkað samsvarandi tilmæli frá KT Landsins. Ivamál er tó um servaran hjá svar.fo.

Eftirútbúgving og skeið

Arbeiðið at skipa eftirútbúgvingina í síni heild, sum byrjaði í 2013, er sambært landsstýrismanninum ikki liðugt.

Roknskaparreglugerð

Í desember 2014 var Landsgrannskoðanin á ófráboðaðum kassaeftirliti á Námi. Vit mæltu leiðsluni til at dagføra roknskaparreglugerðina, soleiðis at hon svarar til støðuna á samanlagda stovninum, og at kunna starvsfólkini um reglugerðina. Vit mæltu til, at einans kassameistarin hevði atgongd til kassan, soleiðis at skilnaður er millum bókhald og kassa.

Leiðslan hevur tikið undir við tilmælinum, og í februar 2015 kunnaði Mentamálaráðið um, at ráðið hevði fingið uppskot til nýggja roknskaparreglugerð til góðkenningar.

Kassi og peningastovnskonta

Nám nýtti kassan til sølu av bókum v.m. og til smærri útreiðslur. Okkara uppgerð vísti ein lítlan mun. Vit mæltu leiðsluni til at taka støðu til, um tað framvegis var neyðugt at hava kontantkassa. Somuleiðis mæltu vit til, at:

- reglur verða settar í roknskaparreglugerðina um leiklutin hjá ávikavist bókhaldara og kassameistara, og at
- viðkomandi skjøl til skrásetingarnar í kassauppgerðunum verða løgd við í Búskaparskipan landsins.

Í januar 2015 boðaði leiðslan frá, at hon tekur tilmælini til eftirtektar.

Nám hevði eina peningastovnskontu við hámarki á 5.000 kr., sum gjaldkort, ætlað til keyp um alnetið, er knýtt at. Vit stemmaðu kontuna av við kontuavrit frá peningastovninum. Onki var at finnast at.

Kontan bleiv eisini nýtt til ymiskar inntøkur. Leiðslan á Námi helt tað vera praktisk at hava eina peningastovnskontu, tá ið stovnurin, sum miðdepil í skúlaverkinum, mangan hevði samskipandi leiklutir fyri tiltøkum.

Landsgrannskoðanin heldur, at inntøkurnar áttu at verðið goldnar beinleiðis á kontu hjá Gjaldstovuni. Eisini hildu vit, at útreiðslurnar, sum gjaldkortið varð nýtt til, eins væl kundu verðið rindaðar umvegis Búskaparskipan landsins.

Í februar 2015 boðaði landsstýrismaðurin frá, at kassin og peningastovnskontan verða løgd niður, og at stovnurin ístaðin útvegar sær gjaldkort, sum ikki er knýtt at peningastovnskontu.

6.3 Skúlatilboð til ung við breki (Rásin) (LG 2014/207-0232)

Rásin er skúlatilboð til ung við breki, sum er stovnssett við Ll. nr. 67/2003 “um skúlatilboð til ung við brekið” og hevur til endamáls at menna tey ungu til eitt sjálvstøðugt lív eftir lokið skúlaskeið.

Landsstýrismaðurin tilnevnir ein bólk at ráðgeva sær um skipanina, sum á hvørjum ári skal lata honum frágreiðing um gongdina á skúlanum. Saman við foreldrum og øðrum myndugleikum skal bólkurin fyrireika bústaðar-, frítíðar- og arbeiðstilboð til tey ungu eftir lokið skúlaskeið.

Journalisering, skjalasavn og persónsmál

Stovnurin hevur onga journalskipan, og sambært okkara kanningum vórðu persónsupplýsingar, ið kunnu vera eymar, ikki goymdar forsvarliga.

Rásin hevur onga journalskipan.

Mentamálaráðið tekur undir við Landgrannskoðanini, at skjølini skulu verða goymd, soleiðis, at lætt er at finna tey aftur, at eymar upplýsingar verða viðgjørdar og goymdar á rættan hátt, og at tær verða fyribeindar forsvarliga.

Eymar upplýsingar ikki goymdar forsvarligar.

Skráseting av ognum

Rásin hevur ikki dagført ognaryvirlit. Mentamálaráðið hevur biðið stovnin um at gera eitt ognaryvirlit.

KT trygdarreglur o.a.

Rásin hevur ikki skrivligar KT-trygdarreglur. Landsgrannskoðanin mælti til, at Mentamálaráðið saman við leiðsluni tekur støðu til spurningin um at gera eina váðameting, sum ásett í rundskrivi frá Vinnumálaráðnum um KT trygd. Eisini mæltu vit til, at stovnurin ger mannagongdir fyri, hvør skal hava atgongd til upplýsingar um næmingar, og hvussu tær skulu handfarast.

Í august 2015 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at stovnurin verður limaður í Landsnet og harvið fær lut í trygdarskipanini hjá KT Landsins. Mentamálaráðið fer eisini saman við Rásini at loysa málið viðvíkjandi atgongd til persónsupplýsingar og vísir á líknandi mannagongdir, sum Sernám hevur.

Roknskaparviðurskifti o.a.

Roknskaparreglu-gerðin ikki brúkt.

Í 2007 góðkendi Mentamálaráðið roknskaparreglugerðina hjá stovninum, men starvsfólkini hava ikki nýtt hana. Gjaldstovan hevur síðani 2013 konterað rokningarnar. Gjaldstovan stemmar ikki av, men tryggjar, at kreditorar eru rættir, og at rokningar hoyra til Rásina.

Í august 2015 hevur Mentamálaráðið kunnað um, at ráðið hevur givið Rásini boð um at dagføra roknskaparreglugerðina við at gera reglur fyri avstemman av kreditorum o.a.

Sambært leiðsluni hevur hon ikki havt nóg góðar stundir at taka sær av fyrisitingarligu uppgávunum, og hevur leiðarin biðið Mentamálaráðið um størri játtan til at seta eitt hálvt starvsfólk afturat, soleiðis at hann frá skúlaárinum 2015/16 burturav kundi røkja fyrisitingarligu uppgávurnar.

Í august 2015 hevur Mentamálaráðið greitt frá, at tað hevur ikki verið gjørligt at veitt hægri játtan, og at sambært lógini hevur leiðarin fyrisitingarligu, námsfrøðiligu og fíggjarligu ábyrgdina mótvegis Mentamálaráðnum. Tað er eisini hansara ábyrgd at leggja arbeiðið soleiðis til rættis, at hann fær tíð at gera tær uppgávur, hann er settur at røkja.

Næmingagjøld

Vantandi reglur um næmingagjøld.

Higartil hava næmingarnir rindað 3.000 kr. um mánaðin, uttan at reglur eru gjørdar, sum lógin ásetir.

Landsgrannskoðanin vísti á, at viðurskiftini kunnu sammetast við sambýlir undir Almannamálaráðnum, sum hevur reglur, ið áseta, hvat sambýli kunnu rinda av játtanini, og hvat búfólkini sjálvi skulu gjalda.

Í august 2015 hevur Mentamálaráðið boðað frá, at ráðið fer at gera reglur um næmingagjøld og fer at kunna seg um reglurnar, ið Almannamálaráðið hevur.

Keyp av vørum og tænastum

Landsgrannskoðanin mælti til, at leiðslan ger skrivligar mannagongdir um keyp, ið kundu tryggja, at goldnu vørurnar hoyrdu til stovnin og vóru komnar til stovnin.

Í august 2015 hevur Mentamálaráðið givið stovninum boð um at taka reglur um keyp við í dagføringina av roknskaparreglugerðini.

Sambært leiðsluni rinda starvsfólk ikki fyri kost, tey fáa á stovninum, tí tað at eta saman við búfólkunum er partur av námsfrøðiliga arbeiðinum. Sama er við gjaldi fyri fitnessvenjingar.

Landsgrannskoðanin spurdi Mentamálaráðið um heimildina at rinda fyri kost og venjing hjá starvsfólkunum.

Í august 2015 svaraði Mentamálaráðið, at ráðið eins og leiðarin á Rásini heldur, at tað er ein liður í undirvísingini og tí námsfrøðiliga arbeiðinum, at starvsfólkini gera mat saman við næmingunum og eru saman við næmingunum til venjing á venjingarmiðstøð. Ráðið fer at kanna um fylgjarakort kann fáast til starvsfólk í sambandi við venjingarmiðstøðina.

Sambært skjølum hevur stovnurin goldið fyri keyp av diesel, bensini, kubbagjald, kioskvørur o.a.

Fylgja ikki almennum reglum um ferðauppgerðir.

Landsgrannskoðanin mælti til, at Rásin nýtir reglurnar um endurgjald fyri koyring, tá ið starvsfólk nýta egnan bil í tænastuørindum, og at stovnurin nýtir koyribók fyri at kunna sanna, at bilurin hjá stovninum bert verður nýttur til endamál hjá Rásini. Landsgrannskoðanin undrast eisini á, at stovnurin heldur seg hava tørv á tveimum gjaldkortum til sama latara av brennievni.

Í november 2015 hevur Mentamálaráðið kunnað um, at stovnurin hevur fingið boð um, at fylgja almennu reglunum um endurgjald fyri koyring og at nýta standardskjalið hjá Fíggjarmálaráðnum til endamálið.

Mannagongdir í sambandi við námsferð

Rásin hevur ikki skrivligar mannagongdir í sambandi við námsferðir. Stovnurin rindar lønir og flogferðir hjá starvsfólkum, og næmingarnir rinda restina. Ein partur av lesiætlanini er, at næmingarnir fara námsferðir. Tó at tað ikki er nøkur ófrávíkilig treyt hjá næmingum at luttaka, hava allir næmingarnir verið við á ferðunum.

Landsgrannskoðanin mælti til, at leiðslan ger skrivligar reglur fyri námsferðir, og at Rásin fylgir vegleiðingini hjá Fíggjarmálaráðnum um ferðauppgerðir.

Mentamálaráðið hevur boðað frá, at stovnurin fer at gera nýggjar mannagongdir í sambandi við ferðir.

Kassi og peningastovnskontur

Vantandi reglur um peningaumsiting.

Landsgrannskoðanin mælti til, at stovnurin ger skrivligar mannagongdir um umsiting av peningi hjá næmingunum. Mentamálaráðið hevur boðað frá, at ráðið hevur álagt stovninum at gera skrivligar reglur um umsiting av lummapeninginum.

Tvær peningastovnskontur eru í navninum hjá Rásini til m.a. at savna pening inn til námsferðir. Gjaldkort er knýtt at aðrari kontuni. Ongin roknskapur var gjørdur fyri peninganýtsluna.

Landsgrannskoðanin mælti til, at stovnurin stemmar peningastovnskonturnar av og syrgir fyri, at skjøl eru til allar bókingarnar, og at konturnar verða skrásettar í Búskaparskipan landsins.

Í august 2015 hevur Mentamálaráðið boðað frá, at ráðið hevur álagt Rásini at stemma konturnar av javnan og at gera roknskap fyri hvørt skúlaskeið, sum skal grannskoðast. Er avlop á kontunum, skal tað gjaldast næmingunum aftur. Ráðið fer eisini at skráseta konturnar í Búskaparskipan landsins, tí at talan er um stórar upphæddir, og tí at almenn starvsfólk umsita pening fyri næmingarnar.

Lønir

Vit kannaðu lønirnar hjá tveimum starvsfólkum við at samanhalda setanarskriv, prógv, tímatalvur o.a. við galdandi lønarsáttmálar. Lønirnar samsvaraðu reglunum.

Landsgrannskoðanin mælti til, at leiðslan ger reglur um flextíð, og at leiðarin váttar tímarnar. Eisini mæltu vit til, at reglurnar í vegleiðingini um serstøku frívikuna verða hildnar.

Sambært leiðsluni vilja fastlønt starvsfólk heldur arbeiða samdøgursvaktir sunnudagar enn leygardagar, tí tað gevur meira tíð at avspáka. Leiðslan hevur játtað tí og letur tímalønt arbeiða samdøgursvaktir leygardagar.

Spurd, um tað hevði verið bíligari fyri stovnin, at tímalønt arbeiddu sunnudagar og fastlønt arbeiddu leygardagar, svaraði Mentamálaráðið, at ráðið hevur álagt leiðaranum at reka stovnin soleiðis, at sum mest fæst burturúr játtanini, eisini tá ið tað snýr seg um skipan av samdøgursvaktum.

Reglurnar, um hvussu starvsfólk skulu lønast, tá ið tey ferðast við næmingum, eru ógreiðar. Mentamálaráðið kunnaði um, at ráðið fer at gera skrivligar reglur.

6.4 Fiskivinnuskúlin (LG 2014/207-0233)

Landsgrannskoðanin hevur í 2015 grannskoðað Fiskivinnuskúlan. Endamálið var at kanna innanhýsis mannagongdir, og um roknskapurin var rættur.

Frá skúlaárinum 2013/2014 er skúlin vorðin partur av nýggju gymnasialu breytaskipanini, sum er skipað við støði í Ll. nr. 62/2012 “um gymnasialar miðnámsútbúgvingar”, og skúlin bjóðar nú næmingum at ganga á tilfeingisbreytini (TIF).

KT-trygd

Fiskivinnuskúlin hevur ikki gjørt váðameting.

Fiskivinnuskúlin hevur egna KT-skipan við upplýsingum um næmingar, starvsfólk v.m. Servarin, sum er vardur av brandmúri og virusverju, stendur í avlæstum rúmi á skúlanum. Til at røkja KT-skipanina hevur skúlin avtalu við telduvørð, sum dagliga tekur trygdaravrit av øllum dátum. Øll próvtøl verða tøppað í KT-skipan, sum Mentamálaráðið umsitur.

Vísandi til rundskrivið frá Vinnumálaráðnum frá 2007 “um at seta í verk KT-trygd” mælti Landsgrannskoðanin til, at Fiskivinnuskúlin orðar trygdarpolitikk og ger eina váðameting, og at leiðslan tryggjar sær, at dáturnar kunnu endurskapast.

Í apríl 2015 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Mentamálaráðið hevur heitt á Fiskivinnuskúlan um at orða trygdarpolitikk og at tryggja, at dáturnar kunnu endurskapast.

Roknskaparviðurskifti

Fiskivinnuskúlin hevur dagførda roknskaparreglugerð. Skúlin hevur ikki gjørt ognaryvirlit. Landsgrannskoðanin mælti til, at leiðslan ger ognaryvirlit, sum samsvarar við vegleiðingina frá Gjaldstovuni.

Fiskivinnuskúlin hevur peningastovnskontu, sum er ætlað til inntøkur frá skeiðsvirksemi. Vit stemmaðu kontuna av og høvdu onki at finnast at.

Lønir

Við støði í lønarútgjaldinginum fyri november 2014 kannaði Landsgrannskoðanin, um lønirnar hjá tveimum tilvildarliga valdum starvsfólkum vóru rættar. Vit samanhildu setanarskrivini, prógvini, tímatalvur o.a. við galdandi lønarsáttmálar. Vit høvdu onki at finnast at.

6.5 Musikkskúlaskipanin (LG 2014/207-0235)

Enn er ikki samsvar ímillum lógina og fyrisitingarligu mannagongdirnar.

Síðani 2002 hevur Landsgrannskoðanin gjørt vart við, at samsvar er ikki ímillum ásetingar í lógini frá 1984 "um stuðul til musikkskúlar" og fyrisitingarligu mannagongdirnar, uttan at nakað ítøkiligt er hent.

Studningur til kommunur/endurrindan frá kommunum

Í februar 2003 vístu vit á, at ósamsvar var ímillum § 1 í lógini um, at landskassin letur studning, og § 5 um, at landsstýrismaðurin setir lærararnar í starv. Lógin verður heldur ikki umsitin, sum er talan um studning úr landskassanum. Landskassin rindar allar lønarútreiðslurnar til lærarar, og kommunurnar endurrinda landskassanum 50% av teimum í mun til talið av tillutaðu tímunum.

Vit hava áður vístá, at musikkskúlaskipanin varð væl umsitin, og at umsitingin neyvan varð bíligari ella betri, varð hon løgd til kommunurnar. Tí mæltu vit landsstýrismanninum til at broyta lógina soleiðis, at samsvar varð ímillum praksis og allar ásetingar í lógini.

Í februar 2003 vísti landsstýrismaðurin á, at hann hevði sett ein arbeiðsbólk, ið fyri 1. apríl 2003 skuldi koma við tilmæli um tillagingar/broytingar til lógina, soleiðis at samsvar varð millum sjálva lógina og fyrisitingina av henni.

Í januar 2004 kunnaði Mentamálaráðið um, at nevndin, sum skuldi endurskoða lógina um musikkskúlar, hevði gjørt eitt fyribils uppskot um "Løgtingslóg um musikkskúlaundirvísing".

Í desember 2004 boðaði landsstýrismaðurin frá, at nevndin væntandi fór at koma við einum tilmæli á vári 2005. Orsøkin til seinkanina var, at kommunurnar og musikklærarafelagið ynsktu at vera við í endurskoðanararbeiðinum. Hann ætlaði at taka støðu, tá ið hann hevði fingið tilmælið frá nevndini.

Í uppskoti til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 2004, ið varð samtykt 21. apríl 2006, átalaðu løgtingsgrannskoðararnir, at so nógv ár gingu, uttan at málið varð loyst.

Í september 2007 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Mentamálaráðið viðgjørdi uppskot um at broyta lógina, so samsvar varð millum praksis og allar ásetingar í lógini. Uppskotið skuldi sendast kommununum og musikklærarafelagnum til hoyringar.

Í juli 2008 boðaði nýggi landsstýrismaðurin frá, at hann fór at seta seg inn í lógaruppskotið, áðrenn hann tók støðu til, um tað skuldi setast í verk, ella nýggj lóg skuldi verða gjørd.

Í apríl 2009 tók landsstýrismaðurin stig til, í tøttum samstarvi við kommunurnar, at broyta lógina, so fult samsvar varð ímillum lógina og siðvenjuna, men tað bar ikki á mál.

Í 2013 ætlaði landsstýrismaðurin aftur, saman við kommununum, at laga lógina til soleiðis, at hon samsvaraði siðvenjuni, sum avvarðandi partarnir kenna og hava verið nøgdir við, og sum teir hava virkað undir øll árini.

Í september 2014 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Mentamálaráðið var ikki komið á mál við arbeiðinum.

Í november 2015 hevur landsstýrismaðurin upplýst, at onki ítøkiligt er hent í málinum síðani seinastu frágreiðing.

Átalur frá løgtingsgrannskoðarunum

Løgtingsgrannskoðararnir hava aftur og aftur, seinast í februar 2015, hvassliga átalað, at onki ítøkiligt hendir viðvíkjandi Musikkskúlaskipanini, hóast landsstýrismaðurin í áravís hevur vitað um manglandi samsvarið ímillum ásetingarnar í lógini og fyrisitingarligu mannagongdirnar.

Samanumtikið

Lógin um stuðul til musikkskúlar hevur nú verið í gildi síðani 1984. Landsgrannskoðanin heldur, at gongdin í málinum um Musikkskúlaskipanina bendir á, at Mentamálaráðið og skiftandi landsstýrismenn hava skákað sær undan at loysa trupulleikarnar við at seta nevndir at kanna, gera uppskot o.a., uttan at tað hevur ført til ítøkilig úrslit.

Samanumtikið ber til at siga, at fyrisitingarligu mannagongdirnar í 30 ár hava ikki verið í tráð við allar ásetingarnar í lógini, men hóast skiftandi landsstýrismenn hava vitað um manglandi samsvarið, er lógin óbroytt og fyrisitingin ikki sambært lógini.

6.6 Frítíðarundirvísing (LG 2014/207-0235)

Í ársfrágreiðingini 2013 umrøddu við grannskoðan av frítíðarundirvísing.

Dagføring av kunngerðum

Í september 2014 kunnaði landsstýrismaðurin um, at arbeiðið at dagføra kunngerðirnar steðgaði, tá ið frítíðarundirvísingin sambært lóggávuni varð løgd til kommunurnar at umsita, men at ráðið var í holt við dagføra tær.

Spurdur, greiddi landsstýrismaðurin í august 2015 frá, at kunngerðirnar vórðu ikki dagførdar í 2014 sum fráboðað, av tí at Mentamálaráðið heldur, at neyðugt er at dagføra lógina, Ll. nr. 70/1983 “um frítíðarundirvísing v.m.”

Roknskaparviðurskifti

Í 2013 rindaði Mentamálaráðið nakrar samsýningar beinleiðis, m.a. til lærarar á Sernámi, sum høvdu serliga útbúgving at undirvísa fólki, ið eru rakt av “afasi”. Undirvísingarleiðarin helt, at rættari hevði verið, at Sernám rindaði lønirnar, og at tær síðani vórðu endurgoldnar av Mentamálaráðnum.

Í august 2015 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at Mentamálaráðið ætlar at broyta mannagongdina í 2016 soleiðis, at játtanin til undirvísing av fólki, ið eru rakt av afasi, verður flutt til Sernám sambært ásetingum í § 1 í rundskrivi nr. 5 “um serundirvísing vaksnamanna við atliti at talu- og máltrupuleikum.”

Lønir til undirvísarar

Í 2014 kannaðu vit, um lønirnar vóru sambært galdandi lóg og rundskrivum. Vit kannaðu eisini, um lønirnar á kvøldskúlunum í Tórshavnar og Klaksvíkar kommunu vóru rættar.

Landsgrannskoðanin helt ikki, at tímalønirnar eru sambært yvirskipaðu reglunum um tímaløn, og mælti til, at Mentamálaráðið tekur málið upp við kvøldskúlarnar.

Í august 2015 hevur Mentamálráðið boðað frá, at ráðið hevur tikið málið upp við skúlarnar, sum ikki hava nýtt galdandi ásetingar.

6.7 Vinnuháskúlin (LG 2014/0207-0236)

Í seinastu frágreiðing umrøddu vit grannskoðan av Vinnuháskúlanum.

Sambært K. nr. 106/2005 “um maskinmeistaraútbúgving” og K. nr. 107/2005 “um skiparaútbúgving” skulu lærarar, sum undirvísa næmingum í hesum útbúgvingum, lúka ávísar treytir um undirvísingarførleikar. Í oktober 2013 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Vinnuháskúlin hevði sent Mentamálaráðnum fráboðan um, hvørjar møguleikar skúlin hevði at uppstiga viðkomandi lærarar, og at neyðugt varð við fígging til endamálið.

Í november 2015 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at skúlin hevur loyst málið, við at hesir lærarar røkja uppgávur sambært verandi førleikum, og at onkur uppstigar sínar førleikar.

6.8 Granskingarráð Føroya (LG 2014/0207-0236)

Í seinastu frágreiðing umrøddu vit roknskaparviðurskifti hjá Granskingarráði Føroya.

Roknskaparreglugerðin hjá stovninum frá 2012 fevnir um Granskingargrunnin og Granskingarráðið. Reglugerðin varð send Mentamálaráðnum, men varð ikki góðkend, av tí at ógreiða var millum Granskingargrunnin og Mentamálaráðið, hvørt avlop av óbrúktari játtan hjá grunninum skuldi fella aftur til landskassan.

Í oktober 2013 greiddi landsstýrismaðurin frá, at Mentamálaráðið var farið undir at greina løgfrøðiligu støðuna hjá Granskingargrunninum fyri at tryggja samsvarandi ásetingar og mannagongdir.

Í september 2014 segði landsstýrismaðurin, at Mentamálaráðið miðaði eftir at góðkenna roknskaparreglugerðina “í næstum”.

Í november 2015 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at Mentamálaráðið hevur viðgjørt handfaringina av stuðlinum hjá Granskingargrunninum saman við Gjaldstovuni og fer í næstum at taka teir prinsipiellu spurningarnar upp við Fíggjarmálaráðið. Miðað verður eftir, at Mentamálaráðið saman við Fíggjarmálaráðnum er komið til eina niðurstøðu innan árslok 2015.

6.9 Sjónám (LG 2014/0207-0236)

Landsgrannskoðanin hevur í februar 2015 grannskoðað Sjónám. Endamálið við grannskoðanini var m.a. at kanna innanhýsis mannagongdir.

Sjónám fevnir um samanløgdu stovnarnar Klaksvíkar sjómansskúla og Trygdarmiðstøðina, ið vórðu lagdir saman í 2012.

KT-trygd

Sjónám hevur gjørt váðameting og trygdarpolitikk.

Sjónám hevur ein servara í innilæstum rúmi á skúlanum. Fyri at fáa atgongd til teldu og brúkara krevst persónligt loyniorð. Sambært leiðsluni hava teldurnar og servarin nøktandi verju við brandmúr, virusforritum v.m. Ein persónur umsitur telduskipanina fyri Sjónám eftir rokning. Teldupostskipanin er partur av exchange-servara, sum stendur á Tekniska skúlanum. Ætlanin er at útvega ein eyka servara, sum skal standa á Tekniska skúlanum, og sum avritar servaran á Sjónámi. Trygdaravrit verður tikið eina ferð um vikuna av servaranum og verður goymt uttan fyri skúlan.

Deildarleiðarin hevur um hendi próvtølini, ið verða goymd í Office forritum á servaranum, tó verða próvtøl frá royndum við uttanhýsis døming goymd í skipanini hjá Mentamálaráðnum.

Sambært leiðsluni eru váðameting og trygdarpolitikkur gjørd, og dáturnar á trygdaravritinum endurskapaðar.

Roknskaparviðurskifti

Klaksvíkar sjómansskúli hevði roknskaparreglugerð frá juli 2011, sum ikki var góðkend av Mentamálaráðnum. Trygdarmiðstøðin hevði eina roknskaparreglugerð, sum ikki var dagført síðani 2001. Leiðslan hevur gjørt eina roknskaparreglugerð fyri Sjónám og sent hana til Mentamálaráðið at góðkenna.

Ognaryvirlit

Sjónám hevur dagført ognaryvirlit.

Landsgrannskoðanin mælti til at gera ognaryvirlit, sum ásett í § 20 í roknskapar-kunngerðini. Í apríl 2015 hevur leiðslan kunnað um, at ognaryvirlitið er gjørt.

Inntøkur

Inntøkurnar hjá Sjómansskúlanum stava frá sølu av bókum, radioskeiðum v.m. og verða bókaðar umvegis inngjøld á peningastovnskontu. Inntøkurnar hjá Trygdarmiðstøðini stava frá skeiðum og verða bókaðar umvegis debitorskipanina hjá Gjaldstovuni. Inntøkur hjá Trygdarmiðstøðini verða eisini goldnar á egna peningastovnskontu. Skrivstovufólkið heldur skil á, um goldið verður fyri bøkur og skeið. Prógv verða ikki latin, um viðkomandi ikki hevur goldið.

Deildarleiðarin upplýsti, at kostnaðurin fyri radioskeið verður ásettur í mun til útreiðslur hjá stovninum. Landsgrannskoðanin mælti til, at stovnurin tryggjar sær, at ásetingin er í tráð við reglurnar um inntøkufíggjað virksemi, og at tað verður greinað í einum broti í roknskaparreglugerðini.

Í apríl 2015 hevur leiðslan kunnað um, at orðing um prísáseting er tikin við í roknskaparreglugerðina.

Prísirnir á trygdarskeiðum eru ásettir í K. nr. 100/2012 “um gjald fyri skeið innan trygd á sjónum”, og er gjaldið fyri lógarkravt trygdarskeið ásett til í mesta lagi 2.500 kr. fyri næmingar í fólkaskúla/sjóvinnubreyt og 4.000 kr. fyri sjófólk.

Peningastovnskontur

Sjónám hevur tvær peningastovnskontur, sum eru skrásettar í Búskaparskipan landsins. Konturnar verða tømdar hvønn mánað á kontu hjá Gjaldstovuni og gjørdar upp regluliga. Vit hava stemmað konturnar av og høvdu onki at finnast at.

Lønir

Við støði í lønarútgjaldingum fyri november 2014 kannaði Landsgrannskoðanin, um lønirnar hjá tveimum starvsfólkum vóru rættar. Vit samanhildu setanarskrivini, prógv, tímatalvur o.a. við galdandi lønarsáttmálar. Vit høvdu onki at finnast at.

Vit kannaðu eisini tvær rokningar og mæltu til, at stovnurin fekk greiðu á, um rætt var farið fram viðvíkjandi skatti og MVG. Leiðslan hevur tikið tilmæli okkara til eftirtektar og fingið viðurskiftini í rættlag.

6.10 Fróðskaparsetur Føroya (LG 2014/207-0236)

Roknskaparreglugerð

Í frágreiðingum oktober 2013 og oktober 2014 vísti Landsgrannskoðanin á, at Fróðskaparsetur Føroya, ið er samanlagdur stovnur frá 2008, hevði ikki gjørt eina felags roknskaparreglugerð fyri stovnin.

Í november 2015 hevur Mentamálaráðið greitt frá, at ráðið hevur móttikið roknskaparreglugerðina frá Fróðskaparsetrinum og hevur umrøtt hana við Gjaldstovuni.

Inntøkur

Í oktober 2014 helt Landsgrannskoðanin tað vera átaluvert, at Fróðskaparsetur Føroya, hóast stovnurin eitt ár frammanundan hevði boðað frá, at mannagongdin fór at verða broytt, framvegis lat vera við at skráseta inntøkur av skeiðum í landsroknskapin so hvørt.

Í 2015 hevur Fróðskaparsetrið skrásett peningastovnskonturnar í landsroknskapinum og skrásetir inntøkurnar fyri skeið og annað í Búskaparskipan landsins.

Peningastovnskontur og inntøkur eru nú skrásettar í BSL.

Stuðulsfíggjað virksemi

Í oktober 2013 mælti Landsgrannskoðanin til, at inntøkufíggjað og stuðulsfíggjað virksemi hjá Fróðskaparsetrinum vórðu sett á hvør sína undirkontu undir rakstrarjáttan, sum K. nr. 84/2011 “um rakstrarjáttan” ásetir.

Í fíggjarlógini 2015 er undirkonta 45 til inntøkufíggjað virksemi skrásett undir høvuðskontuni hjá Fróðskaparsetrinum.

Verkætlanir

Landsgrannskoðanin hevur í 2014 grannskoðað verkætlanir hjá Fróðskaparsetri Føroya við m.a. at kanna, um roknskapirnir vóru í samsvari við fíggjarætlanirnar, ið vóru grundarlag undir m.a. stuðulsumsóknum, um verkætlanarroknskapirnir í landsroknskapinum eru rættir, og um skrivligar mannagongdir og innaneftirlit eru.

Okkara kanningar vístu, at roknskapir fyri verkætlanir vóru ikki nøktandi, m.a. vóru inntøkur í stóran mun ikki skrásettar í rakstrarroknskapinum, men bert í fíggjarstøðuni. Reglurnar um endurrindanir av ferðakostnaði, dagpeningi o.a. vóru ikki hildnar. Eisini vístu vit á, at bland var komið í fíggjarlig viðurskifti hjá Økisdeplinum og hjá Útoyggjafelagnum.

Verkætlanarroknskapir ófullfíggjaðir.

Í einari verkætlan hevði Fróðskaparsetrið í samráði við Mentamálaráðið útreiðsluført lønarútreiðslur, ið ikki vóru hildnar. Mentamálaráðið ásannar, at tað var ikki í samsvari við roknskaparkunngerðina.

Í oktober 2014 boðaði Mentamálaráðið frá, at ráðið hevur heitt á stýrið fyri Fróðskaparsetrið um at syrgja fyri, at mannagongdirnar viðvíkjandi verkætlanum verða allýstar við nýggjari roknskaparreglugerð. Eisini kunnaði Mentamálaráðið um, at Fróðskaparsetrið var farið undir at gera leiðreglur til umsiting av stuðulsverkætlanum. Í juli 2015 hevur Mentamálaráðið kunnað um, at arbeiðið er ikki gjørt.

Ongar mannagongdir um verkætlanir í roknskaparreglugerðini.

Í mai 2015 bað Landsgrannskoðanin Mentamálaráðið um endaligar uppgerðir fyri verkætlanirnar.

Verkætlanin “Normer” er ein PhD verkætlan, ið skuldi vara frá 2012 til 2015, har NordForsk[5] skuldi fíggja 2.760 t.NOK. Landsgrannskoðanin fer at venda aftur til roknskapin, tá ið verkætlanin er liðug.

[5] Nordic Center for Research on Marine Ecosystem and Resources under Climate Change.

Verkætlanin “Ældre og aldring på Færøerne” varð mett at kosta 1,6 mió.kr., harav skuldi Granskingarráðið fíggjað eina slaka mió.kr., og Setrið sjálvt 650 t.kr. Sambært Búskaparskipan landsins hevur Setursins partur higartil verið 720 t.kr.

Ongar inntøkur komnar til verkætlanina.

Verkætlanin “Craft International” skuldi fíggjast av NPP[6] , og sambært fíggjarætlanini varð kostnaðurin 1.559 t.kr. Eftir ætlanini skuldi hon enda við árslok 2013. Frá 2011 til 2014 eru 1.272 t.kr. brúktar til verkætlanina. Ongin inntøka er komin tey árini. Í 2015 eru slakar 400 t.kr. goldnar verkætlanini frá Hordaland Fylkeskommune.

Landsgrannskoðanin hevur ikki fingið nakra frágreiðing frá Mentamálaráðnum, hví so stórur munur er á ætlaðu fíggingini frá NPP og upphæddunum, sum Fróðskaparsetrið hevur móttikið. Sambært Mentamálaráðnum arbeiðir Fróðskaparsetrið við málinum, men er ikki komið á mál enn.

Verkætlanin “Retail in Rural Region” fekk eisini fígging frá NPP, og hóast hon endaði í 2012, var allur stuðulin ikki goldin Setrinum í 2014. Sambært játtanini skuldi stuðulin vera 624 t.kr. Setrið hevði fingið 486 t.kr.

Spurt, hví øll upphæddin ikki var goldin, hevur Mentamálaráðið í juli 2015 svarað, at upphæddin nú er goldin.

6.11 Søvn landsins (LG 2014/0207-0243)

Í frágreiðingum okkara seinastu árini umrøddu vit grannskoðan av Søvnum landsins.

Lóggáva

Í september 2014 kunnaði landsstýrismaðurin um, at uppskot til:

- løgtingslóg um vernd av mentanararvi og náttúruarvi í sambandi við økisráðlegging og ognarumsiting. Lógin skal koma ístaðin fyri lógina um at friða fornminni og bygningar,
- løgtingslóg um at broyta lógina um bókasavnsvirksemi,
- løgtingslóg um musealt virksemi, ið skal koma í staðin fyri lógirnar um fornminnissavn, um náttúrugripasavn, um bygdasøvn við mentanarsøgu-ligum týdningi, og til
- løgtingslóg um skjalasavnsvirksemi, ið er endurskoðan av skjalasavnslógini

fóru at verða løgd fyri løgtingið.

Landsstýrismaðurin hevur kunnað um, at uppskot til løgtingslóg um savnsvirksemi var fyri á landsstýrisfundi í apríl 2015, har undirtøka var fyri at leggja uppskotið fyri Løgtingið. Gjørt var tó av at bíða við at leggja málið fyri Tingið til eftir Ólavsøku.

Dagføring av lógum og kunngerðum hevur tikið longri tíð enn væntað.

Arbeiðið við savnslógini vísti seg at vera drúgvari enn væntað, og tí metir Mentamálaráðið, at eisini arbeiðið við uppskotum til løgtingslógum um vernd av mentanar- og náttúruarvi, um bókasavnsvirksemi og um skjalasavnsvirksemi fara at taka longri tíð, enn av fyrstan tíð ætlað.

Hølisviðurskifti

Í oktober 2013 ásannaði landsstýrismaðurin, at hølisviðurskiftini hjá Søvnum landsins vóru ikki nøktandi, og segði, at arbeitt varð við at finna loysnir, ið kundu bøta um tey. Í fyrsta umfari varð roynt at útvega starvshøli, soleiðis at málini í samanleggingartilgongdini kundu verða rokkin skjótast gjørligt. Í øðrum lagi varð arbeitt við at nøkta tørvin á goymslu- og framsýningarhølum.

[6] Northern Periphery Programme

Í august 2015 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at arbeitt hevur verið við ymiskum uppskotum um loysn á hølisviðurskiftunum hjá Søvnum landsins, men endalig støða er ikki tikin í málinum.

6.12 Kirkjugrunnurin (LG 2014/0207-0245)

Í seinastu frágreiðing okkara til løgtingsgrannskoðararnar umrøddu vit grannskoðan av Kirkjugrunninum.

Sambært Ll. nr. 60/2007 “um fólkakirkjuna í Føroyum” ásetir landsstýrismaðurin neyvari reglur um virksemið hjá stiftsstjórnini. Sambært Ll. nr. 61/2007 “um fíggjarviðurskifti fólkakirkjunnar” ásetir landsstýrismaðurin reglur fyri, hvussu kirkjuráðini gera fíggjarætlanir.

Í september 2014 kunnaði landsstýrismaðurin um, at ætlanin var at gera kunngerðirnar í 2015.

Í november 2015 hevur landstýrismaðurin boðað frá, at Mentamálaráðið fer undir kunngerðararbeiðið í heyst.

7 Heilsumál

7.1 Profylaksir (LG 2014/211-0201)

Landsgrannskoðanin hevur í fleiri ár gjørt vart við vantandi heilsukanningar av skúlabørnum. 12. mars 2014 kom í gildi Ll. nr. 9/2014 “um broyting í løgtingslóg um fyribyrgjandi heilsuskipanir fyri børn og ung”, sum hevði við sær, at fleiri skúlabørn kundu taka av tilboðnum um heilsukanningar.

Løgtingsgrannskoðararnir hildu tað vera gott, at stig vórðu tikin til at bøta um støðuna, men ivaðust í, um lógarbroytingin fór at tryggja, at fleiri skúlabørn fóru at taka av tilboðnum um heilsukanningar.

Umsitingin flutt til Heilsutrygd.

Í oktober 2014 kunnaði landsstýrismaðurin um, at umsitingin av profylaksunum var flutt til Heilsutrygd, men at enn sást ikki aftur í hagtølunum, at kommunulæknar høvdu fingið heimild til at gera kanningarnar.

Landsstýrismaðurin ætlaði at fáa í lag fund við Kommunulæknafelagið, Heilsutrygd og Gigni um at seta eina skipaða innkalling í verk, tí hann helt ikki, at talið á børnum og ungum, ið tóku av tilboðnum um kanningar hjá kommunulækna var nøktandi.

Í juli 2015 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Heilsutrygd hevði sent kommunulæknunum og kommunulæknaviðtalunum vegleiðandi tilfar frá Sundhedsstyrelsen umframt kunning um lógarbroytingina í 2014 fyri at fáa fleiri børn og ung at taka av tilboðnum.

Heilsumálráðið hevur heitt á Heilsutrygd um at finna eina skipan at kunna um tilboðið um heilsukanning við skúlabyrjan, og innan ásetta undirvísingarskyldan endar.

Børn og ung fáa nú tilboð um heilsukanningar.

Sambært landsstýrismanninum skuldi Heilsutrygd senda øllum børnum, sum byrjaðu í skúla eftir summarsteðgin 2015, bræv við tilboði um heilsukanningar. Eisini tey ungu fáa líknandi kunning frá Heilsutrygd. Kunningarskipanin er ein royndarskipan fyri 2015/2016.

8 Almannamál

8.1 Almannaverkið (LG 2014/212-0000)

Roknskaparreglugerðir

Roknskaparreglugerðirnar framvegis ikki dagførdar.

Nógv ár eftir at Landsgrannskoðanin fyrstu ferð reisti spurningin um roknskaparreglugerðirnar hjá Almannaverkinum, vóru tær framvegis ikki dagførdar.

Í oktober 2014 segði landsstýriskvinnan, at ein felags roknskaparreglugerð væntandi fór at verða send Almannamálaráðnum til góðkenningar seinni í árinum.

Í august 2015 hevur Almannaverkið boðað frá, at stovnurin bíðar eftir nýggjum roknskaparrundskrivi, sum Gjaldstovan hevur arbeitt við, og fara tey at laga uppskotið til roknskaparreglugerð eftir tí.

Kassaeftirlit

Í 2014 gjørdi Landsgrannskoðanin nøkur ófráboðað kassaeftirlit á stovnum hjá Almannaverkinum og høvdu nøkur tilmæli. Almannaverkið boðaði frá, at tey fóru at dagføra allar arbeiðsgongdir, sum viðvíktu kassum.

Í august 2015 hava verkstøðini sambært Almannamálaráðnum fingið boð um nýggju mannagongdirnar.

8.2 Serligt barnaískoyti til einsamallar uppihaldarar (LG 2014/212-0213)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað lógarbundnu játtanina til serligt barnaískoyti á høvuðskontu 12.21.3.06.

Vit kannaðu um roknskapurin er rættur og kunnaðu okkum um, hvussu skipanin verður umsitin. Vit kannaðu, hvussu Almannaverkið skjalfestir avgerðirnar og um móttakararnir lúka treytirnar í § 19 a-f í Ll. nr. 71 frá 20. mai 1996 “um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v.fl.”

Endamálið við lógini er at veita einsamøllum uppihaldarum eyka ískoyti til betri fíggjarligar umstøður at liva og at taka lut í samfelagnum.

Treytin fyri at fáa ískoyti er, at persónur sendir Almannaverkinum umsókn og eina ferð um árið váttar, at hann lýkur treytirnar. Ískoytið er ein føst upphædd, uttan mun til fíggjarlig kor, og er ikki skattskyldug.

Stakroyndir

Vit kannaðu 20 útgjaldsmál í 2014, sum fevndu um í miðal 40 børn. Vit kannaðu, um:

- serligt umsóknarblað er brúkt,
- umsóknarblaðið er rætt fylt út, og navna- ella dópsbrøv fyriliggja,
- Almannaverkið hevur eftirkannað givnu upplýsingarnar,
- Almannaverkið hevur sent árliga umbøn til umsøkjarar at vátta,
- árligar váttanir eru komnar rættstundis, og um
- møguligt barnaískoyti, sum umsøkjari ikki hevði rætt til, er kravt aftur.

Vit spurdu, hvussu Almannaverkið regluliga hevur eftirlit við at móttakararnir lúka treytirnar og krevur inn, tá ið onkur, hóast betri vitandi, hevur móttikið barnaískoyti av órøttum.

Heimildir og umsiting

Serligt barnaískoyti er heimilað í § 19 a-f í lógini. Fyrisitingarligu ásetingar í §§ 20-24 eru eisini galdandi fyri serliga barnaískoytið. Tað merkir, at móttakari av barnaískoyti hevur fráboðanarskyldu um viðurskiftir, sum viðvíkja rættinum til ískoytið, og at peningurin skal rindast aftur, um onkur, hóast betri vitandi, hevur móttikið ískoyti av órøttum.

Almannaverkið nýtir leiðbeining nr. BG-2A “Serligt barnaískoyti”, sum seinast er dagførd 1. oktober 2011, har stovnurin nágreinar umsitingina av lógini m.a. umsókn, váttanarskjal, viðgerð av umsókn og journal. Harafturat er leiðbeining nr. BP-2 “Barnagjald til einsamallar uppihaldarar (forskotsrindað)” eisini galdandi, tí almennar treytir og fyrisitingarligar ásetingar í lógini eru galdandi fyri báðar skipanirnar.

Sambært § 22 í lógini hevur landsstýrismaðurin heimild at áseta nærri reglur um fyrisitingina av lógini. Vit hava spurt, um landsstýriskvinnan hevur ásett reglur.

Roknskapartøl

Roknskapartølini seinastu 5 árini:

t.kr.

Heiti / ár	2010	2011	2012	2013	2014
Serligt barnaískoyti	7.128	7.283	7.582	7.738	7.557

Upphæddirnar fyri barnaískoyti eru ásettar í kunngerð. Í 2014 var ískoytið 1.647 kr. fyri hvønn ársfjórðing fyri hvørt barni, og frá 1. januar 2015 er upphæddin 2.500 kr. Almannaverkið skjalfestir málsviðgerðina í journalina í VFS-skipanini.

Í 2014 rindaði Almannaverkið 8.516 t.kr.[7] til 849 uppihaldarar, ið vóru ímillum 17 og 63 ára gamlir, teir flestu tó ímillum 35 og 44 ár.

Við samlaðu upphæddini til barnaískoyti 2014 og 2015 er í miðal goldið fyri 1.150 børn ella til 9% av øllum børnunum í Føroyum[8]. Ein treyt fyri at fáa ískoyti er, at uppihaldarin er einligur, og at barnið er yngri enn 18 ár.

Umsóknarblað

Samanumtikið brúka umsøkjarar umsóknarblaðið hjá Almannaverkinum, men tó vóru helvtin av teimum ikki nágreiniliga fylt út ella vantaðu dóps- ella navnabrøv. Ásannandi at møguleikarnir eru avmarkaðir at krevja pening aftur, ið er goldin út av órøttum, mælti Landsgrannskoðanin Almannaverkinum til at tryggja rættar upplýsingar og skjalprógv.

[7] Munurin stendst av, at barnaískoyti er goldið forút.

[8] Sambært Hagstovu Føroya vóru 12.338 fólk undir 18 ár 1. januar 2014 og 1. januar 2015 vóru tað 12.402. Í miðal gevur tað 12.370 fólk undir 18 ár. Kelda: www.hagstova.fo

Almannaverkið hevur boðað frá, at tey hava givið boð um at fylgja krøvunum, og at tey fara at eftirmeta oyðiblaðið.

Innaneftirlit og skjalprógv

Í fýra av 20 stakroyndum sást ikki um ella hvussu Almannaverkið hevði tryggjað sær, at givnu upplýsingar vóru rættar, og at umsøkjari hevði rætt til barnaískoyti. Sambært Almannaverkinum fara tey at bøta um skjalfestingina við at nýta kekklistar.

Stakroyndirnar vístu onki dømi um, at Almannaverkið hevði nýtt víðu heimildirnar at kanna veruligu samlívsstøðuna hjá umsøkjarum. Sambært viðmerkingunum til lógina og leiðbeiningini til oyðiblaðið áliggur tað umsøkjara at prógva, at hann reelt er einsamallur uppihaldari.

Tað áliggur umsøkjara at prógva, at hann reelt er einsamallur uppihaldari.

Almannaverkið samanber upplýsingarnar frá umsøkjarunum við skrásetingina hjá Landsfólkayvirlitinum, sum vísir formellu samlívsstøðuna hjá umsøkjarum, men eftir øllum at døma, ikki altíð ta veruligu samlívsstøðuna. Endamálið við víðkaðu heimildunum er at forða fyri at goldið verður út á órøttum grundarlagi og at svikað verður. Kanningin av upplýsingunum verður víðkað, um stovnurin fær eina fráboðan, aloftast dulnevnda.

Tulkingarspurningur

Ein treyt fyri at móttaka serligt barnaískoyti er, at barnið og móttakarin skulu vera búsitandi í Føroyum. Undantakið er, at barnið kann uppihalda sær uttanlands, í mesta lagi eitt ár, í útbúgvingarørindum. Foreldrið skal tá halda útreiðslurnar av uppihaldinum, og tær skulu vera hægri enn ein symbolsk upphædd.

Almannaverkið hevur játtað einum pápa barnaískoyti, hóast børnini ikki búðu hjá honum við tí grundgeving, at tey vóru á eftirskúla. Børnini vóru ikki uttanlands, men búðu og gingu í skúla í aðrari kommunu í Føroyum.

Landsgrannskoðanin ivast í, um tað at ganga í skúla og arbeiða í aðrari kommunu í Føroyum, er at meta sum “uttanlands í útbúgvingarørindum”, og heimilar víðari barnaískoyti. Almannaverkið hevur boðað frá, at tey fara at eftirmeta tulkingina. Vit hava biðið landsstýriskvinnuna um viðmerkingar.

Árligt eftirlit

Barnaískoyti verður goldið út fyrstu ferð ársfjórðingin eftir, at umsókn er játtað. Eitt ár seinni verður skriv sent móttakaranum, har hann skal vátta, at hann framhaldandi lýkur treytirnar. Sambært § 21, stk. 1, í lógini hevur móttakari av barnaískoyti skyldu at boða frá, um viðurskiftir, sum hava ávirkan á ískoytið, broytast.

Almannaverkið hevur ikki kravt, at umsøkjari skal upplýsa dato fyri, nær hann ikki longur lýkir treytirnar at móttaka serligt barnaískoyti. Landsgrannskoðanin heldur, at dagfestingin er týdningarmikil, tí barnaískoyti verður goldið forút hvønn ársfjórðing, og váttanarskjølini eru partur av árligum eftirliti. Almannaverkið tekur undir við Landsgrannskoðanini.

Ivi um innheintingarheimild

Sambært § 21, stk. 2, í lógini skal tann, sum hevur móttikið barnaískoyti hóast betri vitandi, gjalda upphæddina aftur. Tað framgongur ikki av lógini, hvørji amboð Almannaverkið kann ella skal brúka at krevja peningin aftur.

Sambært Almannaverkinum er verandi mannagongd, at hoyringsskriv og avgerðarskriv verða send borgarunum. Bókhaldið skrásetir síðani krøvini í roknskapin hjá Almannaverkinum og sendir tvær áminningar, um upphæddin ikki verður goldin.

Ivi um innheintingar-heimild.

Sambært Almannaverkinum hevur ivi verið um innheintingarheimildirnar, og tí ætlar Almannaverkið at heita á Almannamálaráðið at fáa til vega heimild, soleiðis at TAKS kann heinta inn ov nógv goldið barnaískoyti.

8.3 Einkjubarnastyrkur (LG 2014/212-0213)

Í 2015 hevur Landsgrannskoðanin grannskoðað umsitingina av játtanini til einkjubarnastyrk.

Ásetingarnar um einkjubarnastyrk eru í §§ 15-19 í Ll. nr. 71/1996 "um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v.fl." og fevna um gjøld til børn, hvørs faðirskapur ikki er staðfestur og til børn, har annað ella bæði foreldrini ikki eru á lívi. Almannaverkið kann eisini sambært § 19 játta serstøk gjøld í sambandi við dóp, ferming o.l. Sambært § 16, stk. 1, eru almennu treytirnar í § 3 við neyðugum tillagingum galdandi.

Móttakarin hevur fráboðanarskyldu og skyldu at rinda aftur.

Avgerðir hjá Almannaverkinum kunnu kærast til kærunevndina í almanna- og heilsumálum. Í § 21 er ásett, at móttakarin hevur fráboðanarskyldu til Almannaverkið, og at rinda gjøld aftur, ið verða móttikin av órøttum.

Sambært § 22 hevur landsstýrismaðurin heimild at áseta nærri reglur um fyrisitingina av lógini.

Øll útgjøld verða skrásett á somu kontu, tí sæst ikki um útgoldna upphæddin er einkjubarnastyrkur eftir § 15 ella serstakt gjald eftir § 19. Í 2014 er onki barnagjald goldið til nakran faðir- og móðurleysan persón.

Roknskapartøl 2010 til 2014:

t.kr.

Heiti / ár	2010	2011	2012	2013	2014
Einkjubarnastyrkir	1.896	2.094	1.816	2.006	1.949

Sambært Almannaverkinum hevur stovnurin í 2014 rindað 1.949 t.kr. til 168 børn. Býtið, ímillum § 15, stk. 1, móður- ella faðirleys, og § 15, stk. 2, har faðirskapur ikki er staðfestur, er ávikavist 136 og 32.

Almannaverkið hevur ikki gjørt vegleiðing til umsiting av einkjubarnastyrkjum, við teirri grundgeving, at talan er um objektiva málsviðgerð av lutfalsliga fáum málum, og møgulig ivamál verða viðgjørd á Fakdeildini.

Við stakroyndum kannaðu vit 14 mál, um móttakarin hevði rætt til barnagjald, um umbøn og nøktandi skjalprógv vóru í málinum, at gjaldið steðgaði rættstundis, og um møguligt barnagjald, móttikið av órøttum, er kravt aftur.

Vantandi vegleiðing

Vegleiðing um málsviðgerð vantar.

Landsgrannskoðanin mælti Almannaverkinum til at orða eina greiða vegleiðing um, hvør hevur rætt til einkjubarnastyrk, nær rætturin steðgar, og um skjalfesting av málsviðgerð. Eisini hevur tað týdning, at Almannaverkið greitt kunnar móttakarar um sína fráboðanarskyldu, havandi í huga, at tað kann ávirka rættin at móttaka barnagjald, og at møguleikarnir fyri afturrindan eru avmarkaðir.

Umbøn og skjalprógv

Samanumtikið heldur Landsgrannskoðanin, at málsviðgerðin er ikki nøktandi skjalprógvað, hóast umsóknir og viðkomandi skjøl vóru í málunum. Har Almannaverkið hevur nýtt uppritið í journalini, er lætt at fylgja málsgongdini, og um goldið er sambært reglunum. Uppritið verður tó sjáldan nýtt.

Í oktober 2015 hevur Almannaverkið kunnað um, at tað er ikki neyðugt at nýta upprit, tá ið avgreiðslan av málunum byggir á objektivar staðfestingar, men ásannar tó, at skjalprógv áttu at verið í málunum um, at tey eru kannað. Í nýggju Heildarskipanini verða eftirkanningar innbygdar. Vit hava spurt landsstýriskvinnuna, nær einkjubarnastyrkirnir fara at verða goldnir gjøgnum Heildarskipanina.

Rætt til barnagjald

Avgerandi treytir fyri at fáa barnagjald eru, at barnið ikki er fylt 18 ár, at barnið ella foreldramyndugleikin hevur danskan heimarætt e.l., at barnið er búsitandi í Føroyum ella uttanlands í upp til eitt ár í útbúgvingarørindum, og at barnið ikki er gift, ikki er sett heiman ella á annan hátt uppihildið við almennum stuðli. Móttakarin av barnagjaldinum, skal hava fastan bústað í Føroyum.

Sambært leiðbeiningini[9] byrjar almenna forsorgin, tá ið eitt barn verður uppihildið av tí almenna á stovni, í pleygu e.l.

Í oktober 2015 hevur Almannaverkið greitt frá, at persónur, ið hevur rætt til barnagjald, fær veitingina, sjálvt um barnið er partvís á stovni, í pleygu ella til umlætting v.m., tí viðkomandi hevur útreiðslur av at uppihalda barninum í vikuskiftum v.m.

Rætturin at móttaka einkjubarnastyrk er somuleiðis treytaður av, at móttakarin hevur rætt at krevja eitt gjald sambært lóggávu um rættarstøðu barnanna, L. nr. 200/1960 “om børns retstilling”.

Sambært § 18, stk. 2, í lógini “om børns retstilling”, hevur tann, sum “*...afholder udgifterne ved barnets forsørgelse, såfremt den pågældende har eller ved forældremyndighedens ophør havde forældremyndigheden over barnet eller lovligt har barnet i pleje.”* rætt at krevja barnagjald.

Mannagongdirnar hjá Almannaverkinum eru: Um foreldrini vóru gift, áðrenn andlát, hevur tann eftirsitandi foreldramyndugleikan og fær tí einkjubarnastyrk mánaðin eftir andlátið. Vóru foreldrini ikki gift, men livdu í parlagi, ella tá ið foreldrini umframt felags børn, eisini áttu onnur børn, er ikki eins greitt, hvør støðan er.

Vit sóu tvey dømir, ið ikki vóru viðgjørd eins, hóast foreldrini í hvørgum føri vóru gift. Í øðrum førinum fekk pápin barnagjald mánaðin eftir, at hann hevði fingið foreldramyndugleikan. Í hinum førinum fekk pápi, sum hevði viðmerkt í umsóknini, at hann enn ikki hevði foreldramyndugleikan, barnagjald mánaðin eftir andlátið.

Almannaverkið ásannar, at munur er á viðgerðunum, men at fyrr nevnda avgerðin er røtt, tí sambært § 18, stk. 2, í lógini “om børns rettstilling” er treytin at fáa barnagjald, at foreldramyndugleikin er staðfestur.

Barnagjaldið steðgar rættstundis

Í játtanarskrivinum kunnar Almannaverkið umsøkjararnar um, at teir hava skyldu at boða Almannaverkinum frá broytingum í egnum ella barnsins viðurskiftum, sum kunnu hava við sær, at stuðulin minkar ella fellur burtur. Sambært § 18, stk. 1, í lógini skal barnagjaldið steðga mánaðin eftir, at rætturin at móttaka gjaldið heldur uppat.

Spurd, hvørjar fyriskipanir stovnurin hevur, ið tryggja, at útgjaldið steðgar rættstundis, svaraði Almannaverkið, at veitingin steðgar, tá ið barn fyllir 18 ár. Flytir eitt barn uttanlands, steðgar veitingin eitt ár eftir flytingina, tí P-talið verður gjørt óvirkið.

[9] Leiðbeining nr. BP-2 “Barnagjald til einsamallar uppihaldarar (forskotsrindað)” útgreinar almennar treytir, ið eisini eru galdandi fyri einkjubarnastyrk.

Almannaverkið fær fráboðan frá Fútaskrivstovuni í faðirskapsmálum, og Barnaverndartænarstan hevur skyldu at boða frá, tá ið barn verður sett heiman. Annað verður ikki gjørt fyri at kanna, um broytingar eru í viðurskiftunum hjá móttakarum.

Endurgjald í sambandi við mistan uppihaldara og aðrar veitingar

Um barn hevur rætt til endurgjald fyri mistan uppihaldara, skal endurgjaldið verða drigið frá í einkjubarnastyrkinum. Sambært viðmerkingunum til lógina, skulu tó ikki allar endurgjaldsupphæddir mótroknast.

Almannaverkið hevur greitt frá, at endurgjald skal skiljast sum ein framhaldandi veiting, ið verður goldin barninum, til tað fyllir 18 ár. Sum dømi verða nevnd endurgjøld eftir arbeiðsskaðatryggingarlógini ella endurgjaldsábyrgdarlógini.

Almannaverkið hevur ikki mótroknað í nøkrum barnagjaldi í 2014. Í trimum stakroyndum vóru umsóknir, har umsøkjarin hevur kunnað um, at barnið hevur rætt til endurgjald. Í journalini sást ikki, um Almannaverkið hevði kannað málini nærri ella spurt, hvat rætturin til endurgjald snúi seg um.

Í oktober 2015 hevur Almannaverkið viðurkent, at málsviðgerðin hevur ikki verið nóg neyv í teimum trimum førunum, og at mannagondin í framtíðini verður broytt.

Móttikið av órøttum

Sambært § 21, stk. 2, í lógini skal barnagjald, sum umsøkjari hevur móttikið av órøttum, gjaldast aftur. Tað framgongur ikki av lógini, hvørji amboð Almannaverkið kann ella skal brúka at krevja gjaldið aftur.

Landsgrannskoðanin heldur, at við hesum í huga, átti Almannaverkið at styrkt um eftirlitið, sum skal forða fyri, at barnagjald verður móttikið av órøttum. Tá ið faðirskapur er staðfestur, hevur ein mamma ikki longur rætt til einkjubarnastyrk.

Dømi var um, at ein mamma fekk barnagjald í nakrar mánaðir eftir at faðirskapurin varð staðfestur. Í 2012 avskrivaði Almannaverkið skuld á góðar 90 t.kr. vegna tess at eitt mál var fyrnt. Móttakarin hevði móttikið barnagjøld av órøttum frá 1998 til 2003. Almannaverkið hevði kravt móttakaran eftir peninginum og hevur í áminning frá november 2003 boðað frá, at um peningurin ikki varð afturgoldin, varð kravið sent til sakførara til innkrevjingar. Hóttanin varð ikki framd í verki.

Landsgrannskoðanin hevur spurt, hvussu Almannaverkið tryggjar, at barnagjald ikki verður goldið út av órøttum, og hvørji amboð stovnurin hevur at krevja peningin aftur.

Almannaverkið svaraði, at stovnurin einans við at fáa neyðug skjalprógv til vega, kann tryggja, at peningur ikki verður veittur av órøttum, og at mannagongdir hesum viðvíkjandi verða tillagaðar. Almannaverkið kann gera gjaldsavtalur, betra um uppfylging av avtalunum og senda krøv til innheintingar.

Heimild til upplýsingar

Á umsóknarbløðunum geva umsøkjararnir Almannaverkinum loyvi at fáa upplýsingar um síni viðurskiftir frá øðrum myndugleikum. Í seks av okkara stakroyndum hevði Almannaverkið fingið upplýsingar og fráboðanir frá Føroya Landfúta og Ríkisumboðnum. Ein stakroynd vísti tó, at Almannaverkið ikki fekk sjálva gjaldsavgerðina beinleiðis frá Ríkisumboðnum.

Almannaverkið fær gjaldsavgerðir beinleiðis frá Ríkisumboðnum, men sambært stovninum kann tað vera trupult at fáa gjaldsavgerðir beinleiðis, ið eru tiknar av øðrum donskum myndugleikum.

Roknskapur og journal

Í einum máli var ikki talan um einkjubarnastyrk, men forskotsrindaðan barnapening. Gjøldini skuldu góðskrivast einkjubarnastyrk og skuldskrivast forskotsveitta barnapeninginum. Sambært Almannaverkinum verður hetta umbókað í 2015.

Aðrar stakroyndir vístu, at tá ið faðirskapurin er staðfestur, sendir Almannaverkið áheitan til TAKS um at krevja barnagjald aftur frá pápanum.

Landsgrannskoðanin kann ikki staðfesta, um roknskapurin fyri einkjubarnastyrkir er rættur, tí útgoldin peningur verður ikki fluttur úr roknskapinum fyri einkjubarnastyrkir yvir í roknskapin fyri forskotsveitta barnapeningin. Inngjaldið frá pápanum verður heldur ikki skrásett í roknskapinum fyri einkjubarnastyrkir.

Almannaverkið er samt við Landsgrannskoðanini og ásannar, at umbókingar áttu at verði gjørdar soleiðis, at kontan fyri einkjubarnastyrk verður góðskrivað, og kontan "barnapeningur veittur í forskoti" verður skuldskrivað. Almannaverkið tekur viðmerkingarnar frá Landsgrannskoðanini til eftirtektar og fer at tillaga mannagongdirnar.

Vit kannaðu eisini í VFS-skipanini hjá Almannaverkinum, um týðandi upplýsingar kundu ligið í aðrari journal hjá barninum. Í einum máli komu vit fram á, at upplýsingar, ið hvørki viðvíktu barninum, mammuni ella øðrum viðkomandi persónum, lógu í journalini hjá barninum.

Landsgrannskoðanin heldur, at tað er av størsta týdningi, at bert rættar upplýsingar verða goymdar á røttum staði, til tess at einans viðkomandi persónar hava atgongd til tær. Almannaverkið sigur, at talan er um skrásetingarfeil, og eigur tað sjálvsagt ikki at koma fyri.

8.4 Dagpeningur vegna sjúku v.m. (LG 2014/212-0214)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað dagpeningaskipanina á Almannaverkinum við støði í Ll. nr. 74 frá 8. mai 2001 "um dagpening vegna sjúku v.m."

Vit kannaðu um Almannaverkið hevði skrivligar mannagongdir til umsitingina av dagpeningi, um umsøkjararnir høvdu rætt til dagpening, um inntøkumissurin var veruligur, um veitingarnar vóru rættar, og hvussu stovnurin hevði grundgivið fyri avgerðum og skjalprógvað tær.

Endamálið við dagpeningalógini

Sambært § 1 í lógini er endamálið at veita fíggjarligan stuðul í sambandi við mista inntøku og/ella sjálvbodna trygging vegna sjúku, skaðatilburð og fráveru áðrenn føðing vegna heilsuvanda fyri móður ella barn.

Dagpeningur verður ikki veittur í tann mun viðkomandi, sambært lóg, trygging ella sáttmála, frá arbeiðsgevara ella øðrum hevur rætt til løn undir sjúku v.m. ella aðrar veitingar, sum eru endurgjald fyri mista inntøku vegna sjúku v.m. sí § 2, stk. 3.

Umsókn

Umsøkjari, ið søkir um dagpening, skal lata Almannaverkinum umsókn á oyðublaði. Hann skal greiða frá nær fráveran byrjaði, um orsøkina, um hann er pensjónistur, sjófólk o.a. Harafturat skal umsøkjari vátta, at hann ikki hevur rætt til fulla ella partvísa løn undir sjúku, hevur fastan bústað í Føroyum og er undir fullari skattskyldu her.

Arbeiðsgevarin skal vátta inntøkuna seinastu fimm vikurnar undan sjúkrafráveruni og harafturat boðað frá, um umsøkjarin skuldi hildið fram í arbeiðinum, um hann ikki gjørdist sjúkur, og um hann fær partvísa løn undir sjúku.

Uppkrevjing av arbeiðsgevarans parti

Almannaverkið skrásetir krøv, ið eru áløgd arbeiðsgevarum fyri tveir teir fyrstu sjúkradagarnar, í sína KT-heildarskipan. Almannaverkið brúkar tó ikki skrásetingina, tí stovnurin sendir krøvini til TAKS at krevja inn.

Sambært § 20 í lógini skal TAKS krevja peningin inn og hevur heimild at panta eftir reglunum í skattalógini um innkrevjing av skatti. Hendan mannagongdin ger, at Almannaverkið ikki hevur yvirlit yvir útistandandi pening. TAKS skrásetir eftirstøðuna í landsroknskapin saman við øðrum krøvum, sum TAKS eigur og umsitur. Almannaverkið stemmar ikki av mótvegis skrásetingunum hjá TAKS.

Almannaverkið helt, at tað er uppgávan hjá TAKS at stemma krøvini av mótvegis Almannaverkinum, og at tað er ikki neyðugt at stemma av við Búskaparskipan landsins, tí ein fíla verður bókað beinleiðis sum inntøka í Búskaparskipanini.

Almannaverkið fer at gera mannagongdir at avstemma inntøkur og krøv.

Sambært Almannaverkinum fara tey at gera mannagongdir fyri, hvussu inntøkur, sum eru skrásettar í Búskaparskipanini verða stemmaðar av ímóti teimum krøvum, sum eru send TAKS. Almannaverkið fer eisini at gera mannagongdir fyri avskrivað krøv fyri at tryggja, at samsvar er millum skrásett krøv hjá TAKS og skrásettar avskrivingar hjá Almannaverkinum.

Roknskapartøl

Roknskapartøl 2010 til 2014:

t.kr.

Heiti/ár	2010	2011	2012	2013	2014
Løntakarar	57.811	50.053	52.987	49.419	48.089
Sjálvstøðug og húsarhaldsfólk	1.187	934	1.091	1.109	942
Gjald fyri læknaváttanir	593	332	649	689	923
Arbeiðsgevarans partur, dagpeningur	-3.577	-2.571	-3.168	-3.384	-3.141
Tilsamans	**56.014**	**48.748**	**51.559**	**47.833**	**46.813**

Nógv tey flestu útgjøldini eru til løntakarar, og arbeiðsgevarans partur fylgir nøkulunda gongdini í útgjøldum. Frá 2010 til 2014 øktust útreiðslurnar til læknaváttanir 55%, meðan útgjøldini til dagpening lækkaðu 17%. Sambært Almannaverkinum eru prísirnir á læknaváttanum hækkaðir, og broytingarnar í útgjøldum stava frá lógarbroytingum.

Ll. nr. 151/2012, sum kom í gildi 1. januar 2013, hevði m.a. ávirkan á dagpeningatíðarskeiðið, men ikki á, um ein læknaváttan skal verða umbiðin. Lógarbroytingarnar vóru:

- at rætturin til dagpening fellur burtur, tá ið umsøkjari fær tillutað hægstu fyritíðarpensjón,
- at dagpeningatíðarskeiðið í einum 12 mánaðar skeiði verður lækkað úr 40 vikum í 20 vikur fyri fyritíðarpensjónistar, sum fáa lægstu ella miðal fyritíðarpensjón, og
- at umsøkjari skal hava verið í løntum arbeiði í minsta lagi 120 tímar innan fyri tær seinastu 13 vikurnar og ikki sum áður í minst 20 tímar innan fyri 5 tær seinastu vikurnar.

Broytingarnar fingu ikki fullan virknað í 2013 orsakað av skiftisreglum um rættin til dagpening hjá fyritíðarpensjónistum.

Ongar skrivligar mannagongdir

Almannaverkið hevði ongar skrivligar mannagongdir fyri umsiting av sjúkradagpeningi. Landsgrannskoðanin mælti til, at stovnurin ger skrivligar mannagongdir, sum tryggja rætta og einsháttaða útrokning. Almannaverkið hevur boðað frá, at tey taka undir við tilmælinum.

Ongar skrivligar mannagongdir fyri umsiting av sjúkradagpeningi.

Sambært Almannamálaráðnum løgdu tey nógva orku í at gera standardskriv og mannagongdir í 2011, tá ið tey løgdu dagpeningaøkið í KT-heildarskipanina. Stovnurin raðfestir fakligar leiðbeiningar, og væntar at ein endalig leiðbeining verður liðug í fyrru helvt av 2016. Útgjaldseindin er í holt við at orða mannagongdir.

Stovnurin ætlar at gera fakligar leiðbeiningar.

Inntøkumissur verður ikki kannaður

Endamálið við lógini er at veita fólki fíggjarligan stuðul fyri mista inntøku. Sum grundarlag fyri einstøku játtanini brúkar Almannaverkið inntøkur, sum eru skrásettar í skattaskipanini og upplýsingarnar, sum arbeiðsgevarar lata. Um sjúkutíðarskeiðið ikki verður longt, endar málið.

Almannaverkið hevur ongar mannagongdir, sum tryggja, at inntøkumissurin er veruligur, og sum eisini kunnu forða fyri møguligum feilum ella sviki. Sambært Almannamálaráðnum er ongin sjálvvirkandi mannagongd í KT-skipanini at hava eftirlit við inntøkumissi. Tað krevur nógva starvsfólkaorku, at kanna øll mál, ið eru lokin. Avgerandi er, at persónur ikki fær sjúkradagpening fyri tíðarskeið, viðkomandi hevur vunnið sær rætt til løn.

Almannamálaráðið heldur vandan fyri sviki ikki vera stóran. Váttan frá arbeiðstakara, arbeiðsgevara saman við læknaváttan og inntøkuni, sum er skrásett í skattaskipanini skuldi tryggjað, at inntøkumissurin er veruligur.

Tá ið sjúkutíðarskeið verða longd, kannar Almannaverkið inntøkuviðurskiftini frammanundan longdu sjúkraskrivingini. Vit staðfestu, at manuella eftirlitið var ikki nøktandi skjalfest. Almannaverkið kannar í skattaskipanini, um umsøkjari hevur havt lønarinntøku í tíðarskeiðnum frammanundan sjúkuskrivingini. Landsgrannskoðanin heldur tað ikki vera nøktandi, at inntøkumissurin ikki verður kannaður, tá ið endamálið er at veita fíggjarligan stuðul í sambandi við mista inntøku o.l.

Ikki nøktandi, at inntøkumissurin ikki verður kannaður.

Long viðgerðartíð

Í fimm málum, sum vit kannaðu, gingu millum tríggjar og sekstan vikur frá tí, at seinasta skjalið við upplýsingum var skrásett í journalini, til avgerð varð tikin.

Sambært Almannaverkinum eru orsøkinar til drúgvu viðgerðartíðina m.a. summarfrítíð. Seinastu árini hevur dagpeningaøkið verið merkt av starvsfólkaútskifting og flyting millum deildir. Okkurt tíðarskeið hevur starvsfólkaorkan á økinum ikki verið nøktandi. Hesi viðurskiftini hava gjørt, at avgreiðslutíðin hevur verið um tríggjar til fýra vikur. Nú stovnurin hevur avgreitt málini, ið lógu niðurfyri, er avgreiðslutíðin vanliga eina til tvær vikur.

Almannaverkið viðurkennir, at málsviðgerðartíð á tríggjar til fýra vikur er í longra lagi, men heldur, at grundað á omanfyri nevndu viðurskifti hevur tað ikki verið gjørligt at stytt um tíðina. At mál, ið eru klár at avgreiða, liggja seks ella sekstan vikur, heldur Almannaverkið tó ikki vera nøktandi.

Landsgrannskoðanin heldur, at tá ið talan er um inntøkumiss vegna óarbeiðsføri, eigur viðgerðartíðin at vera so stutt sum til ber, eisini um summarfrí er.

Viðgerðartíðin eigur at vera so stutt, sum til ber.

Tilmæli um at skjalfesta avgerðir, grundgevingar og kæruvegleiðing

Í onkrum føri samsvara upplýsingar í játtanarskrivum ikki við upplýsingar frá umsøkjara og arbeiðsgevara. Landsgrannskoðanin kann tí ikki sanna, um umsøkjararnir

hava fingið rætta upphædd. Vit mæltu til, at Almannaverkið skjalfestir avgerðir, soleiðis at tað ber til at eftirkanna tær. Almannaverkið tók undir við tilmælinum.

Almannaverkið hevur sýtt nøkrum umsøkjarum dagpening fyri seinni at játta, eftir at stovnurin hevur fingið nýggjar upplýsingar. Kæruvegleiðing var givin í øllum sýtanarskrivunum, men í einum máli var grundgevingin ikki nøktandi. Landsgrannskoðanin helt, at tað vantaði greið grundgeving, ið vísti, hví viðkomandi ikki hevði rætt til sjúkradagpening. Almannaverkið tók undir við niðurstøðuni hjá Landsgrannskoðanini.

Ásetingar og avgerðir um dagpening til stjórar ella løntakarar

Stjórar ikki rætt til dagpening.

Almannaverkið kunnar á heimasíðuni um, at stjórar hava ikki rætt til dagpening undir sjúku. Sambært Almannaverkinum ber tó til hjá stjórum í ávísum førum at fáa dagpening undir sjúku, t.d. um talan er um útróðrarmann, ið er stjóri í felag, sum rekur útróður.

Lógin um dagpening umrøður ikki stjórar, og hvørki í oyðubløðunum ella í tilhoyrandi vegleiðingum verður nevnt, at stjórar ikki hava rætt til dagpening, hóast teir eru tímaløntir. Avgerðin um, at stjórar hava ikki rætt til dagpening undir sjúku, er tikin av kærunevndini í almanna- og heilsumálum, mál nr. 13/00105, 11/00032, 09-01-153-73. Grundgevingin er, at kærarin ikki er fevndur av persónsskaranum í § 3 í dagpeningalógini.

Í trimum málum, vit kannaðu, vóru umsøkjararnir stjórar:

1. Í fyrsta málinum sýtti Almannaverkið viðkomandi dagpening, við tí grundgeving, at viðkomandi var stjóri. Hann hevur seinni fingið sjúkradagpening sum løntakari.
2. Í næsta málinum var Almannaverkið vorðið varugt við feilin (at viðkomandi var stjóri), men gjørdi av ikki at krevja peningin aftur, tí tey mettu, at hann hevði verið í góðari trúgv.
3. Í triðja málinum hevði umsøkjari fingið dagpening, hóast hann var sami persónur, sum váttaði inntøkuna, og sum var skrásettur at verða stjóri í partafelagnum, ið var arbeiðsgevari.

Landsgrannskoðanin mælir til at styrkja eftirlitið.

Landsgrannskoðanin mælir til at styrkja eftirlitið, og heldur tað vera óheppið, at vegleiðingin á oyðublaðnum kann misskiljast. Mælt verður til at broyta vegleiðingina til oyðublaðið, soleiðis at greitt er, hvør hevur rætt til sjúkradagpening. Almannaverkið fer at endurskoða oyðublaðið og at broyta vegleiðingina.

Ógreitt inntøkugrundarlag

Ikki greitt, hvussu inn-tøkugrundarlagið skal roknast.

Landsgrannskoðanin heldur tað vera óheppið, at tað ikki er heilt greitt, hvussu inntøkugrundarlagið sambært § 8 í lógini skal verða roknað. Stakroyndirnar vísa, at í onkrum føri hevur Almannaverkið stytt tíðarskeiðið fyri arbeiðsinntøkuni heldur enn at brúka seinastu 5 arbeiðsvikurnar, sum § 8, stk. 1, 2. pkt. í lógini ásetir.

Sambært Almannaverkinum verður dagpeningaveitingin vanliga ásett við grundarlagi í miðalinntøkuni seinastu fimm vikurnar undan sjúkrafráveruni. Inntøkan hjá vanligum løntakarum verður býtt við 25 fyri at finna dagsatsin. Hjá sjómonnum og øðrum, sum arbeiða í vikuskiftum og halgidagar verður inntøkan býtt við 35 grundað á avgerð hjá kærunevndini. Hevur umsøkjari havt lógligt forfall[10] í tær fimm vikurnar undan sjúkrafráveruni, verða seinastu fimm arbeiðsvikurnar nýttar sum grundarlag ístaðin.

Landsgrannskoðanin vísti á eitt mál, har Almannaverkið hevði stytt tíðarskeiðið til fýra vikur heldur enn at brúka seinastu fimm arbeiðsvikurnar. Sambært Almannaverkinum er talan um ein feil.

[10] Sambært viðmerkingunum til lógina er lógligt forfall vanlig frítíð, sjúkt barn, álvarsliga sjúkur familjulimur, verkfall ella líknandi.

Almannaverkið tók undir við Landsgrannskoðanini, at skrivligar mannagongdir eiga at verða gjørdar, og fer at raðfesta tað.

Sjómenn

Vit kannaðu tvey mál, har umsøkjararnir vórðu sjómenn. Í báðum førunum var arbeiðsvikan roknað til 5 arbeiðsdagar og ikki 7, sum kærunevndin tók avgerð um í máli nr. 04-01-151-17. Feilur var í øðrum útgjaldinum, tí sjómaðurin hevði ikki fingið sjúkradagpening fyri halgidagarnar. Sambært Almannaverkinum áttu báðir sjómenninir at verið skrásettir við 7 daga arbeiðsviku.

Sambært Almannamálaráðnum er talan um feil í grundskrásetingini. Hitt málið verður tikið upp til nýggja viðgerð.

8.5 Samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima (LG 2014/212-0216)

Í 2014 hava vit grannskoðað lógarbundnu játtanina á høvuðskontu 12.21.6.10 “Ansingarsamsýning”. Vit kannaðu um roknskapurin er rættur og um ansararnir lúka treytirnar í lóg, kunngerð og leiðbeining hjá Almannaverkinum.

Roknskapartøl, lógargrundarlag o.a.

Útreiðslurnar til ansingarsamsýning hava verið minkandi seinastu árini, og frá 1. januar 2015 er eldraøkið lagt til kommunurnar at umsita. Tøl fyri seinastu fimm árini:

Eldraøkið lagt til kommunurnar at umsita.

t.kr.

Ár	2010	2011	2012	2013	2014
Samsýning	13.554	12.902	11.641	10.156	8.347

Sambært Almannaverkinum er orsøkin til minkandi útreiðslurnar, at fleiri røktarheim eru bygd seinastu árini, og hevur tað hjálpt upp á tørvin at vera um óhjálpin og eldri í egnum heimi.

Ansingarsamsýningin var 10.789 kr. um mánaðin í 2014.

Ll. nr. 64/1984 “um samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima” er tikin av 1. januar 2015. Lógin ásetti, at tørvurin á røkt og hjáveru skuldi vera støðugur, og at samsýningin var tann sama sum miðal fyritíðarpensjón. Samsýningin var grundupphædd, viðbót og avlamisviðbót, og í 2014 var upphæddin 10.789 kr. um mánaðin.

Áður galdandi kunngerð nr. 58/2004 “um umsiting av lóg um samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima” varð sett í gildi 20 ár eftir, at lógin varð samtykt. Í kunngerðini vóru neyvari reglur um t.d., hvør kundi verða ansaður, og hvør kundi fáa samsýning.

Eisini vóru treytir og krøv til tann, ið ansaði, og um nær samsýningin helt uppat, tá ið tann óhjálpni fekk heimahjálp ella umlætting v.m. Í kunngerðin vóru eisini reglur um grundarlagið fyri avgerð um stødd av ansingarsamsýning og um rættin hjá ansara til feriu.

Við støði í lógini og kunngerðini hevur Almannaverkið orðað leiðbeining nr. SA-1 “samsýning fyri at ansa”.

Umsitingin løgd til kommunurnar

Umsitingin av ansingarsamsýningini fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima er frá 1. januar 2015 løgd til kommunurnar. Sambært § 12 í Ll. nr. 19/2014 kunnu kommunur taka avgerð um at veita ansingarsamsýning og hava eisini ábyrgd av teimum borgarum, ið verða ansaðir heima. Áðrenn ein kommuna rindar einum ansara samsýning, skal hon tó senda fráboðan til Almannaverkið.

Við yvirtøkuni vórðu virkin ansingarmál avritað og send viðkomandi kommunusamskipan sum innskrivað bræv. Bæði tann, sum fekk ansingarsamsýning, og tann, sum bleiv ansaður, fingu kunning. Við árslok 2014 vóru 13 óavgreidd mál um ansingarsamsýning send kommunusamstørvunum. Í 2015 hevur Almannaverkið fingið eina fráboðan um, at ansingarsamsýning er játtað.

Sambært Almannamálaráðnum er orsøkin til, at kommunurnar skulu boða Almannaverkinum frá, at veitingin kann hava ávirkan á pensjónsviðurskiftini hjá teimum, sum verður ansaði. Somuleiðis kann samsýningin hava ávirkan á inntøku og skattaviðurskiftini hjá ansarum.

Úrslitið av stakroyndum

81 fingu ansingarsamsýning.

Ansingarsamsýning kann veitast fyri at ansa persóni, sum er fyltur 67 ár og er óhjálpin, og um viðkomandi hevur tørv á røkt í minsta lagi 6 mánaðir. Í 2014 fingu 81 fólk ansingarsamsýning. Vit kannaðu 10 mál og høvdu onki at finnast at.

Frítíð við løn

Sambært kunngerðini hevur ansari rætt til feriu í 5 vikur og hevur rætt til samsýning í feriuni sambært leiðbeiningini hjá Almannaverkinum. Feriuavloysari fær somu samsýning sum ansari.

Landsgrannskoðanin spurdi Almannaverkið, um ansingarsamsýningin er fevnd av Ll. nr. 30/1986 “um frítíð við løn”

Almannaverkið svaraði, at í viðmerkingum til lógina um ansingarsamsýning er ikki umrøtt um frítíðarløn skal gjaldast av ella leggjast afturat samsýningini. Tí hevur Almannaverkið mett, at grundarlag er ikki at veita stuðul til frítíðarløn. Ansari hevur fingið samsýning fyri ansing tær 5 vikurnar viðkomandi hevur verið í feriu. Við í metingini er eisini, at tá ið ein er settur sum ansari, hevur ikki verið talan um vanlig arbeiðsgevara- og løntakaraviðurskifti. Vanligar reglur á arbeiðsmarknaðinum eru ikki galdandi, tí lønin verður regulerað sambært lóg, og ansarin hevur harvið ikki samráðingarrætt. Lýst verður ikki eftir ansara, og vanligar uppsagnartreytir eru ikki galdandi.

Ivamál um frítíðarískoyti.

Sambært Almannamálaráðnum er tað Vinnumálaráðið, sum umsitur frítíðarlógina. Tá ið skipanin við ansingarsamsýning varð løgd til kommunurnar at umsita, vórðu tað ikki gjørdar stórvegis broytingar í skipanini. K. nr. 127/2014 varð tilevnað í samráði við kommunurnar og skal endurskoðast um ársskiftið 2015/2016. Tá ið kunngerðin verður endurskoðað, fer Almannamálaráðið at taka málið upp við Vinnumálaráðið, um ansingarsamsýningin skal vera fevnd av frítíðarlógini.

Reglur um 20 tímar um vikuna

Samsýningin er treytað av, at ansarin ikki í størri mun átekur sær annað lønandi arbeiði. Hann kann í mesta lagi arbeiða 20 tímar um vikuna uttan fyri heimið og skal tá tryggja, at tann óhjálpni fær røkt og hjáveru, í tann mun tað er neyðugt.

Spurd, hvussu Almannaverkið tryggjar, at reglurnar um teir 20 tímarnir vórðu hildnar, svaraði Almannaverkið, at tey bjóða umsøkjarunum til samrøðu, har tey kunna um treytirnar fyri at fáa ansingarsamsýning. Vísir tað seg, at umsøkjari arbeiðir meira enn 20 tímar um vikuna, krevur Almannaverkið, at tímatalið verður lækkað. Umsøkjarar skriva eisini undir treytirnar m.a. um skyldu at ansa og veita røkt til tann óhjálpna og ikki at taka á seg annað lønt arbeiði enn tað, sum kunnað er um í sambandi við umsóknina.

Sambært Almannamálaráðnum hevur talan verið um eina skipan, har heimatænastan eisini hevur verið inni í myndini og havt eitt óbeinleiðis eftirlit við støðuni. Heimatænastan hevði eisini skyldu at boða frá, um treytirnar ikki vórðu hildnar. Áðrenn eldraøkið varð lagt til kommunurnar at umsita, var Almannaverkið

farið undir at fyrireika eitt tættari skipað samstarv við heimatænastuna um, hvussu eftirlitið skuldi fremjast.

Landsgrannskoðanin heldur, at Almannaverkið átti at havt regluligt eftirlit við, at treytirnar um hægst 20 tímar vóru fylgdar.

Almannaverkið átti at havt regluligt eftirlit við, um treytirnar vórðu fylgdar.

Reglur um at steðga samsýningini

Sambært kunngerðini steðgaði samsýningin, tá ið tann óhjálpni fór til umlætting, á røktarheim v.m., um tíðarskeiðið vardi longur enn ein mánað. Í vegleiðingini verður orðingin "fleiri enn 30 dagar" nýtt.

Landsgrannskoðanin spurdi, hvussu Almannaverkið fekk fráboðan um, at tann óhjálpni fór á ellis-/røktarheim, sjúkrahús ella sambýli. Almannaverkið svaraði, at ellis-/røktarheimini sendu fráboðan, tá tann óhjálpni varð innskrivaður og at ansararnir av og á boðaðu frá.

Eftir at sjúkrahúsini fingu talgilda heilsuskipanina, hevur Almannaverkið onga fráboðan fingið frá sjúkrahúsunum, hóast Almannaverkið hevur sent sjúkrahúsunum skrivliga fráboðan um teirra skyldu at boða frá.

Onga fráboðan frá sjúkrahúsunum.

Sambært Almannamálaráðnum kom órógv á samskiftið millum Almannaverkið og sjúkrahúsini, tá ið talgilda heilsuskipanin varð tikin í brúk. Ein partur av hesum kom tó í rættlag, tá ið pensjónslógin varð broytt, og lógin um uppihald á stovni varð sett úr gildi í 2012, ímeðan aðrir partar hava staðið óloystir.

Eingin læknaváttan fyri ansaran

Sambært § 13 í kunngerðini skal m.a. læknaváttan um heilsustøðuna hjá ansarum og frágreiðing og tilráðing frá heimarøktini fyriliggja. Líknandi krøv eru í leiðbeiningini. Almannaverkið krevur bert læknaváttanir í ivamálum.

Læknaváttanir um heilsustøðuna eru bert eru í fáum málum. Onkur umsøkjari hevði viðmerkt, at hann hevði ávísar heilsutrupulleikar, og ein ansari var yvir 80 ár.

Læknaváttan er í fáum málum.

Landsgrannskoðanin heldur, at tað er ikki í tráð við ásetingarnar í kunngerðini at Almannaverkið ikki at biður um læknaváttanir frá ansarum, tí tað er ein partur av grundarlagnum fyri avgerðini.

Almannamálaráðið er samt við Landsgrannskoðanini og heldur, at rættast er at broyta kunngerðina soleiðis, at tað verður ásett, nær læknaváttan er kravd.

Eftirlitsskylda

Okkara kanning vísir, at Almannaverkið hevur ikki havt eftirlit við, um røktin heima nøktaði tørvin, ella um tørvur framvegis var á henni. Flestu málini vóru gomul, og høvdu ansararnir sostatt fingið ansingarsamsýning í fleiri ár. Almannaverkið hevur havt nøkur mál, har samsýningin er steðgað, tí fráboðan er komin um, at ansarin ikki hevur røkt sína uppgávu til fulnar. Almannaverkið er ikki vitandi um nakað mál, har røktartørvurin er minkaður, eftir at ansingarsamsýning er játtað.

Sambært Almannaverkinum er onki ásett í lógini ella kunngerðini um regluligt eftirlit, ið skal tryggja, at røktin samsvarar við ansingartørvin.

Almannaverkið hevur mett, at tørvur var á eftirliti, og hevði gjørt avtalu við Heimatænastuna um regluligar vitjanir. Orsakað av bygnaðarbroyting v.m. varð tað tó ongantíð sett í verk.

Landsgrannskoðanin heldur tað ikki vera nøktandi, at onki skipað eftirlit hevur verið, sum tryggjar, at tørvurin á ansing og røkt varð nøktaður.

Ikki nøktandi, at onki skipað eftirlit er.

8.6 Eldri og brekað (LG 2014/212-0216)

Í seinastu frágreiðingunum hava vit umrøtt grannskoðanina av játtanini til eldri og brekað, m.a. spurningar um váðameting og KT trygd.

Í oktober 2014 kunnaði landsstýriskvinnan um, at KT deildin hjá Almannaverkinum hevði gjørt sjálva váðametingina, og at arbeitt varð við at gera mannagongdir fyri, hvussu ymisku váðarnir skulu handfarast. Talan var um eitt størri arbeiði, ið fór at taka langa tíð.

Arbeiðið at handfara KT-trygd er útsett.

Í august 2015 er onki hent í málinum orsakað av stórum arbeiðstrýsti vegna útlegging av eldraøkinum. Almannaverkið hevur tí útsett arbeiðið at gera mannagongdir fyri, hvussu váðarnir skulu handfarast til 2. ársfjórðing 2016.

Landsgrannskoðanin vísti á, at viðkvæmar persónsupplýsingar viðvíkjandi búfólkum vórðu skrivaðar í samstarvsbøkur.

Landsstýriskvinnan kunnaði í 2014 um, at Almannaverkið hevði samskift við Dátueftirlitið um loysnina við SharePoint[11], og at Almannaverkið heldur, at loysnin lýkur galdandi reglur um dátutrygd. Sambært Almannamálaráðnum brúka allar eindirnar uttan tvær SharePoint. Ætlanin er, at tær fara at brúka skipanina í september/oktober 2015.

8.7 Vanlig forsorg (LG 2014/212-0217)

Dagføring av forsorgarlógini o.a.

Síðani nítiárini hava skiftandi landsstýrismenn í almannamálum boðað frá, at teir arbeiddu við nýggjari lóggávu, og at øll almannalóggávan innan stutta tíð fór at verða lagað til føroysk nútíðarviðurskifti.

Í oktober 2013 ásannaði landsstýriskvinnan, at forsorgarlóggávan átti ikki at verða savnað í einari einstakari lóg, og tí varð upprunaliga verkætlanin broytt. Yvirskipað var ætlanin at gera nýggja lóggávu um uppihaldsveitingar og nýggja lóggávu um tænastur. Tær skuldu, sum frá leið, avloysa verandi forsorgarlóg.

Fyrsta stigið í broytingunum var skipanin við hjálparráðum frá 2010. Annað stigið var lógin um arbeiðsfremjandi tiltøk, sum kom í gildi í januar 2013. Enn vantar at endurskoða ásetingarnar um fyribils og varandi hjálp, um tilboð til børn við breki og um tilboð til eldri og vaksin við serligum tørvi.

Spurd, hevur landsstýriskvinnan greitt frá, at hon í apríl 2015 setti ein arbeiðsbólk at orða ein tænastupolitikk, sum skuldi vera grundarsteinurin undir einari tænastulóg. Lógin skuldi betra innihaldið í tænastum og rættartrygdina hjá borgarum við serligum avbjóðingum, ið hava tørv á tænastum. Miðað varð eftir at náa á mál í august 2015, men arbeiðið steðgaði, tá ið val varð skrivað út. Tá ið nýggj samgonga er skipað eftir valið skal støða eisini takast til, hvussu farast skal fram í sambandi við ásetingar í §§ 9, 13, 15 og § 17, stk. 3, um fyribils- og varandi hjálp v.m.

Í oktober 2014 greiddi landsstýriskvinnan frá, at nýggj § 27[12] var gjørd í forsorgarlógini, og nýggjar ásetingar innan bústaðir og virknistænastu vóru samtyktar í Løgtinginum í desember 2014. Eisini var nýggj lóggáva gjørd um heimatænastu,

[11] Nýtsluforrit at samskifta, deila vitan við og til at handfara skjøl.
[12] T.d. tilboð til persónar við týðandi likamligum ella sálarligum breki ella víðfevndum sosialum trupulleikum kann veitast á bú- og viðgerðarstovnum og á stovnslíknandi fyriskipanum

eldrarøkt v.m. í sambandi við, at eldrarøktin varð løgd til kommunurnar at umsita frá 1. januar 2015.

Arbeitt verður við at nútímansgera reglur um stuðulsskipanir.

Landsstýriskvinnan kunnaði eisini um, at arbeitt varð við at nútímansgera reglur um stuðulsskipanir, m.a. BPA[13]. BPA er ein skipan, sum í størri mun gevur tí einstaka møguleika at leggja gerandisdagin til rættis, og hevur greiðari reglur um menningarætlanir fyri tann einstaka, reglur um eftirlit og almennar reglur um valdsnýtslu. Arbeiðið skuldi væntandi verða liðugt í 2015.

Í august 2015 hevur landsstýriskvinnan greitt frá, at Almannaverkið royndarkoyrdi eina BPA-líknandi skipan í tíðarskeiðnum september 2014 til apríl 2015. Í mai 2015 eftirmetti Almannaverkið royndarverkætlanina og lat Almannamálaráðnum eina skrivliga eftirmeting. Arbeiðsbólkurin, sum skuldi orða ein tænastupolitikk, skuldi sambært arbeiðssetninginum eisini gera tilmæli viðvíkjandi einari føroyskari BPA skipan.

8.8 § 15 í Forsorgarlógini (LG 2014/212-0217)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað útgjøld hjá Almannaverkinum fyri 2014, sum eru heimilað í § 15 í forsorgarlógini.

Vit kannaðu mannagongdirnar viðvíkjandi umsiting av stuðli til stak- og sjúkuútreiðslur. Grundarlagið undir grannskoðanini vóru útgjaldingar í VFS-skipanini hjá Almannaverkinum. Í tí grundarlagnum eru sýttar umsóknir ikki við. Við stakkroyndum samanhildu vit avgerðir um útgjøld við lógargrundarlag og vegleiðingar hjá Almannaverkinum. Vit kannaðu eisini, um avgerðirnar vóru skjalfestar, grundgivnar, og um tær fylgdu fyrisitingarlógini.

Heimild og umsiting

Við heimild í § 15, stk. 1, í lógini kann Almannaverkið veita borgara stuðul at rinda neyðuga og rímiliga grundaða stakútreiðslu, um so er, at persónurin við at rinda útreiðsluna sjálvur minkar avgerandi um fíggjarligu møguleikarnar hjá sær og familjuni at klára seg sjálvi í framtíðini.

Hevur borgari útreiðslur til sjúkuviðgerð, heilivág, tannviðgerð e.l., sum lógin um sjúkratrygd e.a. ikki fevnir um, kann Almannaverkið sambært § 15, stk. 2, veita stuðul, um so er, at persónurin ikki megnar at rinda sjálvur.

Sambært § 15, stk. 3, kann fíggjarligur stuðul verða latin til uppihald á eftirbataheimi, um persónurin er ávístur av lækna. Almannaverkið hevur ikki rindað út stuðul við heimild í § 15, stk. 3. Stuðulin verður latin til hvíldarheimið Nainu eftir rokning, tá ið borgari hevur verið á hvíldarheiminum.

Almannaverkið hevur orðað skrivligar vegleiðingar at umsita útgjaldið av stak- og sjúkuútreiðslum eftir. Í vegleiðingunum er greitt ásett, at tær eru vegleiðandi, og at víkjast kann frá teimum. Játtað verður altíð til veruligan kostnað. Øll frávik skulu leggjast fyri deildarleiðara.

543 umsóknir til stak- og sjúkuútreiðslur.

Almannaverkið hevur í 2014 skrásett 543 umsóknir um stuðul til stak- og sjúkuútreiðslur. Umsóknarbløð saman við kunning um treytir v.m. fyri at fáa stuðul eru á heimasíðuni.

Roknskapartøl

Játtanin til stak- og sjúkuútreiðslur er á høvuðskontu 12.21.7.01 “Vanlig forsorg”, undirkonta 03. Í 2014 vóru 1.951 t.kr. játtaðar, nýtslan varð 2.278 t.kr.

[13] Borgarastýrd persónlig atstøðisskipan.

Í 2014 vóru útreiðslurnar 17% lægri enn í 2013 og 38% lægri enn í 2011. Sambært Almannaverkinum finst onki eintýðugt svar, hví stak- og sjúkuútreiðslurnar eru lækkaðar, men ein orsøk kann vera, at síðani 2012 hevur forsorgarveitingin verið ein bruttoveiting. Almannaverkið er av tí fatan, at viðskiftafólkini sjálvi megna at rinda útreiðslurnar, ella at tey innrætta seg eftir veitingini. Áður vóru veitingarnar netto-veitingar, veittar eftir tørvsmeting.

Úrslitið av stakroyndum

Av stakroyndunum vit tóku vóru feilir í 9%. Í einum føri var skeivt konterað, tí talan var um stuðul til hjálparráð sambært § 18 b í forsorgarlógini. Almannamálaráðið harmast feilirnar, men ásannar at talan er um einstakar málsviðgerðarfeilir, og at ongi mál eru, sum geva ábending um systematiskan feil.

Sum heild vórðu ásetingarnar í innanhýsis vegleiðingunum fylgdar, men onkur avgerð er skjalfest uttan greiða grundgeving. Tað ger, at ivamál kann vera, um útreiðslan er heimilað, hvør heimildin er, og um leiðbeiningar eru fylgdar. Landsgrannskoðanin mælti Almannaverkinum til at grundgeva greitt fyri avgerðunum við tilvísing til heimildir. Almannaverkið tók undir við tilmælinum.

Í onkrum máli vantaði játtanarskriv. Sambært Almannaverkinum er talan um mistak, tí játtanar- ella sýtanarskriv skulu sendast borgarum beinanvegin.

Almannaverkið hevur ikki altíð skjalfest telefonsamskifti ímillum stovnin og borgaran. Landsgrannskoðanin mælti til, at alt telefonsamskifti verður skjalfest í journal.

Upphæddirnar í vegleiðingunum eru leiðbeinandi. Landsgrannskoðanin heldur tí, at borgarin sambært fyrisitingarlógini eigur at fáa skrivliga grundgeving og kæru-vegleiðing, tá ið hann fær partvísa játtan. Almannaverkið tekur undir við Landsgrannskoðanini

8.9 Arbeiðsfremjandi tiltøk (LG 2014/212-0217)

Í seinastu frágreiðingini umrøddu vit umsitingina av nýggju lógini um arbeiðsfremjandi tiltøk.

Sum ásett í lógini lat landsstýriskvinnan Løgtinginum eina eftirmeting av lógini í sambandi við viðgerðina av Lm. nr. 147/2014 “um broyting í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk”. Endamálið við eftirmetingini var at lýsa, um lógin virkaði eftir ætlan, at lýsa møguligar forðingar í mun til fyrisitingina av lógini og aðrar styrkir og vansar. Frágreiðingin hevði við sær eina røð av tilmælum um broytingar, sum høvdu til endamáls at fáa eina meira fullfíggjaða lóg.

Vegleiðingar og mannagongdir vanta.

Ein av niðurstøðunum hjá Landsgrannskoðanini var, at skrivligar vegleiðingar og mannagongdir vantaðu um annan stuðul, ið verður veittur til tilfar, útgerð og aðrar útreiðslur sambært § 19.

Bruttoveitingar og frítøka fyri skatt

Sambært lógini um arbeiðsfremjandi tiltøk eru stuðulsveitingarnar skattskyldugar bruttoveitingar.

Í § 29, stk. 1, nr. 13, í skattalógini[14] er ásett, at veitingar eftir § 7 og § 12, stk. 3, 4 og 8 í lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk eru ikki skattskyldugar. Tað merkir, at virknisviðbótin er ikki skattskyldug.

[14] Ll. nr. 86/1983 “um landsskatt og kommunuskatt”.

Landsgrannskoðanin helt, at frítøkan av § 12, stk. 8, er ein feilur, tí stk. 8 ásetir nær stuðulstíðarskeiðið byrjar. Tað eru ikki aðrar frítøkur fyri skattskyldu í skattalógini fyri veitingar eftir lógini um arbeiðsfremjandi tiltøk, so sum veitingar eftir § 19. Landsgrannskoðanin mælti til, at støða varð tikin til spurningin um skattskylduna, tá skipanin skuldi endurmetast.

Almannamálaráðið hevur víst á, at talan var um eitt mistak, tí tað var § 12, stk. 9, sum skuldi frítakast fyri skattskyldu. Mistakið varð rættað við løgtingslóg nr. 116/2014 frá 15. desember 2014 "um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt". Tað merkir, at veitingar eftir § 19 í lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk eru ikki skattskyldugar.

8.10 Løn, setanir o.a. í Nærverkinum (LG 2014/511-0000)

Í seinastu frágreiðingum okkara eru ávís viðurskifti um lønir, setanir o.a. í Almannaverkinum (Nærverkinum) umrødd.

Í august 2015 hevur landsstýriskvinnan kunnað um, at lønarkontórið hjá Almannaverkinum er flutt til Gjaldstovuna, og at lønarviðurskiftini hjá Almannaverkinum verða nú avgreidd umvegis web-løn.

Landsgrannskoðanin ivaðist í, um tað var í tráð við § 12, stk. 2, í avtaluni frá 17. desember 2007 millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið, tá ið starvsfólk, sum eru í fulltíðarstarvi hjá Almannaverkinum (Nærverkinum), harumframt arbeiddu eyka hjá sama arbeiðsgevara uttan at fáa yvirtíð goldna.

Í oktober 2014 heitti Almannamálaráðið á Fíggjarmálaráðið um at taka støðu til málið.

Halda nú sáttmálan, tá ið arbeitt verður yvir.

Í august 2015 hevur landsstýriskvinnan kunnað um, at sambært Fíggjarmálaráðnum skal ein arbeiðsgevari halda sáttmálan og kann ikki biðja fólk arbeiða yvir fyri vanliga tímaløn. Bjóðar eitt starvsfólk sær til at arbeiða yvir fyri vanliga tímaløn, er tað í stríð við sáttmálan. Almannaverkið hevur tikið niðurstøðuna hjá Fíggjarmálaráðnum til eftirtektar.

Í 2010 staðfesti Landsgrannskoðanin, at í fleiri førum høvdu heilsu- og heimahjálparar ikki fingið eftirløn goldna fyri fyrsta árið, teir høvdu verið í starvi. Landsgrannskoðanin helt tað ikki vera í tráð við reglurnar í § 11 í sáttmálanum millum Heilsuhjálparafelag Føroya og Fíggjarmálaráðið.

Løgtingsgrannskoðararnir mæltu í februar 2015 landsstýriskvinnuni til at fáa viðurskiftini í rættlag beinanvegin.

Eftirlønin hjá tímaløntum heilsu- og heimahjálparum er avgreidd.

Landsstýriskvinnan hevur boðað frá, at málið nú er avgreitt. Starvsfólkini hava fingið eftirlønina útgoldna.